Hvat lærir Bíblian?

JW.ORG®

Fá eitt ókeypis bíbliuskeið

bhs-FR
200423

Hvat lærir Bíblian?

HESA BÓKINA EIGUR

Myndir:
■ Síða 25: WHO (Edouard Boubat)
■ Síðurnar 96-97: Spreinging: Eftir einari mynd frá USAF. Barn: Eftir einari mynd frá WHO (W. Cutting)

Henda útgávan er ikki til sølu. Hon er framleidd sum liður í einum heimsumfatandi bíbliuundirvísingararbeiði, ið verður fíggjað við sjálvbodnum stuðli.

Um tú vilt lata stuðul, kanst tú fara inn á donate.jw.org.

Stendur einki annað viðmerkt, eru bíbliuorðini eftir umseting Victor Danielsens, endurskoðaðu útgávuni 1974. © Hin Føroyski Bíbliugrunnurin.
Styttingin *NW* vísir til *New World Translation of the Holy Scriptures.*
Styttingin Dahl/Viderø vísir til umsetingina eftir Jákup Dahl og Kristian Osvald Viderø. © Føroyska Bíbliufelagið.
Styttingin *NS* vísir til *Nýggja Sáttmálan.* © Føroyska Bíbliufelagið.

What Can the Bible Teach Us?
Prentað í apríl 2020

Faroese (*bhs*-FR)

© 2020
Watch Tower Bible and Tract Society of Pennsylvania

ÚTGEVARAR:
Jehova vitni
Stenhusvej 28
4300 Holbæk
Danmark

INNIHALD

KAPITTUL **SÍÐA**

Hví sær heimurin út, sum hann ger? **3**

1. Hvør er Gud? **8**
2. Ein bók frá Gudi **19**
3. Hvat er Guds ætlan við okkum menniskjum? **29**
4. Hvør er Jesus Kristus? **40**
5. Størsta gávan frá Gudi **52**
6. Hvat hendir, tá ið vit doyggja? **62**
7. Tey deyðu fáa lívið aftur! **71**
8. Hvat er Guds ríki? **83**
9. Er heimsins endi nær? **94**
10. Einglar og illir andar **105**
11. Hví hendir so nógv ónt? **116**
12. Hvussu kanst tú blíva vinur við Gud? **124**
13. Lívið er ein gáva **135**
14. Eitt trygt og gott familjulív **145**
15. Hvussu skulu vit tilbiðja Gud? **154**
16. Vel at tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan **164**
17. Hvussu skulu vit biðja? **174**
18. Skal eg lata meg doypa? **185**
19. Varðveit títt vinalag við Jehova **197**

Endagreinar **207**

HVÍ SÆR HEIMURIN ÚT, SUM HANN GER?

Í FJØLMIÐLUNUM hoyra vit dagliga um brotsverk, kríggj og yvirgang. Og tú hevur kanska sjálvur ymiskt at stríðast við. Tað kann vera, at tú hevur ringa heilsu ella hevur mist ein av tínum kæru.

Kanska hevur tú hugsað um hesar spurningarnar:

- **Hví hendir so nógv ónt í heiminum?**
- **Hvar kann eg fáa hjálp til at klára mínar trupulleikar?**
- **Verður nakrantíð friður?**

Tað ber faktiskt til at finna svarini í Bíbliuni.

BÍBLIAN LOVAR OKKUM EINA FANTASTISKA FRAMTÍÐ

Eingin hevur pínu, verður gamal ella doyr. – Opinberingin 21:4

„Tá skal hin lamni leypa sum hjørtur.“ – Esaias 35:6

„Tá skulu eygu hinna blindu verða opnað.“ – Esaias 35:5



Tey deyðu fáa lívið aftur.
– Jóhannes 5:28, 29

Eingin verður sjúkur.
– Esaias 33:24

Øll fáa nokk at eta.
– Sálmur 72:16

BÍBLIAN KANN HJÁLPA TÆR

Alt hetta virkar kanska ov gott til at vera satt. Men Gud hevur faktiskt lovað at gera allar hesar broytingarnar heilt skjótt. Og Bíblian fortelur, hvussu hann fer at gera tað.

Bíblian fortelur eisini, hvussu vit kunnu blíva lukkulig og fáa eitt gott lív longu nú. Er okkurt, sum tú stúrir fyri í løtuni? Hevur tú til dømis trupulleikar við tí fíggjarliga, við heilsuni ella í familjuni? Ella hevur tú mist ein kæran? Bíblian gevur góð ráð, sum kunnu hjálpa tær í slíkum støðum. Hon svarar millum annað upp á spurningar sum hesar:

- **Hví hendir so nógv ónt?**
- **Hvussu kunnu vit klára trupulleikar?**
- **Hvussu kunnu vit fáa eitt trygt og gott familjulív?**
- **Hvat hendir, tá ið vit doyggja?**
- **Sleppa vit nakrantíð at síggja okkara kæru aftur?**
- **Hví kunnu vit líta á, at Gud heldur alt, sum hann hevur lovað?**

Kanska ert tú eitt sindur forvitin eftir at vita, hvat Bíblian lærir. Um so er, kann henda bókin hjálpa tær. Spurningar eru til tekstin, sum hjálpa tær at skilja Bíbliuna betur. Milliónir av menniskjum hava fingið nógv burtur úr at tosa við Jehova vitni um Bíbliuna, og tað vóna vit eisini, at tú fært. Um tú gevur tær stundir til at kanna Bíbliuna, finnur tú út av, at hon kann læra teg nógv.

HVUSSU FINNUR TÚ RUNT Í BÍBLIUNI?

Í BÍBLIUNI eru 66 bøkur. Tær eru allar býttar upp í kapitlar og ørindi. Hetta ger tað lættari at finna runt í Bíbliuni. Í hesi bókini verður ofta víst til bíbliuørindi. Fyrsta talið, sum stendur eftir navnið á bíbliubókini, vísir til kapittulin, og næsta talið vísir til ørindið. Stendur til dømis „2. Timoteusarbræv 3:16“, vísir tað til seinna brævið til Timoteus, kapittul 3, ørindi 16.

Tá ið tú leitar eftir bíbliuørindunum, sum víst er til, lærir tú skjótt at finna runt í Bíbliuni. Tú kundi eisini lisið eitt sindur í Bíbliuni hvønn dag. Lesur tú tríggjar til fimm kapitlar um dagin, hevur tú lisið alla Bíbliuna upp á eitt ár.

KAPITTUL 1

HVØR ER GUD?

BØRN eru forvitin og spyrja nógv. Tá ið tú hevur forklárað teimum okkurt, spyrja tey ofta: 'Hví?' Og tú nært illa nokk at svara, áðrenn tey aftur spyrja: 'Men hví?'

2 Øll seta spurningar, ung sum gomul. Tað kann vera um nakað so einfalt sum, hvat vit skulu eta, ella hvat vit skulu fara í. Tað kann eisini vera, at vit hugsa um teir stóru spurningarnar í lívinum. Men um vit ikki føla, at spurningarnir verða svaraðir nóg væl, hava vit kanska ikki hug at spyrja meira.

3 Nøkur halda, at svarini upp á lívsins stóru spurningar standa í Bíbliuni, men tey halda samstundis, at Bíblian er alt ov ring at skilja. Tey hugsa, at tað bara eru prestar og gudfrøðingar, sum kunnu svara upp á slíkar spurningar. Onnur lata kanska vera við at seta spurningar, tí tey halda tað vera flovisligt, at tey ikki kenna svarini. Hvat heldur tú?

4 Tú hevur kanska spurt teg sjálvan: 'Hví eru vit her? Hvat hendir við okkum, tá ið vit doyggja? Hvussu er Gud?' Jesus segði: „Biðið, so skal tykkum verða givið! Leitið, so skulu tit finna! Bankið uppá, so skal tykkum

---

1, 2. Hvørjar spurningar hugsa fólk ofta um?

3. Hví halda nógv, at tað er ringt at finna svarini upp á lívsins stóru spurningar?

4, 5. Hvørjar spurningar vilt tú gjarna hava svar upp á? Hví skalt tú halda fram at leita eftir svarunum?

verða latið upp!“ (Matteus 7:7) Gev ikki uppat at leita, fyrr enn tú hevur fingið svar.

5 Heldur tú fram at leita, so finnur tú svarini í Bíbliuni. (Orðtøkini 2:1-5) Og tey eru ikki ring at skilja. Tað, sum tú lærir, kann geva tær eitt gott lív longu nú og vón um eina fantastiska framtíð. Latið okkum kanna ein spurning, sum nógv hava hugsað um.

ER GUD GÓÐUR VIÐ OKKUM?

6 Nógv halda, at Gud er líkaglaður við okkum. Tey hugsa, at heimurin átti at sæð nógv øðrvísi út, um Gud var góður við okkum. Kríggj, hatur og neyð er allastaðni. Fólk verða sjúk og doyggja. Nøkur halda, at um Gud var góður við okkum, so hevði hann gjørt nakað við alt hetta.

7 Tá ið okkurt ræðuligt hendir, siga nakrir prestar og samkomuleiðarar, at tað var Guds vilji, altso at Gud vildi, at tað skuldi henda. Soleiðis geva teir í veruleikanum Gudi skyldina fyri tað, sum er hent. Og tað hevur fingið nøkur at halda, at hann er óndur. Men Bíblian lærir, at Gud *ongantíð ger nakað ónt.* Í Jákupsbrævinum 1:13 (*NS*) fáa vit at vita, at Gud ikki roynir nakran við nøkrum óndum. Har stendur: „Tit mugu ikki ákæra Gud og siga, at tit verða freistað [ella roynd] av honum, tí Gud er ikki freistaður av nøkrum illum, og hann freistar ongan.“ Gud ger altso ongantíð nakað ónt. Hann loyvir tí, men hann er *ongantíð orsøkin* til tað. – **Les Jeremias 29:11.**

---

6. Hví halda nógv, at Gud er líkaglaður við okkum?
7. (a) Hvussu hava nakrir prestar og samkomuleiðarar givið fólki ta fatan, at Gud er óndur? (b) Hví kunnu vit vera vís í, at Gud ikki er orsøk til tað ónda, sum hendir?

8 Ímynda tær ein ungan mann, sum enn býr heima hjá foreldrunum. Pápi hansara er sera góður við hann og hevur lært hann at taka góðar avgerðir. Men so vil sonurin knappliga ikki lurta eftir pápa sínum longur og flytur heimaníframá. Hann ber seg býttisliga at og fær trupulleikar. Hevði tú hugsað, at tað var pápin, sum hevði skyldina í trupulleikunum, tí hann ikki forðaði soninum í at flyta heimaníframá? Sjálvandi ikki! (Lukas 15:11-13) Líkasum hesin pápin hevur Gud ikki forðað menniskjum í at gera uppreistur ímóti honum. Tí mugu vit minnast til, at tað ikki er Gud, sum er orsøkin til alt tað ræðuliga, sum hendir. Tað hevði verið órættvíst at givið honum skyldina fyri tað.

9 Gud hevur eina sera góða grund til at bíða við at gera nakað við alt tað ræðuliga, sum hendir. Í 11. kapitli fáa vit at vita, hvat Bíblian sigur um tað. Men vit kunnu vera vís í, at Gud er góður við okkum, og at tað ongantíð er hann, sum er orsøkin til okkara trupulleikar. Hann er í veruleikanum tann einasti, sum kann loysa teir. – Esaias 33:2.

10 Bíblian sigur, at Gud er heilagur. (Esaias 6:3) Tað merkir, at alt, sum hann ger, er gott. Tí kunnu vit líta á hann. Men soleiðis er ikki við okkum menniskjum. Vit bera okkum ikki altíð rætt at. Og sjálvt tann besti stjórnarleiðarin hevur ikki vald at loysa allar trupulleikarnar hjá mannaættini. Eingin hevur líka stórt vald sum Gud. Hann er førur fyri at gera alt gott aftur, og hann fer eisini at gera tað. Hann fer at beina fyri øllum óndskapi. – **Les Sálm 37:9-11.**

8, 9. Hví hevði tað verið órættvíst at givið Gudi skyldina fyri okkara trupulleikar? Nevn eitt dømi.

10. Hví kunnu vit vera vís í, at Gud fer at loysa allar trupulleikar?

HVUSSU ÁVIRKAR TAÐ GUD, TÁ IÐ VIT IKKI HAVA TAÐ GOTT?

11 Hvussu ávirkar tað Gud at síggja alt tað, sum gongur fyri seg í heiminum? Hvussu ávirkar tað hann at síggja tað, sum tú hevur at stríðast við? Í Bíbliuni stendur, at Gud „elskar rætt". (Sálmur 37:28) Hann hatar órættvísi og at síggja menniskju líða neyð. Bíblian sigur, at tað „voldi Honum sorg í hjartanum" at síggja, hvussu heimurin fyrr í tíðini fyltist við óndskapi. (1. Mósebók 6:5, 6) Og Gud er ikki broyttur. (Malakias 3:6) Bíblian vísir týðiliga, at hann hevur umsorgan fyri okkum. – **Les 1. Pætursbræv 5:7.**

12 Bíblian sigur, at Gud skapti okkum soleiðis, at vit líkjast honum. (1. Mósebók 1:26) Tað merkir, at Gud gav okkum teir somu góðu eginleikarnar, sum hann hevur. So um tað pínir teg at síggja, hvussu ringt nøkur hava tað, man tað so ikki pína Gud uppaftur meira? Jú, avgjørt! Men hvussu vita vit tað?

13 Í Bíbliuni lesa vit, at „Gud er kærleiki". (1. Jóhannesarbræv 4:8) Alt, sum Gud ger, ger hann av kærleika. Vit eru før fyri at elska, tí Gud elskar. Hugsa um hetta: Um tú hevði kunnað beint fyri allari sorg og øllum órættvísi í heiminum, hevði tú so ikki gjørt tað? Sjálvandi! Tí tú ert ikki líkaglaður við, hvussu onnur hava tað. Hvussu so við Gudi? Hann er førur fyri at beina fyri allari sorg og øllum órættvísi, og hann fer eisini at gera tað, tí hann elskar okkum. Øll lyftini frá Gudi, sum eru nevnd fyrst í hesi bókini, gerast

---

11. Hvussu ávirkar tað Gud, tá ið vit ikki hava tað gott?
12, 13. (a) Hví eru vit før fyri at vísa kærleika, og hvussu ávirkar tað okkum at síggja trupulleikarnar í heiminum? (b) Hví kunnu vit vera vís í, at Gud fer at beina fyri allari sorg og øllum órættvísi?

veruleiki! Men fyri at fáa álit á hesi lyftini, mást tú læra meira um Gud.

GUD VIL, AT TÚ SKALT LÆRA HANN AT KENNA

14 Tað fyrsta, vit gera, táið vit gjarna vilja læra onkran at kenna, er vanliga at siga, hvussu vit eita. Hevur Gud eitt navn? Í nógvum átrúnaðum siga tey, at hann eitur Gud ella Harrin, men tað eru ikki nøvn. Tað eru bara heiti eins og „løgmaður“ ella „kongur“. Gud hevur eitt navn, hann eitur Jehova. Í Sálmi 83:19 stendur: „Lat teir sanna, at eingin uttan Tú eitur HARRIN*, hin hægsti yvir allari jørðini!“ Í teimum føroysku bíbliunum er ein styttur formur av Guds navni millum annað at finna í Opinberingini 19:6 sum ein partur av orðinum „halleluja“,ið merkir „prísið Jah“. Í nógvum bíblium stendur Guds navn fleiri túsund ferðir. Jehova vil altso, at vit skulu vita, hvussu hann eitur, og at vit skulu brúka

Táið tú gjarna vilt læra onkran at kenna, sigur tú honum, hvussu tú eitur. Í Bíbliuni sigur Gud okkum, hvussu hann eitur

* Í orðafrágreiðingini í umsetingini eftir Dahl/Viderø, útgávuni frá 2006, stendur at lesa undir Harrin: „Harrin í Gamla Testamenti av hebráiska orðinum adonaj, sagt um Guð. Navn hansara er Jahve, stytt Jah.“

14. Hvussu eitur Gud, og hvussu vita vit, at vit eiga at brúka hansara navn?

hansara navn. Hann hevur fortalt okkum, hvussu hann eitur, tí hann vil, at vit skulu blíva hansara vinir.

15 Guds navn, Jehova, merkir nakað heilt serligt. Tað merkir, at hann kann halda alt, sum hann lovar, og fullføra alt, sum hann setur sær fyri. Einki kann forða honum. Tað er bara hann, sum av røttum kann eita Jehova.*

* Í summum bíblium er navnið Jehova ikki at finna. Um tú hevur hug at vita meira um týdningin og úttaluna av Guds navni, kanst tú lesa endagrein 1.

15. Hvat merkir navnið Jehova?

16 Í Opinberingini 15:3 stendur: „Stór og undurfull eru verk Tíni Harri Gud, Tú Alvaldi!“ Hvat merkir heitið „tann alvaldi“? Tað merkir, at Jehova hevur størri vald enn nakar annar í alheiminum. Í 1. Timoteusarbrævi 1:17 verður Jehova nevndur „ævinnar kongur“. Heitið „ævinnar kongur“ merkir, at hann altíð hevur verið til. Og Sálmur 90:2 vísir, at hann eisini fer at vera til í allar ævir. Er tað ikki ótrúligt?

17 Tað er bara Jehova, sum er skaparin. Í Opinberingini 4:11 stendur: „Verdur ert Tú, Harri og Gud okkara, at fáa dýrd, heiður og mátt! Tí Tú hevur skapt alt, og tí Tú vildi tað, varð tað til, og varð tað skapt!“ Je-

16, 17. Hvat merkir heitið (a) „tann alvaldi“? (b) „ævinnar kongur“? (c) „skaparin“?

Ein pápi elskar síni børn, men okkara himmalski faðir elskar okkum enn meira

hova hevur skapt alt – líka frá einglunum í himli til stjørnurnar á luftini, fruktina á trøunum og fiskarnar í sjónum.

TÚ KANST BLÍVA VINUR VIÐ JEHOVA

18 Tá ið summi hoyra um, hvussu veldigur Jehova er, verða tey eitt sindur bangin og hugsa: 'Hví skuldi Gud lagt nakað í meg, tá ið hann hevur so stórt vald og er so langt burtur?' Men er tað soleiðis, Gud vil hava okkum at hugsa? Nei, als ikki! Jehova vil gjarna vera okkara vinur. Bíblian sigur, at Gud ikki er „langt frá nøkrum av okkum". (Ápostlasøgan 17:27) Gud vil, at tú skalt koma nær til hansara, og hann lovar, at „so skal Hann halda Seg nær til [tín]". – Jákupsbrævið 4:8.

19 Hvussu kanst tú blíva vinur við Gud? Jesus segði: „Hetta er hitt æviga lív, at tey kenna Teg, hin einasta sanna Gud, og tann, ið Tú sendi, Jesus Kristus." (Jóhannes 17:3) Halt fram at kanna Bíbliuna, tí so kemur tú at kenna Jehova og Jesus. Og tað kann geva tær ævigt lív. Vit hava longu lært, at „Gud er kærleiki". (1. Jóhannesarbræv 4:16) Men hann hevur eisini nógvar aðrar góðar eginleikar. Bíblian lærir, at Jehova er miskunnsamur og hevur samkenslu við okkum. (2. Mósebók 34:6) Jehova er „góður og til reiðar at fyrigeva". (Sálmur 86:5) Hann er tolin og trúfastur. (1. Korintbræv 1:9; 2. Pætursbræv 3:9) Tú fært nógv meira at vita um hansara góðu eginleikar, so hvørt sum tú lesur meira í Bíbliuni.

---

18. Hví halda summi, at tey ongantíð kunnu blíva vinir við Gud? Hvat sigur Bíblian um tað?

19. (a) Hvussu kanst tú blíva vinur við Gud? (b) Hvønn av eginleikunum hjá Jehova dámar tær best?

20 Hvussu kanst tú blíva vinur við Gud, um tú ikki sært hann? (Jóhannes 1:18; 4:24) Tá ið tú lesur um Jehova í Bíbliuni, fært tú nakað at vita um hansara tankar og kenslur. (Sálmur 27:4; Rómbrævið 1:20) Jú meira tú lærir Jehova at kenna, jú meira fert tú at elska hann, og títt vinalag við hann verður enn betri.

21 Tú fert at skilja, at Jehova er faðir okkara. (Matteus 6:9) Hann gav okkum lívið, og hann vil, at vit skulu hava tað so gott sum gjørligt. Tað er tað, ein góður pápi ynskir fyri síni børn. (Sálmur 36:10) Bíblian lærir, at tú kanst blíva vinur við Jehova. (Jákupsbrævið 2:23) Ja, hugsa tær! Jehova, sum hevur skapt alt, vil, at tú skalt vera hansara vinur!

22 Nøkur vilja kanska hava teg at gevast við at kanna Bíbliuna. Tey eru kanska bangin fyri, at tú fert at broyta trúgv. Men lat ongan forða tær í at blíva vinur við Jehova. Hann er tann besti vinurin, tú nakrantíð kanst fáa.

23 So hvørt sum tú kannar Bíbliuna, verður uttan iva okkurt, sum tú ikki skilur. Men so mást tú endiliga seta spurningar og biðja um hjálp til at skilja tað. Jesus segði, at vit skulu vera eyðmjúk sum smá børn, og børn spyrja nógv. (Matteus 18:2-4) Gud vil, at tú skalt finna svarini. Tí mást tú kanna Bíbliuna gjølla fyri at tryggja tær, at tað, sum tú lærir, er rætt. – **Les Ápostlasøguna 17:11.**

24 Tann besti mátin at læra um Jehova er við at kanna Bíbliuna. Í næsta kapitli fáa vit at vita, hví Bíblian er øðrvísi enn allar aðrar bøkur.

20-22. (a) Hvussu kunnu vit blíva vinir við Gud, um vit ikki síggja hann? (b) Hvat hevði tú gjørt, um onkur bað teg gevast at kanna Bíbliuna?

23, 24. (a) Hví skalt tú blíva við at seta spurningar? (b) Hvat fáa vit at vita í næsta kapitli?

1 HVØR ER GUD?

„Tú hevur skapt alt.“– Opinberingin 4:11

Hvat lærir Bíblian okkum um Gud?

Opinberingin 15:3
Hann er alvaldur
– tann, sum hevur størsta
valdið í alheiminum.

Sálmur 90:2
Hann hevur altíð verið til.

Matteus 6:9
Gud er faðir okkara.
Hann vil, at vit skulu
hava tað gott.

Ápostlasøgan 17:27
Gud vil vera okkara vinur.

2 GUD HEVUR EITT NAVN

„HARRIN* ... er navn Mítt til ævigar tíðir.“– 2. Mósebók 3:15

Hví er tað umráðandi at vita, hvussu Gud eitur?

Sálmur 83:19
Gud hevur fortalt okkum,
at hann eitur Jehova.
„Gud“ og „Harrin“ eru
ikki nøvn. Tey eru heiti
eins og „løgmaður“ ella
„kongur“. Jehova vil, at vit
skulu brúka hansara navn.

2. Mósebók 3:14
Guds navn merkir:
„Hann fær at verða.“
Jehova hevur skapt alt,
og tí ber tað til hjá honum
at halda øll síni lyfti og
at fullføra sína ætlan.

* Í orðafrágreiðingini í umsetingini eftir Dahl/Viderø, útgávuni frá 2006, stendur at lesa undir Harrin: „Harrin í Gamla Testamenti av hebráiska orðinum adonaj, sagt um Guð. Navn hansara er Jahve, stytt Jah.“

3 JEHOVA ELSKAR OKKUM

„Gud er kærleiki.“– 1. Jóhannesarbræv 4:8

Hvussu vísir Gud, at hann elskar okkum?

2. Mósebók 34:6; Sálmur 37:28
Hann vísir okkum miskunn og samkenslu. Hann sigur okkum altíð sannleikan, og hann er rættvísur.

Sálmur 86:5
Hann fyrigevur okkum.

2. Pætursbræv 3:9
Hann er tolin við okkum.

1. Korintbræv 1:9
Hann er trúfastur.

4 GUD HEVUR UMSORGAN FYRI TÆR

„Kastið alla sorg tykkara á Hann! Tí Hann hevur umsorgan fyri tykkum.“– 1. Pætursbræv 5:7

Hvussu kanst tú vita, at Gud hevur umsorgan fyri tær?

Sálmur 37:9-11
Hann lovar at beina fyri sorg og pínu og at loysa allar trupulleikarnar, sum ónd menniskju hava verið orsøk til.

Jákupsbrævið 4:8
Jehova vil, at tú skalt blíva hansara vinur.

Jóhannes 17:3
Jú meira tú lærir um Gud, jú meira fert tú at elska hann.

KAPITTUL 2

EIN BÓK FRÁ GUDI

HVUSSU hevur tú tað, tá ið ein vinur gevur tær eina gávu? Tú takkar sjálvandi fyri gávuna og ert spentur at pakka hana upp. Tú ert uttan iva glaður fyri, at vinurin hjá tær hugsaði um teg.

2 Bíblian er ein gáva, sum Gud hevur givið okkum. Hon gevur okkum eina vitan, sum vit ikki fáa nakra aðrastaðni. Til dømis sigur hon okkum, at Gud skapti himmalin, jørðina og fyrsta mannin og kvinnuna. Hon gevur okkum góð ráð, sum kunnu hjálpa okkum at loysa trupulleikar. Vit fáa eisini at vita, hvussu Gud fer at gera jørðina til eitt betri stað. Bíblian má sigast at vera ein heilt serlig gáva!

3 Tá ið tú kannar Bíbliuna, lærir tú meira um Gud og um, hvussu tú kanst blíva hansara vinur. Betur tú lærir hann at kenna, tættari vinalag fært tú við hann.

4 Bíblian er umsett – øll, sum hon er, ella partar av henni – til meira enn 3.200 mál, og hon er prentað í milliardum av eintøkum. Meira enn 90 prosent av øllum menniskjum í heiminum hava møguleika at lesa Bíbliuna á sínum egna máli. Og hvørja viku keypa ella fáa meira enn ein millión menniskju eina bíbliu. Ja, Bíblian er nakað heilt serligt!

1, 2. Hví er Bíblian ein heilt serlig gáva?
3. Hvat fert tú at læra meira um, tá ið tú kannar Bíbliuna?
4. Hvat heldur tú er áhugavert við Bíbliuni?

Jehova vitni hava umsett Bíbliuna til nógv mál

5 Bíblian er „innblást av Gudi“. **(Les 2. Timoteusarbræv 3:16.)** Hvat merkir tað? Og hví kunnu vit siga, at Bíblian kemur frá Gudi, hóast tað eru menniskju, sum hava skrivað hana? Bíblian svarar: „Drivnir [ella leiddir] av Heilaga Andanum talaðu heilagir menn Guds.“ (2. Pætursbræv 1:21) Hetta kann samanberast við, tá ið ein stjóri biður skrivaran hjá sær skriva eitt bræv. Tað, sum stendur í brævinum, eru tankar og boð frá stjóranum, ikki frá skrivaranum. Á líknandi hátt brúkti Gud menniskju til at skriva sínar tankar niður. Og tí er Bíblian ’Guds orð’ og ikki

5. Hví kunnu vit siga, at Bíblian kemur frá Gudi?

menniskjans orð. – 1. Tessalonikabrævv 2:13; les endagrein 2.

BÍBLIAN ER ÁLÍTANDI

6 Tað tók meira enn 1.600 ár at skriva Bíbliuna. Teir, sum skrivaðu, høvdu ymiska bakgrund, útbúgving og førleikar. Ein var til dømis lækni, aðrir vóru bøndur, fiskimenn, seyðamenn, profetar, dómarar ella kongar. Men sjálvt um hesir menninir vóru so ymiskir og ikki livdu um somu tíð, hongur alt í Bíbliuni væl saman. Hon mótsigur ongantíð sær sjálvari.*

7 Fyrstu kapitlarnir í Bíbliuni greiða frá, hvussu trupulleikarnir í heiminum byrjaðu, og teir síðstu kapitlarnir siga okkum, hvussu Gud fer at fáa alt í rættlag aftur og gera jørðina til eitt paradís. Bíblian fevnir um túsundtals ár av mannasøguni og vísir, at Gud altíð ger tað, sum hann hevur sett sær fyri.

8 Bíblian er ikki nøkur vísindalig lærubók, men tað, sum hon sigur um vísindalig evni, er altíð rætt. Og tað er ikki so løgið, tí tað er ein bók frá Gudi. Í Triðju Mósebók lesa vit til dømis, at Gud gav ísraelsmonnum leiðbeining um, hvat teir skuldu gera, fyri at sjúkur ikki skuldu spjaða seg. Hetta varð skrivað, langt áðrenn mann visti, at bakteriur og virus kunnu gera fólk sjúk. Bíblian lærir eisini, at jørðin hongur á

* Nøkur siga, at Bíblian mótsigur sær sjálvari, men tað passar ikki. Les greinina *Mótsigur Bíblian sær sjálvari?*

6, 7. Hví kunnu vit siga, at alt í Bíbliuni hongur væl saman?

8. Nevn nøkur dømi um, at Bíblian er vísindaliga røtt.

ongum. (Job 26:7) Og í eini tíð, tá ið tey flestu hildu, at jørðin var fløt, stóð tað longu í Bíbliuni, at hon er rund. – Esaias 40:22, Dahl/Viderø.

9 Tað, sum Bíblian sigur um søgu, er eisini altíð rætt. Men nógvar søgubøkur eru ikki heilt eftirfarandi, tí rithøvundarnir vóru ikki ærligir. Teir skrivaðu til dømis ikki altíð um tær ferðirnar, tá ið tjóðin hjá teimum tapti í bardaga. Men teir, sum skrivaðu Bíbliuna, vóru ærligir, eisini tá ið teir skrivaðu um ósigrarnar hjá Ísrael. Teir skrivaðu enntá um síni egnu mistøk. Til dømis viðgongur Dávid kongur púra ærliga í Sálmi 51, at hann hevði gjørt nakað øgiliga skeivt. Tað, at teir, sum skrivaðu Bíbliuna, vóru so ærligir, vísir, at hon kemur frá Gudi. Og tað merkir, at vit kunnu líta á tað, sum stendur í henni.

EIN BÓK VIÐ GÓÐUM RÁÐUM

10 Bíblian er „innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing“. (2. Timoteusarbræv 3:16) Ráðini í Bíbliuni rigga eisini í dag. Jehova veit, hvussu vit eru skapt, og tí veit hann eisini, hvussu vit hugsa, og hvat vit føla. Hann kennir okkum betur, enn vit sjálv gera, og hann vil, at vit skulu hava tað gott. Hann veit, hvat er gott fyri okkum, og hvat er ringt fyri okkum.

11 Í Matteus, kapitlunum 5 til 7, gevur Jesus okkum sera góð ráð um, hvussu vit kunnu blíva lukkulig,

---

9. Hvat lærir tað okkum, at teir, sum skrivaðu Bíbliuna, vóru so ærligir?
10. Hví rigga ráðini í Bíbliuni eisini í dag?
11, 12. (a) Hvørji góð ráð gav Jesus í Matteus, kapitlunum 5 til 7? (b) Hvat annað lærir Bíblian okkum?

hvussu vit kunnu hava tað gott saman við øðrum, hvussu vit kunnu biðja, og hvussu vit skulu meta pengar. Sjálvt um hann gav hesi ráðini fyri umleið 2.000 árum síðani, eru tey akkurát líka góð í dag.

12 Haraftrat hevur Jehova givið okkum nógvar meginreglur, sum standa í Bíbliuni. Tær kunnu hjálpa okkum at fáa eitt betri familjulív, at hava góðan arbeiðsmoral og at halda frið við onnur. Bíbilskar meginreglur kunnu altíð hjálpa okkum, uttan mun til hvørji vit eru, hvar vit búgva, ella hvørjar trupulleikar vit hava. – **Les Esaias 48:17;** les endagrein 3.

VIT KUNNU LÍTA Á PROFETIIRNAR Í BÍBLIUNI

13 Nógvar profetiir í Bíbliuni eru longu gingnar út. Til dømis segði Esaias profetur, at býurin Bábylon skuldi verða lagdur í oyði. (Esaias 13:19) Hann skrivaði heilt nágreiniliga, hvussu býurin fór at verða hertikin. Høgu múrarnir og áin Eufrat vardu býin. Men Esaias skrivaði, at áin skuldi torna upp og portrini standa opin. Býurin fór altso at verða tikin uttan bardaga. Esaias nevndi enntá, at maðurin, ið skuldi hertaka Bábylon, æt Kýrus. – **Les Esaias 44:27 – 45:2;** les endagrein 4.

14 Umleið 200 ár eftir at profetiin varð skrivað, stóð ein herur til reiðar at hertaka Bábylon. Hvør var herførarin? Tað var Kýrus, kongurin í Persia, akkurát sum Esaias hevði profeterað. Men fór tað at eydnast honum at hertaka býin?

---

13. Hvat segði Esaias um býin Bábylon?
14, 15. Hvussu gekk profetiin hjá Esaiasi út?

Bíbliuskrivarin Esaias segði, at Bábylon skuldi falla

15 Stór veitsla var í Bábylon hetta kvøldið. Fólk kendu seg trygg, tí áin og høgu múrarnir vardu tey. Men uttan fyri býin grófvu Kýrus og hermenninir eina rennu fyri at leiða vatnið burtur úr ánni. Teir leiddu so mikið nógv av vatninum burtur, at teir fingu vassað yvirum. Men hvussu skuldu teir koma

inn um múrarnar? Júst sum profetiin segði, stóðu býarportrini opin, so hermenninir kundu taka býin uttan bardaga.

16 Esaias profeteraði, at sum frá leið, skuldi eingin aftur búgva í Bábylon. Hann skrivaði um Bábylon: „Tað skal aldri í allar ævir reisast aftur, og mann eftir mann skal eingin búgva har.“ (Esaias 13:20) Bleiv tað so? Ja, tí har sum Bábylon lá, umleið 80 kilometrar sunnan fyri Bagdad í Irak, eru bara nakrar leivdir í dag, og eingin býr har. Jehova sópaði Bábylon „burt við oyðingarkusti“. – Esaias 14:22, 23.

17 Av tí at nógvar profetiir í Bíbliuni longu eru gingnar út, kunnu vit líta á, at tað, sum Bíblian sigur um framtíðina, eisini fer at ganga út. Vit kunnu vera vís í, at Jehova heldur sítt lyfti um at gera jørðina

16. (a) Hvat profeteraði Esaias um Bábylon? (b) Hvussu vita vit, at profetiin hjá Esaiasi gekk út?
17. Hví kunnu vit vera vís í, at Gud heldur øll síni lyfti?

Leivdirnar av Bábylon

til eitt paradís. **(Les 4. Mósebók 23:19.)** Ja, vit hava „vón um ævigt lív, sum Gud, ið ikki lýgur, hevur lovað frá ævigum tíðum“. – Titusarbrævið 1:2.*

BÍBLIAN KANN BROYTA TÍTT LÍV

18 Vit hava lært, at eingin onnur bók er sum Bíblian. Alt í Bíbliuni hongur saman, og tá ið hon vísir á nakað vísindaligt ella søguligt, er tað altíð rætt. Góð ráð eru eisini í henni og nógvar profetiir, sum longu eru gingnar út. Men har er eisini nakað annað, sum ger Bíbliuna til eina heilt serliga bók. Paulus ápostul skrivaði: „Orð Guds er livandi og hevur kraft.“ Hvat vil tað siga? – **Les Hebrearabrævið 4:12.**

19 Bíblian kann broyta títt lív. Hon kann hjálpa tær at læra teg sjálvan betur at kenna og hjálpa tær at skilja tínar innastu tankar og kenslur. Til dømis halda vit kanska, at vit elska Gud. Men um vit veruliga elska hann, mugu vit fylgja tí, sum stendur í Bíbliuni.

20 Ja, Bíblian er sanniliga ein heilt serlig gáva frá Gudi. Hann vil, at tú skalt lesa í henni, kanna hana og elska hana. Vís, at tú ert takksamur fyri hesa gávuna, og halt fram at kanna hana. Tá lærir tú meira um Guds ætlan við okkum menniskjum. Og tað er evnið í næsta kapitli.

---

* Oyðingin av Bábylon er bara ein av mongum profetium í Bíbliuni, sum eru gingnar út. Endagrein 5 vísir til nakrar profetiir um Jesus.

---

18. Hvat segði Paulus um Bíbliuna?

19, 20. (a) Hvussu kann Bíblian hjálpa okkum? (b) Hvussu kanst tú vísa, at tú ert takksamur fyri Bíbliuna?

1 EIN BÓK FRÁ GUDI

„Øll skriftin er innblást av Gudi.“– 2. Timoteusarbræv 3:16

Hvussu er Bíblian øðrvísi enn allar aðrar bøkur?

Bíblian er umsett til meira enn 3.200 mál og prentað í milliardum av eintøkum.

Hon gevur okkum eina vitan, sum vit ikki fáa nakra aðrastaðni.

1. Tessalonikabræv 2:13
Bíblian er frá Gudi.

2. Pætursbræv 1:21
Gud læt menniskju skriva hansara tankar.

2 Í BÍBLIUNI ERU NÓGVAR PROFETIIR

’Gud lýgur ikki.’– Titusarbrævið 1:2

Hví kanst tú líta á Bíbliuna?

Esaias 44:27 – 45:2
Umleið 200 ár frammanundan boðaði Bíblian frá, hvussu Bábylon skuldi hertakast.

2. Timoteusarbræv 3:1-5
Profetiir í Bíbliuni ganga út í dag.

4. Mósebók 23:19
Vit kunnu líta á tað, sum Bíblian sigur um framtíðina.

3 BÍBLIAN KANN HJÁLPA TÆR

„Eg eri HARRIN Gud tín, sum lærir teg at gera tað, ið er tær til gagn.“– Esaias 48:17

Hvat hevur tú lært um Bíbliuna?

Job 26:7; Esaias 40:22, Dahl/Viderø
Tað, sum Bíblian sigur um vísindalig evni, er rætt.

Sálmur 51
Teir, sum skrivaðu Bíbliuna, vóru ærligir.

Matteus 5-7
Jesus gav okkum góð ráð um, hvussu vit kunnu blíva lukkulig, hvussu vit kunnu hava tað gott saman við øðrum, hvussu vit kunnu biðja, og hvussu vit skulu meta pengar.

4 BÍBLIAN KANN BROYTA TÍTT LÍV

„Orð Guds er livandi og hevur kraft.“– Hebrearabrævið 4:12

Hvussu kann Bíblian hjálpa tær?

- Hon kann hjálpa tær at skilja Guds ætlan.
- Hon kann hjálpa tær at læra teg sjálvan betur at kenna.
- Hon kann hjálpa tær at skilja, hvat Gud vil hava teg at gera.

Gud vil, at tú skalt lesa, kanna og elska Bíbliuna.

HVAT ER GUDS ÆTLAN VIÐ OKKUM MENNISKJUM?

GUD vil, at vit menniskju skulu hava tað gott. Hann skapti fyrsta mannin og kvinnuna, Ádam og Evu, og gav teimum eitt vakurt stað at búgva. Hann ætlaði, at tey skuldu fáa børn, gera alla jørðina til eitt paradís og taka sær av djórunum. Og hansara ætlan við menniskjunum er ikki broytt. – 1. Mósebók 1:28; 2:8, 9, 15; les endagrein 6.

2 Men kunnu vit veruliga trúgva upp á, at jørðin verður eitt paradís? Jehova hevur sagt: „Eg havi upphugsað tað, og Eg skal eisini fullføra tað.“ (Esaias 46:9-11; 55:11) Ja, hann ger tað, sum hann hevur sett sær fyri, og einki kann steðga honum. Jehova hevði eina ætlan, tá ið hann skapti jørðina. Hann skapti hana „ikki til at liggja í oyði“. (Esaias 45:18) Hann vil, at menniskju skulu búgva á allari jørðini. Hvat fyri menniskju vil Gud hava at búgva her, og í hvussu langa tíð? Bíblian sigur: „Hini *rættvísu* [tey, sum gera Guds vilja] arva landið og búgva í tí *allar ævir.“* – Sálmur 37:29; Opinberingin 21:3, 4.

3 Sum nú er, verða fólk sjúk og doyggja. Nógvastaðni kríggjast fólk og drepa hvørt annað. Og tað var

---

1. Hvat er Guds ætlan við okkum menniskjum?
2. (a) Hvussu vita vit, at Gud fer at gera tað, sum hann hevur sett sær fyri? (b) Hvørja framtíðarvón gevur Bíblian?
3. Hvat undrast vit kanska á, tá ið vit hugsa um, hvussu heimurin sær út í dag?

sjálvsagt ikki tað, Gud ætlaði. Hvat hendi, og hví? Tað er bara Bíblian, sum kann svara upp á tað.

EIN FÍGGINDI HJÁ GUDI

4 Bíblian fortelur okkum, at Gud hevur ein fígginda, sum „kallast Djevulin og Satan“. Satan tosaði við Evu gjøgnum eina slangu í urtagarðinum Eden. (Opinberingin 12:9; 1. Mósebók 3:1) Hann fekk tað at síggja út, sum tað var slangan, sum tosaði. – Les endagrein 7.

5 Men hvar kom Satan Djevulin frá? Hvussu kundi hann vera so óndur? Skapti Gud hann soleiðis? Nei, í fyrstuni var hann ein góður eingil. Hann var faktiskt í himli, tá ið Gud skapti jørðina, men so *broyttist hann og bleiv Djevulin.* (Job 38:4, 7) Hvussu kundi tað lata seg gera? Hugsa um, hvussu ein ærligur persónur kann broytast og blíva ein tjóvur. Hann verður ikki føddur sum tjóvur, men fer at ynskja sær nakað, sum hann ikki hevur rætt til. Hann *blívur við at hugsa um tað,* og so verður ynskið bara sterkari og sterkari. Og tá ið hann fær møguleikan, stjelur hann tað, sum hann vil hava. Hann hevur altso gjørt seg sjálvan til ein tjóv. – **Les Jákupsbrævið 1:13-15**; les endagrein 8.

6 Nakað líknandi hendi við tí einglinum, sum seinni bleiv til Djevulin. Tá ið Jehova hevði skapt Ádam og Evu, segði hann við tey, at tey skuldu fáa sær børn og ’fylla jørðina’. (1. Mósebók 1:27, 28) Hesin eingilin hugsaði kanska: ’Øll hasi fólkini kundu tilbiðið meg í staðin fyri Jehova!’ Og jú meira hann hugsaði um tað, jú meira ynskti hann sær nakað, sum Jehova

---

4, 5. (a) Hvør tosaði við Evu gjøgnum eina slangu? (b) Hvussu kann ein ærligur persónur blíva ein tjóvur?
6. Hvussu broyttist ein góður eingil og bleiv ein fígginda hjá Gudi?

hevði rættin til. Eingilin vildi hava menniskju at tilbiðja seg. Tí leyg hann fyri Evu og lumpaði hana. **(Les 1. Mósebók 3:1-5.)** Soleiðis bleiv hann Satan Djevulin, ein fíggindi hjá Gudi.

7 Ádam og Eva aktaðu ikki Gud, men ótu av fruktini. (1. Mósebók 2:17; 3:6) Tey syndaðu ímóti Jehova, og við tíðini doyðu tey, akkurát sum Jehova hevði sagt, at tey skuldu, um tey vóru ólýðin. (1. Mósebók 3:17-19) Børnini hjá Ádami og Evu blivu fødd sum syndarar og doyðu tí eisini. **(Les Rómbrævið 5:12.)** Tað kann lýsast við einum dømi: Ímynda tær, at tú skalt baka breyð í einum formi, sum hevur eina buklu. Breyðini, sum tú bakar í forminum, fáa somu buklu. Táið Ádam át av fruktini, bleiv hann ein syndari og fekk so at siga eina „buklu“. Vit eru øll hansara eftirkomarar, og tí eru vit eisini syndarar, ella hava sama brek, sum hann hevði. Og av tí at vit eru syndarar, verða vit gomul og doyggja. – Rómbrævið 3:23; les endagrein 9.

8 Satan fekk Ádam og Evu at synda, og soleiðis settu tey trý seg upp ímóti Jehova. Hann vildi hava Ádam og Evu at halda, at Jehova leyg fyri teimum, at hann ikki var tann rætti at ráða yvir teimum, og at hann ikki vildi teimum tað besta. Satan segði faktiskt, at menniskju ikki hava brúk fyri Gudi, og at Ádam og Eva sjálv kundu gera av, hvat var rætt og skeivt. Hvat fór Jehova at gera? Hann kundi valt at beint fyri Satani, Ádami og Evu og soleiðis steðgað uppreistrinum. Men hevði tað prógvað, at Satan er ein lygnari? Nei, tað hevði tað ikki.

---

7. (a) Hví doyðu Ádam og Eva? (b) Hví verða vit gomul og doyggja?
8, 9. (a) Hvat vildi Satan hava Ádam og Evu at halda? (b) Hví beindi Jehova ikki fyri Satani, Ádami og Evu beinanvegin?

9 Og tí beindi Jehova ikki fyri teimum trimum beinanvegin. Hann læt heldur menniskjuni sleppa at stýra sjálv í eina tíð. Tað fór at gera tað greitt, at Satan er ein lygnari, og at Jehova veit, hvat er best fyri menniskjuni. Hetta fáa vit meira at vita um í 11. kapitli. Men hvat heldur tú um avgerðina hjá Ádami og Evu? Var

Hevði Satan kunnað bjóðað Jesusi øll ríkini í heiminum, um hann ikki átti tey?

tað rætt av teimum at trúgva Satani og ikki akta Gud? Jehova hevði givið Ádami og Evu so nógv. Hann gav teimum eitt fullkomið lív, eitt vakurt heim og eitt arbeiði, sum teimum dámdi. Men Satan hevði ongantíð givið teimum nakað. Hvat hevði tú gjørt, um tú vart í somu støðu sum tey?

10 Vit, sum liva í dag, mugu eisini taka eina avgerð, og tað er ein sera týðandi avgerð. Vit kunnu velja at akta Jehova og vera við til at prógva, at Satan er ein lygnari. Ella vit kunnu velja at akta Satan. (Sálmur 73:28; **les Orðtøkini 27:11.)** Tey flestu í dag akta ikki Gud. Í roynd og veru er tað ikki Gud, sum stýrir heiminum. Men um tað ikki er Gud, hvør er tað so?

HVØR STÝRIR HEIMINUM?

11 Jesus visti, hvør tað er, sum stýrir heiminum. Einaferð vísti Satan honum „øll ríki heimsins og dýrd teirra“ og segði við hann: „Alt hetta skal eg geva Tær, um Tú vilt falla niður og tilbiðja meg.“ (Matteus 4:8, 9; Lukas 4:5, 6) Hevði Satan kunnað bjóðað Jesusi øll ríkini, um hann ikki átti tey? Nei, sjálvandi ikki.

12 Tú heldur kanska, at tað ljóðar løgið, at tað er Satan, sum stýrir heiminum, tá ið tað er Jehova, hin alvaldi Gud, sum hevur skapt alt. (Opinberingin 4:11) Men Jesus segði klárt og greitt, at Satan er „høvdingin yvir hesum heimi“. (Jóhannes 12:31; 14:30; 16:11) Paulus ápostul segði um Satan Djevulin, at hann er „gudurin hjá hesum heimi“. (2. Korintbræv 4:3, 4) Og

---

10. Hvørja týðandi avgerð mugu vit øll taka?

11, 12. (a) Hvat fortelur tað okkum, at Satan bjóðaði Jesusi øll ríkini? (b) Hvørji bíbliuørindi vísa, at Satan stýrir heiminum?

Jóhannes ápostul skrivaði, at „allur heimurin er í valdinum hjá tí ónda“. – 1. Jóhannesarbræv 5:19, *NS*.

HVUSSU VERÐUR HEIMURIN HJÁ SATANI OYÐILAGDUR?

13 Heimurin verður meira og meira ótryggur. Kríggj, mutur, hykl og harðskapur er allastaðni. Líkamikið hvat menniskju gera, fáa tey ikki loyst trupulleikarnar. Men skjótt fer Gud at oyðileggja henda ónda heimin í Harmageddon, sum er hansara kríggj, og lata ein nýggjan og rættvísan heim koma í staðin. – Opinberingin 16:14-16; les endagrein 10.

14 Jehova fer at brúka sítt himmalska ríki, ella sína stjórn, til at skapa góð viðurskifti á jørðini. Hann hevur valt Jesus at vera kong í ríkinum. Fyri fleiri túsund árum síðani segði Bíblian, at Jesus skuldi ráða sum „friðarhøvdingi“, og at hansara ríki skuldi vara í allar ævir. (Esaias 9:6, 7) Jesus lærdi sínar lærisveinar at biðja um, at hetta ríkið skuldi koma, tá ið hann segði: „Komi ríki Títt! Verði vilji Tín, sum í Himli, so á jørðini við!“ (Matteus 6:10) Í 8. kapitli fáa vit at vita, hvussu Guds ríki fer at beina fyri øllum ríkisstjórnum á jørðini. **(Les Dániel 2:44.)** Síðani fer Guds ríki at gera alla jørðina til eitt paradís. – Les endagrein 11.

EIN NÝGGJUR HEIMUR

15 Bíblian sigur: „Vit vænta ... nýggjar himlar og nýggja jørð, har rættvísi býr.“ (2. Pætursbræv 3:13;

---

13. Hví hava vit brúk fyri einum nýggjum heimi?
14. Hvønn hevur Gud valt at vera kong í sínum ríki? Hvat hevur Bíblian sagt um Jesus?
15. Hvat er ’nýggja jørðin’?

Esaias 65:17) Viðhvørt tá ið orðið „jørð“ stendur í Bíbliuni, er talan um fólkini á jørðini. (1. Mósebók 11:1) Og soleiðis er tað eisini í hesum førinum. Tann ’nýggja jørðin’ vísir til fólk, sum akta Gud og sleppa at búgva í paradísinum.

16 Jesus segði, at tey, sum sleppa at búgva í Guds nýggja heimi, skulu fáa „ævigt lív“. (Markus 10:30) Hvat skulu vit gera fyri at fáa hesa gávuna? Tú finnur svarið við at **lesa Jóhannes 3:16 og 17:3.** Men hvussu fer lívið at vera í paradísinum her á jørðini? Latið okkum vita.

17 Óndskapur, kríggj, brotsverk og harðskapur vera ikki meira. Eingi ónd fólk vera eftir á jørðini. (Sálmur 37:10, 11; Matteus 5:5) Gud fer at gera „enda á kríggi um alla jørðina“. (Sálmur 46:10; Esaias 2:4) Tá fara øll, sum búgva á jørðini, at elska Gud og akta hann. Og einki fer at órógva friðin. – Sálmur 72:7.

18 Øll føla seg trygg. Tá ið ísraelsmenn í forðum aktaðu Gud, vóru teir tryggir, tí Gud ansaði eftir teimum. (3. Mósebók 25:18, 19) Í paradísinum verða vit ikki bangin fyri nøkrum. Vit fara altíð at føla okkum trygg. – **Les Esaias 32:18; Mika 4:4.**

19 Har verður nokk av mati. „Korn skal vera í yvirflóð í landinum, á fjallatindunum.“ (Sálmur 72:16) Jehova, „Gud okkara, signar okkum“, og ’jørðin gevur grøði’. – Sálmur 67:7.

---

16. Hvat fer Gud at geva teimum, sum sleppa at búgva í nýggja heiminum, og hvat skulu vit gera fyri at fáa hesa gávuna?
17, 18. Hvussu vita vit, at friður fer at vera um alla jørðina, og at vit kunnu føla okkum trygg?
19. Hví kunnu vit vera vís í, at øll fáa nokk at eta í Guds nýggja heimi?

20 Jørðin verður eitt paradís. Tá fara øll at búgva í góðum húsum við vøkrum havum. **(Les Esaias 65:21-24 og Opinberingina 11:18.)** Jørðin verður líka vøkur, sum urtagarðurin Eden var. Jehova fer altíð at geva okkum tað, vit hava brúk fyri. Bíblian sigur um hann: „Tú letur upp hond Tína og mettar alt livandi við tí, sum tað ynskir sær.“ – Sálmur 145:16.

21 Friður verður millum menniskju og djór. Eingi djór fara longur at vera vandamikil fyri menniskju. Sjálvt smábørn kunnu føla seg trygg saman við djórum, sum eru vandamikil í dag. – **Les Esaias 11:6-9; 65:25.**

22 Eingin verður sjúkur. Tá ið Jesus var á jørðini, grøddi hann nógv fólk. (Matteus 9:35; Markus 1:40-42; Jóhannes 5:5-9) Men sum kongur í Guds ríki fer Jesus at grøða øll. Eingin fer nakrantíð aftur at siga: „Eg eri sjúkur.“ – Esaias 33:24; 35:5, 6.

23 Deyð fáa lívið aftur. Gud lovar at geva milliardum av menniskjum lívið aftur. „Uppreisn verður, bæði av rættvísum og órættvísum.“ – Ápostlasøgan 24:15; **les Jóhannes 5:28, 29.**

24 Vit hava øll eitt val. Vit kunnu læra meira um Jehova og tæna honum ella bara gera tað, vit sjálv hava hug til. Men um vit velja at tæna Jehova, fáa vit eina fantastiska framtíð. Í næsta kapitli fáa vit meira at vita um Jesus og um, hvussu hann fer at syrgja fyri, at Guds lyfti ganga út.

---

20. Hvussu vita vit, at jørðin verður eitt paradís?
21. Hvussu vita vit, at friður verður millum menniskju og djór?
22. Hvat fer Jesus at gera fyri tey, sum eru sjúk?
23. Hvat fer Gud at gera fyri tey, sum eru deyð?
24. Hvussu hevði tær dámt at búð í paradísinum?

1 TAÐ VAR EIN MEINING VIÐ, AT GUD SKAPTI OKKUM

„Hini rættvísu arva landið og búgva í tí allar ævir.“– Sálmur 37:29

Hvat er Guds ætlan við okkum menniskjum?

1. Mósebók 1:28
Gud vildi, at menniskjuni skuldu fáa børn, gera alla jørðina til eitt paradís og taka sær av djórunum.

Esaias 46:9-11; 55:11
Gud fer at gera tað, sum hann hevur sett sær fyri, og einki kann steðga honum.

2 TAÐ ER IKKI GUD, SUM STÝRIR HEIMINUM

„Allur heimurin er í valdinum hjá tí ónda“.– 1. Jóhannesarbræv 5:19, *NS.*

Hvør stýrir heiminum?

Jóhannes 12:31
Jesus segði, at Satan er høvdingi, ella valdsharri, yvir hesum heimi.

Jákupsbrævið 1:13-15
Satan vildi hava nakað, sum hann ikki hevði rættin til.

1. Mósebók 2:17; 3:1-6
Satan lumpaði Evu. Bæði Ádam og Eva gjørdu uppreistur ímóti Gudi, og seinni doyðu tey.

Rómbrævið 3:23; 5:12
Vit doyggja, tí vit hava arvað syndina frá Ádami.

2. Korintbræv 4:3, 4
Satan villleiðir fólk.

3 GUDS RÍKI ER LOYSNIN

„Komi ríki Títt! Verði vilji Tín ... á jørðini!“– Matteus 6:10

Hvat fer Jehova at gera?

Dániel 2:44
Guds ríki fer at beina fyri øllum ríkisstjórnum á jørðini, og síðani fer tað at ráða í allar ævir.

Opinberingin 16:14-16
Gud fer at beina fyri øllum óndum menniskjum í Harmageddon, sum er hansara kríggj.

Esaias 9:6, 7
Jehova hevur valt Jesus at vera kong í sínum himmalska ríki. Jesus fer at ráða yvir jørðini.

4 GUDS RÍKI FER AT GERA JØRÐINA TIL EITT PARADÍS

„Tú letur upp hond Tína og mettar alt livandi við tí, sum tað ynskir sær.“– Sálmur 145:16

Hvat fer Guds ríki at gera fyri okkum?

Sálmur 46:10
Kríggj, brotsverk og harðskapur vera ikki meira.

Esaias 32:18; 65:21-24
Í nýggja heiminum fara øll at búgva í góðum húsum við vøkrum havum og liva friðarliga saman.

Sálmur 72:16
Har verður nokk av mati.

Esaias 11:6-9
Friður verður millum menniskju og djór.

Esaias 33:24; Ápostlasøgan 24:15
Eingin verður sjúkur, og deyð fáa lívið aftur.

KAPITTUL 4

HVØR ER JESUS KRISTUS?

NÓGV fólk í heiminum eru kend, og vit vita kanska, hvussu nøkur av teimum eita. Men bara tí vit vita, hvussu tey eita, merkir tað ikki, at vit kenna tey væl og vita, hvussu tey eru sum persónar.

2 Sjálvt um tað eru umleið 2.000 ár síðani, at Jesus livdi her á jørðini, hevur tú helst hoyrt um hann. Men nógv vita ikki, hvussu Jesus var sum persónur. Nøkur siga, at hann bara var eitt gott menniskja, summi siga, at hann var profetur og onnur halda, at hann er Gud. Hvat heldur tú? – Les endagrein 12.

3 Tað er umráðandi at vita, hvør Jesus er. Hví? Bíblian sigur: „Hetta er hitt æviga lív, at tey kenna Teg, hin einasta sanna Gud, og *tann, ið Tú sendi, Jesus Kristus.“* (Jóhannes 17:3) Læra vit Jehova og Jesus at kenna, kunnu vit altso fáa ævigt lív. (Jóhannes 14:6) Men longu nú kann tað gagna okkum at læra meira um Jesus, tí hann vísti okkum, hvussu vit kunnu fáa eitt gott lív og hava tað gott saman við øðrum. (Jóhannes 13:34, 35) Í 1. kapitli fingu vit at vita, hvør Gud er, og í hesum kapitlinum fáa vit at vita, hvat Bíblian lærir um Jesus.

1, 2. (a) Kenna vit ein persón, bara tí vit vita, hvussu hann eitur? Greið frá. (b) Hvat halda fólk um Jesus?
3. Hví er tað umráðandi at læra Jehova og Jesus at kenna?

„VIT HAVA FUNNIÐ MESSIAS“

4 Jehova lovaði, at Messias, ella Kristus, skuldi koma, og tað stóð í Bíbliuni, langt áðrenn Jesus bleiv føddur. Heitið „Messias“ kemur úr hebraiskum, og heitið „Kristus“ kemur úr grikskum. Bæði heitini vísa til tann persónin, sum Gud fór at velja til eina heilt serliga uppgávu. Tað vísti seg at vera Jesus. Í framtíðini fer hann at syrgja fyri, at øll lyftini frá Jehova verða uppfylt.

5 Lærisveinarnir hjá Jesusi ivaðust ikki í, at hann var tann lovaði Messias. (Jóhannes 1:42) Til dømis segði Símun Pætur við Jesus: „Tú ert Kristus.“ (Matteus 16:16) Hvussu kunnu vit, eins og lærisveinarnir, vera vís í, at Jesus er Messias?

6 Langt áðrenn Jesus bleiv føddur, skrivaðu Guds profetar nógvar smálutir niður um Messias. Hesar upplýsingarnar skuldu hjálpa menniskjum at finna út av, hvør tað var, sum var Messias. Ímynda tær, at tú skalt á flogvøllin eftir einum persóni, sum tú ongantíð hevur møtt. Um tú fært nakað at vita um hann, verður tað lættari hjá tær at finna hann. Á líknandi hátt hevur Jehova givið okkum eina greiða mynd av, hvat Messias skuldi gera, og hvat fór at henda við honum. Allar hesar profetiirnar gingu út, og tí skilja vit, at Jesus veruliga er Messias.

7 Her eru tvær av profetiunum: Umleið 700 ár áðrenn Jesus bleiv føddur, segði Mika profetur, at

---

4. Hvat vísa heitini „Messias“ og „Kristus“ til?
5. Hvat vóru lærisveinarnir hjá Jesusi sannførdir um?
6. Hvussu hevur Jehova hjálpt menniskjum at finna út av, hvør tað er, sum er Messias?
7. Nevn tvær profetiir, sum vísa, at Jesus er Messias.

Messias skuldi føðast í einum lítlum býi, sum æt Betlehem. (Mika 5:1) Og tað var júst har, Jesus bleiv føddur. (Matteus 2:1, 3-9) Dániel profetur segði, at Messias skuldi stíga fram í ár 29 e.o.t. (Dániel 9:25) Og tað gekk eisini út. (Les endagrein 13.) Hetta eru bara tvær av mongum profetium, sum vísa, at Jesus er Messias.

8 Jehova hevur gjørt tað greitt, at Jesus er Messias. Hann lovaði at geva Jóhannesi doypara eitt tekn um, hvør ið var Messias. Hetta teknið sá Jóhannes í ár 29 e.o.t., tá ið Jesus kom til hansara fyri at verða doyptur í Jordanánni. Bíblian sigur okkum, hvat hendi: „Táið nú Jesus var doyptur, kom Hann við tað sama upp úr vatninum, og Himmalin opnaðist fyri Honum, og hann sá Anda Guds dala niður sum dúvu og koma yvir Hann. Og rødd kom av Himli, sum segði: ’Hesin er Sonur Mín, hin elskaði, sum Eg havi tokka til.’“ (Matteus 3:16, 17) Tá ið Jóhannes sá og hoyrdi hetta, visti hann, at tað var Jesus, sum var Messias. (Jóhannes 1:32-34) Tað var henda dagin, tá ið Jesus fekk heilagan anda frá Jehova, at hann bleiv Messias. Hann var tann, sum Gud hevði valt til høvdinga og kong. – Esaias 55:4.

9 Profetiirnar í Bíbliuni, orðini frá Jehova sjálvum og teknið, hann gav, tá ið Jesus bleiv doyptur, vísa, at

---

8, 9. Hvat hendi, tá ið Jesus bleiv doyptur, sum vísir, at hann er Messias?

Jesus er Messias. Men hvar kom Jesus frá, og hvussu var hann? Vit kunnu vita, hvat Bíblian sigur.

HVAR KOM JESUS FRÁ?

10 Bíblian lærir, at Jesus var í himli í langa tíð, áðrenn hann kom niður á jørðina. Mika segði, at Messias

---

10. Hvat lærir Bíblian um lívið hjá Jesusi, áðrenn hann kom niður á jørðina?



Jesus bleiv Messias, ella Kristus, táið hann bleiv doyptur

var „frá fortíðardøgum“. (Mika 5:1) Jesus segði sjálvur fleiri ferðir, at hann var í himli, áðrenn hann bleiv føddur sum menniskja. **(Les Jóhannes 3:13; 6:38, 62; 17:4, 5.)** So Jesus má longu hava havt eitt heilt serligt samband við Jehova, áðrenn hann kom niður á jørðina.

11 Jehova er sera góður við Jesus. Hví? Gud skapti hann, áðrenn hann skapti nakað annað. Tí verður Jesus róptur „hin frumborni als skapnings“.* (Kolossebrævið 1:15) Jesus er eisini tann einasti, sum Jehova hevur skapt einsamallur, og tí verður hann róptur ’hin einborni sonurin’. (Jóhannes 3:16) Tað var eisini bara Jesus, sum slapp at vera við til at skapa alt annað. (Kolossebrævið 1:16, *NW*) Og Jesus er tann einasti, sum verður róptur „orðið“, tí Jehova læt hann bera einglum og menniskjum boðskapir. – Jóhannes 1:14.

12 Nøkur halda, at Jesus er Gud. Men tað er ikki tað, Bíblian lærir. Bíblian sigur, at Jesus bleiv skaptur, og tí hevur hann havt eina byrjan. Men Jehova, sum hevur skapt alt, hevur onga byrjan. (Sálmur 90:2) Jesus, sonur Guds, hevur ongantíð viljað verið Gud. Tað hevur ikki verið í hansara tonkum! Bíblian vísir týðiliga, at faðirin er størri enn sonurin. **(Les Jóhannes 14:28;** 1. Korintbræv 11:3.) Tað er bara Jehova, sum

* Jehova verður róptur faðir, tí hann er skaparin. (Esaias 64:7) Jesus verður róptur sonur Guds, tí Jehova skapti hann. Bæði einglarnir og fyrsti maðurin, Ádam, verða eisini nevndir synir Guds. – Job 1:6; Lukas 3:38.

11. Hví er Jehova so góður við Jesus?
12. Hvussu vita vit, at Jesus ikki er Gud?

er „Gud hin Alvaldi“. (1. Mósebók 17:1) Hann er tann størsti og mektigasti persónurin í alheiminum. – Les endagrein 14.

13 Jehova og Jesus arbeiddu saman í milliardir av árum, áðrenn himmalin og jørðin vórðu skapt. Teir hava uttan iva verið sera tætt knýttir. (Jóhannes 3:35; 14:31) Jesus líktist faðir sínum so nógv í verumáta, at Bíblian kallar hann ’mynd hins ósjónliga Guds’. – Kolossebrævið 1:15.

14 Jesus var villigur at fara úr himli og blíva føddur sum eitt menniskja á jørðini. Men hvussu var tað møguligt? Við einum undri flutti Jehova lívið hjá soni sínum úr himli til lívmóðurina hjá eini jomfrú, sum æt Maria. So tað var ikki eitt menniskja, sum var pápi Jesusar. Maria átti síðani eitt fullkomið dreingjabarn, og hon rópti hann Jesus. – Lukas 1:30-35.

HVUSSU VAR JESUS?

15 Evangeliini í Bíbliuni, Matteus, Markus, Lukas og Jóhannes, læra okkum eina rúgvu um lívið hjá Jesusi, og hvussu hann var sum menniskja. Tað, sum tú lesur um Jesus, hjálpir tær eisini at læra meira um Jehova, tí Jesus er akkurát sum faðir sín. Og tí kundi Jesus siga: „Tann,ið hevur sæð Meg, hevur sæð Faðirin.“ – Jóhannes 14:9.

16 Nógv róptu Jesus fyri ’meistara’, ella lærara. (Jóhannes 1:39; 13:13) Eitt tað mest týðandi, sum Jesus

---

13. Hví sigur Bíblian, at Jesus er ’mynd hins ósjónliga Guds’?
14. Hvussu kundi sonur Guds blíva føddur sum menniskja?
15. Hvussu kanst tú læra meira um Jehova?
16. Hvat lærdi Jesus onnur? Hvar kom læran hjá Jesusi frá?

lærdi onnur, var gleðiboðskapurin um Guds ríki. Hvat er tað fyri eitt ríki? Tað er ein ríkisstjórn, sum Gud hevur stovnað, og sum skal ráða úr himli. Hetta ríkið fer at syrgja fyri, at øll, sum hava valt at tæna Gudi, fáa eitt sera gott lív her á jørðini. (Matteus 4:23) Alt tað, sum Jesus lærdi onnur, var nakað, sum Jehova hevði lært hann. Jesus segði: „Læra Mín er ikki Mín, men Hansara, sum hevur sent Meg.“ (Jóhannes 7:16) Jesus visti, at Jehova vil, at fólk skulu hoyra tey góðu tíðindini um, at Guds ríki skal ráða yvir jørðini.

17 Hvar undirvísti Jesus? Allastaðni har fólk vóru at hitta. Hann undirvísti í býum, í bygdum, millum bygdir, á torgum, í templinum og inni hjá fólki. Hann sat ikki og bíðaði eftir, at fólk skuldu koma til hansara, men fór sjálvur til teirra. (Markus 6:56; Lukas 19:5, 6) Jesus legði nógva tíð og orku í at undirvísa øðrum. Hví? Tí tað var Gud, sum vildi hava hann at gera tað, og hann aktaði altíð faðir sín. (Jóhannes 8:28, 29) Eitt annað, sum fekk Jesus at boða, var, at hann legði merki til, hvussu onnur høvdu tað, og føldi við teimum. **(Les Matteus 9:35, 36.)** Hann sá týðiliga, at trúarleiðararnir ikki lærdu fólk sannleikan um Gud og hansara ríki. So tí royndi hann at fortelja so nógvum sum gjørligt um tey góðu tíðindini.

18 Jesus var sera góður við menniskju og gjørdi nógv fyri at hjálpa teimum. Hann var blíður og lættur at tosa við. Børn høvdu eisini hug at vera saman

---

17. Hvar undirvísti Jesus? Hví legði hann so nógva tíð og orku í at undirvísa øðrum?
18. Hvat dámar tær best við Jesusi?

við honum. (Markus 10:13-16) Jesus var altíð rættvísur. Hann hataði at síggja menniskju blíva kúgað og órættvíst viðfarin. (Matteus 21:12, 13) Hóast hann livdi í eini tíð, tá ið kvinnur bara høvdu fá rættindi, fór hann altíð væl við kvinnum og vísti teimum virðing. (Jóhannes 4:9, 27) Jesus var eisini sera eyðmjúkur. Eitt kvøldið vaskaði hann til dømis ápostlunum um føturnar, og tað var nakað, sum ein tænari vanliga gjørdi. – Jóhannes 13:2-5, 12-17.

19 Jesus visti, hvat fólk høvdu brúk fyri, og hann vildi gjarna hjálpa teimum. Tað kom týðiliga til sjóndar, tá ið hann við Guds kraft grøddi fólk. (Matteus 14:14) Til dømis kom ein spitalskur maður til Jesus og segði: „Um tú vilt, kanst tú gera meg frískan.“ Jesus fekk ilt í hjartað av at síggja, hvussu maðurin píndist. Hann tók so synd í honum og vildi gjarna hjálpa honum. Jesus rætti hondina út, nam við mannin og segði: ’Eg vil, ver frískur!’ Og maðurin varð grøddur. (Markus 1:40-42, *NS*) Dugir tú at ímynda tær, hvussu maðurin hevði tað?

JESUS VAR ALTÍÐ TRÚFASTUR MÓTI FAÐIR SÍNUM

20 Eingin hevur verið líka trúfastur móti Gudi sum Jesus. Uttan mun til hvat hendi, ella hvat hansara fíggindar gjørdu við hann, var hann altíð trúfastur móti faðir sínum. Til dømis syndaði Jesus ikki, tá ið Satan royndi at freista hann. (Matteus 4:1-11) Nøkur

---

19. Hvat dømi vísir, at Jesus visti, hvat fólk høvdu brúk fyri, og at hann gjarna vildi hjálpa teimum?
20, 21. Hví kunnu vit siga, at Jesus er besta fyrimyndin í at vera trúfastur móti Gudi?

Jesus boðaði allastaðni

í familjuni hjá Jesusi trúðu ikki upp á, at hann var Messias, og tey søgdu enntá, at hann var óður í høvdinum. Men Jesus helt fram at gera Guds vilja. (Markus 3:21) Hóast fíggindarnir hjá honum vóru óndir við hann, var hann trúfastur móti Gudi og hevndi seg ongantíð. – 1. Pætursbræv 2:21-23.

21 Jesus fekk ein ógvisligan og pínufullan deyða, men eisini tá var hann trúfastur móti Jehova. **(Les Hebrearabrævið 2:9.)** Hugsa tær alt tað ræðuliga, hann mátti ígjøgnum tann dagin, hann doyði. Hann bleiv handtikin, følsk vitni ákærdu hann fyri gudsspottan, órættvísir dómarar dømdu hann til deyðis, fólk spottaðu hann, hermenn píndu hann og negldu hann á ein steyra. Beint áðrenn hann doyði, rópti

hann: „Tað er fullgjørt!“ (Jóhannes 19:30) Tríggjar dagar eftir, at Jesus doyði, reisti Jehova hann upp frá deyðum og gav honum eitt andaligt likam. (1. Pætursbræv 3:18) Nakrar fáar vikur seinni fór Jesus aftur til himmals og setti seg „við høgru hond Guds“. Har bíðaði hann eftir, at Gud skuldi gera hann til kong. – Hebrearabrævið 10:12, 13.

22 Av tí at Jesus var trúfastur móti faðir sínum, hava vit møguleika at liva um ævir í einum paradísi á jørðini, akkurát sum Jehova ætlaði tað. Næsti kapittulin snýr seg um, hvat samband er millum deyða Jesusar og vónina um ævigt lív.

---

22. Hvat er møguligt hjá okkum, av tí at Jesus var trúfastur móti faðir sínum?

1 JESUS ER MESSIAS

„Tú ert Kristus.“– Matteus 16:16

Hvussu vita vit, at Jesus er Messias?

Matteus 3:16, 17;
Jóhannes 1:32-34
Jehova segði, at Jesus var sonur hansara.

Mika 5:1;
Matteus 2:1, 3-9
Jesus uppfylti allar profetiirnar um Messias.

2 JESUS VAR Í HIMLI, ÁÐRENN HANN KOM NIÐUR Á JØRÐINA

„Eg eri komin niður av Himli.“– Jóhannes 6:38

Hvat gjørdi Jesus í himli?

Kolossebrævið 1:15, 16, *NW*
Jehova skapti fyrst Jesus, og so læt hann Jesus vera við til at skapa alt annað. Jesus bleiv upplærdur av faðir sínum í milliardir av árum.

Lukas 1:30-35
Jehova sendi Jesus niður á jørðina.

3 JESUS ELSKAR MENNISKJU

„Latið hini smáu børn koma til Mín.“– Markus 10:14

Hvat dámar tær best við Jesusi?

Markus 10:13-16
Hann var blíður, og fólk høvdu hug at tosa við hann.

Jóhannes 4:9, 27
Hann vísti kvinnum virðing og fór væl við teimum.

Jóhannes 13:2-5, 12-17
Hann var eyðmjúkur.

Matteus 9:35, 36; Markus 1:40-42
Hann vildi gjarna hjálpa øðrum.

4 JESUS GER ALTÍÐ GUDS VILJA

’Eg havi fullført verkið, sum tú hevur givið mær at gera.’– Jóhannes 17:4

Hvussu kann tað, at Jesus var trúfastur, hjálpa okkum at vera trúføst?

Matteus 4:1-11
Hann var trúfastur, tá ið Djevulin freistaði hann.

Markus 3:21
Hann gjørdi Guds vilja, sjálvt tá ið nøkur í familjuni spottaðu hann.

1. Pætursbræv 2:21-23
Hann hevndi seg ongantíð inn á sínar fíggindar.

Hebrearabrævið 2:9
Hann var trúfastur líka til deyðan.

Hebrearabrævið 10:12, 13; 1. Pætursbræv 3:18
Jehova reisti Jesus upp til lív í himli.

STØRSTA GÁVAN FRÁ GUDI

HVAT er tann besta gávan, tú nakrantíð hevur fingið? Tá ið ein gáva ger teg glaðan, ella tú fært nakað, sum tú veruliga hevur brúk fyri, verður tú takksamur.

2 Gud hevur givið okkum nógvar góðar gávur, men ein av gávunum er nakað heilt serligt. Og tað er eisini hesi gávuni, vit hava allarmest brúk fyri. Gud gav sín son, Jesus Kristus, sum eitt loysigjald, fyri at vit kunnu fáa ævigt lív. **(Les Matteus 20:28.)** Henda gávan vísir, at Jehova elskar okkum ómetaliga nógv.

HVAT ER LOYSIGJALDIÐ?

3 Jehova hevur syrgt fyri einum loysigjaldi, sum bjargar menniskjum undan synd og deyða. (Efesusbrævið 1:7) Hví var tað neyðugt? Fyri at fáa svar upp á tað mugu vit finna út av, hvat hendi í urtagarðinum Eden fyri fleiri túsund árum síðani. Tey fyrstu menniskjuni, Ádam og Eva, gjørdu uppreistur ímóti Jehova og syndaðu, og sum frá leið doyðu tey. Vit hava arvað syndina frá teimum, og tí verða vit eisini gomul og doyggja. – Les endagrein 9.

4 Tá ið Jehova skapti tann fyrsta mannin, Ádam, gav hann honum nakað, sum hevði øgiliga stórt virði – lív

---

1, 2. (a) Nær heldur tú, at ein gáva er góð? (b) Hví er loysigjaldið tann størsta gávan frá Gudi?
3. Hví verða vit gomul og doyggja?
4. Hvat gav Jehova Ádami?

sum fullkomið menniskja. Hann var altso fullkomin, bæði sálarliga og kropsliga. Hann skuldi ongantíð blíva sjúkur, gamal ella doyggja. Av tí at Jehova hevði skapt Ádam, var hann sum ein pápi fyri hann. (Lukas 3:38) Jehova tosaði ofta við hann. Hann segði við Ádam, hvat hann væntaði av honum og gav honum eisini nakað áhugavert at gera. – 1. Mósebók 1:28-30; 2:16, 17.

5 Ádam bleiv skaptur „í bílæti Guds“. (1. Mósebók 1:27) Tað merkir, at hann hevði somu eginleikar sum Jehova, millum annað kærleika, vísdóm, rættvísi og kraft. Ádam fekk eisini ein frían vilja og varð altso ikki skaptur sum ein robottur. Hann kundi velja at gera tað, sum var rætt ella skeivt. Um Ádam hevði valt at gera, sum Jehova segði, hevði hann kunnað livað um ævir á jørðini.

6 Ádam mátti gjalda ein sera høgan prís fyri sín uppreistur ímóti Gudi. Hann misti sítt serliga samband við Jehova, sítt fullkomna lív og sítt vakra heim í paradísinum. Og at enda doyði hann. (1. Mósebók 3:17-19) Ádam og Eva valdu at seta seg upp ímóti Gudi, og tí høvdu tey ikki longur vón um at liva í allar ævir. Orsakað av tí Ádam gjørdi, ’kom syndin inn í heimin, og deyðin við syndini, og soleiðis trongdi deyðin ígjøgnum til øll menniskju, tí øll syndaðu’. (Rómbrævið 5:12) Tá ið Ádam syndaði, ’seldi’ hann seg sjálvan og allar sínar eftirkomarar til at vera trælir undir synd og deyða. (Rómbrævið 7:14) Hava vit so nakra vón? Ja, og tað er har, loysigjaldið kemur inn í myndina.

---

5. Hvat merkir tað, at Ádam bleiv skaptur „í bílæti Guds“?
6. Hvat misti Ádam, tá ið hann gjørdi uppreistur ímóti Gudi? Hvussu ávirkar tað okkum?

7 Hvat er eitt loysigjald? Eitt loysigjald er tann prísurin, sum verður goldin fyri at lata onkran leysan. Sambært Bíbliuni kann eitt loysigjald eisini vera tann prísurin, sum fullkomiliga dekkar kostnaðin fyri ein skaða.

8 Einki menniskja kundi rindað fyri tann ómetaliga stóra skaðan, sum Ádam var atvold til, tá ið hann syndaði og gav okkum deyðan í arv. Men Jehova syrgdi fyri, at vit kundu blíva bjargað undan synd og deyða. Latið okkum kanna eitt sindur meira um loysigjaldið og vita, hvussu tað kann gagna okkum.

HVUSSU SYRGDI JEHOVA FYRI LOYSIGJALDINUM?

9 Eingin av okkum kundi nakrantíð rindað prísin fyri tað fullkomna lívið, sum Ádam misti. Hví ikki? Tí vit eru øll ófullkomin. (Sálmur 49:8, 9) Tað, sum skuldi til, var eitt annað fullkomið mannalív. (1. Timoteusarbræv 2:6) Loysigjaldið mátti hava sama virði sum tað lívið, Ádam misti.

10 Hvussu syrgdi Jehova fyri loysigjaldinum? Hann sendi sín elskaða son, Jesus, niður á jørðina. Hesin sonurin var tann fyrsti, sum Jehova skapti. (1. Jóhannesarbræv 4:9, 10) Jesus var villigur at fara frá faðir sínum og lívinum, hann hevði í himli. (Jóhannes 16:28) Jehova flutti lívið hjá Jesusi úr himli til lívmóðurina hjá Mariu, og soleiðis bleiv Jesus føddur sum eitt fullkomið menniskja, uttan synd. – Lukas 1:35.

7, 8. Hvat er eitt loysigjald?
9. Hvussu kundi loysigjaldið rindast?
10. Hvussu syrgdi Jehova fyri loysigjaldinum?

11 Tá ið Ádam var ólýðin ímóti Jehova, gav hann øllum menniskjum deyðan í arv. Men øll vón var ikki úti. Jesus, sum ongantíð syndaði, gav sítt fullkomna lív sum loysigjald. **(Les Rómbrævið 5:19;** 1. Korintbræv 15:45.) Hansara fullkomna lív kundi brúkast til at beina fyri deyðanum og geva øllum eftirkomarunum hjá Ádami møguleika fyri at fáa ævigt lív. – 1. Korintbræv 15:21, 22.

12 Bíblian sigur okkum, hvussu nógv Jesus mátti ígjøgnum, áðrenn hann doyði. Hann bleiv húðflongdur, negldur á ein steyra og leið ein drúgvan og pínufullan deyða. (Jóhannes 19:1, 30; Ápostlasøgan 10:39) Hví var tað neyðugt, at Jesus skuldi ígjøgnum so nógva pínu? Tí Satan hevði pástaðið, at einki menniskja fór at vera trúfast móti Gudi undir ógvisligum royndum. Men Jesus prógvaði, at eitt fullkomið menniskja kann vera trúfast móti Jehova, sjálvt undir sera ógvisligum umstøðum. Hugsa tær, hvussu stoltur Jehova var av Jesusi! – Orðtøkini 27:11; les endagrein 15.

13 Hvussu bleiv loysigjaldið goldið? Í ár 33, tann 14. nisan eftir jødiska kalendaranum, loyvdi Jehova, at Jesus bleiv dripin av sínum fíggindum. (Hebrearabrævið 10:10) Tríggjar dagar seinni fekk Jesus lívið aftur, ikki sum eitt menniskja, men sum ein andaskapningur. Loysigjaldið var tó ikki goldið, fyrr enn Jesus kom aftur til himmals og gav Jehova virðið av sínum fullkomna mannalívi. Hann gav altso rættin at liva sum eitt fullkomið menniskja á jørðini frá sær,

---

11. Hvussu kundi eitt menniskja vera loysigjald fyri øll menniskju?
12. Hví var tað neyðugt, at Jesus skuldi ígjøgnum so nógva pínu?
13. Hvussu bleiv loysigjaldið goldið?

so Jehova kundi geva eftirkomarunum hjá Ádami henda rættin. (Hebrearabrævið 9:24) Nú tá ið loysigjaldið er goldið, hava vit møguleika at verða bjargað undan synd og deyða. – **Les Rómbrævið 3:23, 24.**

HVUSSU KANN LOYSIGJALDIÐ GAGNA OKKUM?

14 Størsta gávan frá Gudi gagnar okkum longu nú. Latið okkum vita, hvussu hon ger tað, og hvussu hon fer at gera tað í framtíðini.

15 Vit kunnu fáa fyrigeving. Tað er ikki altíð lætt at gera tað rætta. Av og á siga og gera vit nakað, sum er skeivt. Hvussu fáa vit fyrigeving? Vit mugu veruliga angra tað skeiva, vit hava gjørt, og biðja til Jehova um fyrigeving. Tá kunnu vit vera vís í, at hann fyrigevur okkum. – Kolossebrævið 1:13, 14; 1. Jóhannesarbræv 1:8, 9.

16 Vit kunnu hava góða samvitsku. Tá ið vit hava gjørt nakað skeivt, kunnu vit fáa ringa samvitsku og enntá føla, at vit einki nytta. Men vit mugu ikki missa mótið. Biðja vit Jehova um fyrigeving, kunnu vit vera vís í, at hann lurtar og gjarna vil fyrigeva okkum. (Hebrearabrævið 9:13, 14) Jehova vil, at vit skulu tosa við hann um tað, sum vit hava at stríðast við. (Hebrearabrævið 4:14-16) Tá ið vit gera tað, fáa vit eitt gott samband við hann.

17 Vit hava vón um ævigt lív. „Lønin, ið syndin gevur, er deyði, men náðigáva Guds er ævigt lív í Kristi Jesusi, Harra okkara.“ (Rómbrævið 6:23) Av tí at Jesus

---

14, 15. Hvat mugu vit gera fyri at fáa fyrigeving?
16. Hvat mugu vit gera fyri at hava góða samvitsku?
17. Hvat er møguligt, av tí at Jesus doyði fyri okkum?



Jehova gav
sín elskaða son
fyri okkara skyld

doyði fyri okkum, hava vit møguleika at liva og hava góða heilsu í allar ævir. (Opinberingin 21:3, 4) Men hvat skulu vit gera fyri at sleppa at uppliva tað?

ERT TÚ TAKKSAMUR FYRI LOYSIGJALDIÐ?

18 Hvussu hevur tú tað, tá ið onkur gevur tær eina gávu? Loysigjaldið er tann størsta gávan av øllum, og vit eiga at vera sera takksom fyri hesa gávuna. Í Jóhannes 3:16 stendur: „So elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin einborna.“ Ja, Jehova elskar okkum so nógv, at hann ofraði sín son fyri okkara skyld. Og vit vita, at Jesus eisini elskar okkum, tí hann var villigur at doyggja fyri okkum. (Jóhannes 15:13) Loysigjaldið sannførir okkum um, at bæði Jehova og Jesus elska okkum. – Galatiabrævið 2:20.

19 Jehova hevur vístt, at hann elskar okkum. Men hvussu kunnu vit vísa, at vit eru takksom fyri tað, sum hann hevur gjørt? Vit kunnu læra meira um Jehova og *blíva hansara vinir.* (Jóhannes 17:3) Betur vit læra hann at kenna, tættari samband fáa vit við hann. Og tann besti mátin at læra meira um Jehova er at halda fram at kanna Bíbliuna. – 1. Jóhannesarbrævið 5:3.

20 Vís trúgv á loysigjaldið. Bíblian sigur: „Tann, ið trýr á Sonin, hevur ævigt lív.“ (Jóhannes 3:36) Hvat liggur í tí at trúgva? Tað vil siga, at vit gera tað, sum Jesus lærdi okkum at gera. (Jóhannes 13:15) Tað er altso ikki nokk bara at siga, at vit trúgva á Jesus. Fyri at fáa gagn av loysigjaldinum, mugu vit eisini vísa

---

18. Hvussu vita vit, at Jehova elskar okkum?
19, 20. (a) Hvussu kunnu vit vísa, at vit eru takksom fyri tað, sum Jehova hevur gjørt? (b) Hvussu kunnu vit vísa trúgv á loysigjaldið?

Vit fáa tættari samband við Jehova, so hvørt sum vit læra hann betur at kenna

okkara trúgv í verki. Í Jákupsbrævinum 2:26 lesa vit: „Trúgvin [er] deyð uttan verk.“

21 **Ver við á minningarhøgtíðini.** Kvøldið fyri at Jesus doyði, segði hann, at vit skuldu halda eina høgtíð til minni um hansara deyða. Eina ferð um árið halda vit hesa minningarhøgtíðina, sum eisini verður rópt „kvøldmáltíð Harrans“. (1. Korintbræv 11:20; Matteus 26:26-28) Jesus vil, at vit skulu minnast, at hann gav sítt fullkomna mannalív sum eitt loysigjald fyri okkum. Hann segði: „Gerið hetta til minni um Meg!“ **(Les Lukas 22:19.)** Tá ið tú ert við á minningarhøgtíðini, vísir tú, at tú ert takksamur fyri loysigjaldið og tann stóra kærleikan, sum Jehova og Jesus hava víst okkum. – Les endagrein 16.

22 Vit kunnu ikki fáa nakra størri gávu enn loysigjaldið. (2. Korintbræv 9:14, 15) Henda gávan kann enntá gagna teimum, sum eru deyð. Í 6. og 7. kapitli fáa vit at vita, hvussu tað kann lata seg gera.

21, 22. (a) Hví skulu vit vera við á minningarhøgtíðini á hvørjum ári? (b) Hvat fáa vit at vita í 6. og 7. kapitli?

1 ØLL HAVA BRÚK FYRI LOYSIGJALDINUM

’Menniskjasonurin er komin at geva lív sítt sum loysigjald fyri mong.’– Matteus 20:28

Hví hava vit brúk fyri loysigjaldinum?

1. Mósebók 3:17-19
Tá ið Ádam gjørdi uppreistur ímóti Jehova, misti hann sítt serliga samband við hann, sítt fullkomna lív og sítt vakra heim í paradísinum.

Rómbrævið 5:12
Orsakað av tí Ádam gjørdi, hava vit arvað synd og deyða.

Efesusbrævið 1:7
Jehova brúkar loysigjaldið til at bjarga menniskjum undan synd og deyða.

2 JEHOVA SYRGDI FYRI LOYSIGJALDINUM

„Gud hevur sent Son Sín, hin einborna, í heimin, fyri at vit skulu liva við Honum.“– 1. Jóhannesarbræv 4:9

Hvussu syrgdi Jehova fyri loysigjaldinum?

Sálmur 49:8, 9
Eingin av okkum kundi nakrantíð rindað prísin fyri tað fullkomna lívið, sum Ádam misti.

Lukas 1:35
Jehova sendi sín elskaða son niður á jørðina, so hann kundi blíva føddur sum eitt fullkomið menniskja.

Rómbrævið 3:23, 24; Hebrearabrævið 9:24
Eftir sína uppreisn fór Jesus aftur til himmals, og tá gav hann Jehova virðið av sínum fullkomna mannalívi sum eitt loysigjald.

3 LOYSIGJALDIÐ GEVUR VÓN

„Hann skal turka hvørt tár av eygum teirra; deyðin skal ikki vera longur.“– Opinberingin 21:4

Hvussu kann loysigjaldið gagna okkum?

1. Jóhannesarbræv 1:8, 9
Vit kunnu fáa okkara syndir fyrigivnar.

Hebrearabrævið 9:13, 14
Vit kunnu hava góða samvitsku fyri Gudi.

Rómbrævið 6:23
Vit hava vón um ævigt lív.

Galatiabrævið 2:20
Loysigjaldið er ein gáva, sum vísir, at Jehova og Jesus elska okkum.

4 VIT MUGU VÍSA TAKKSEMI FYRI LOYSIGJALDIÐ

„Gud ... gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ... hava ævigt lív.“– Jóhannes 3:16

Hvussu kunnu vit vísa, at vit eru takksom fyri loysigjaldið?

Jóhannes 17:3
Vit mugu læra Jehova og Jesus at kenna og royna at líkjast teimum.

Lukas 22:19
Vit mugu vera við á høgtíðini til minni um deyða Jesusar á hvørjum ári.

Jóhannes 3:36; Jákupsbrævið 2:26
Tað er ikki nokk bara at siga, at vit trúgva á Jesus. Vit mugu gera tað, sum hann lærdi okkum.

KAPITTUL 6

HVAT HENDIR, TÁ IÐ VIT DOYGGJA?

„DEYÐIN skal ikki vera longur.“ (Opinberingin 21:4) Hetta er eitt lyfti, sum stendur at lesa í Bíbliuni. Í undanfarna kapitli lærdu vit, at loysigjaldið ger tað møguligt hjá okkum at fáa ævigt lív. Men sum nú er, sleppa vit ikki undan at doyggja. (Prædikarin 9:5) So ein av teimum heilt stóru spurningunum er: Hvat hendir, tá ið vit doyggja?

2 Tað hevur serliga stóran týdning at fáa svar upp á tann spurningin, tá ið vit missa ein kæran. Vit hugsa kanska: ’Hvar er hann nú? Pínist hann? Sær hann, hvat vit gera? Kunnu vit fáa samband við hann? Síggja vit hann nakrantíð aftur?’

3 Tað er ymiskt, hvussu átrúnaðir svara sovorðnum spurningum. Nøkur læra, at góð menniskju fara til himmals, og at ónd menniskju skulu brenna í helviti. Onnur halda, at vit liva víðari og sleppa at vera saman við øðrum í familjuni, sum longu eru deyð. Og uppaftur onnur siga, at vit verða endurfødd, antin sum eitt annað menniskja ella eitt djór, alt eftir hvussu vit hava livað okkara lív.

4 Tað er altso rættiliga ymiskt, hvat átrúnaðir læra um deyðan. Men næstan allir hava eitt í felag. Teir læra, at menniskju liva víðari eftir deyðan. Men passar tað?

1-3. Hvat hugsa nógv um, tá ið onkur doyr, og hvørjar ymiskar meiningar hava fólk um tað?
4. Hvat læra flestu átrúnaðir um deyðan?

HVAT HENDIR, TÁ IÐ VIT DOYGGJA?

5 Jehova veit, hvat hendir við okkum, tá ið vit doyggja, og hann hevur sagt, at *tá ið eitt menniskja doyr, heldur tað uppat at vera til.* Deyðin er tað øvuta av lívi. Vit liva altso ikki víðari nakra aðrastaðni.* Tey, sum eru deyð, síggja einki, hoyra einki, hugsa einki og føla einki.

6 Bíblian sigur: „Hini deyðu *vita einki.*“ Tey eru ikki før fyri at elska ella hata, „tí hvørki virki, klókskapur, kunnskapur ella vísdómur er í deyðaríkinum“. **(Les Prædikaran 9:5, 6, 10.)** Og Sálmur 146:4 sigur okkum, at tá ið onkur doyr, so „er úti við hugsanum hansara“.

HVAT SEGÐI JESUS UM DEYÐAN?

7 Tá ið ein góður vinur hjá Jesusi, sum æt Lazarus, doyði, segði Jesus við lærisveinarnar: „Lazarus, vinur okkara, er sovnaður.“ Men Jesus tosaði ikki um vanligan svøvn, tí beint aftaná segði hann: „Lazarus er deyður.“ (Jóhannes 11:11-14) Jesus samanbar altso deyðan við svøvn. Hann segði ikki, at Lazarus var í himli ella saman við skyldfólkum, sum vóru deyð. Hann segði heldur ikki, at Lazarus píndist í helviti ella var endurføddur sum eitt annað menniskja ella eitt djór. Nei, tað var sum, at Lazarus lá í fasta svøvni. Aðrastaðni í Bíblíuni verður deyðin eisini samanborin við tað at sova. Hon sigur til dømis, at tá ið Stefanus doyði, „sovnaði hann“. (Ápostlasøgan 7:60) Og Paulus ápostul skrivaði um nakrar trúarfelagar, sum vóru deyðir, at teir vóru „sovnaðir“. – 1. Korintbræv 15:6.

---

* Nøkur halda, at vit hava eina sál, sum livir víðari, tá ið vit doyggja. Les meira í endagreinunum 17 og 18.

5, 6. Hvat hendir við okkum, tá ið vit doyggja?
7. Hvat segði Jesus um deyðan?

8 Tá ið Gud skapti Ádam og Evu, var tað ikki meiningin, at tey nakrantíð skuldu doyggja. Ætlanin var, at tey skuldu liva í allar ævir og hava góða heilsu. Jehova hevur faktiskt skapt okkum soleiðis, at vit hava hug til at liva um ævir. (Prædikarin 3:11) Eingi foreldur vilja síggja børnini hjá sær blíva sjúk og doyggja, og soleiðis hevur Jehova tað eisini við okkum. Men um Gud skapti okkum til at liva ævigt, hví doyggja vit so?

---

8. Hvussu vita vit, at tað ikki var meiningin, at vit menniskju skuldu doyggja?

Jehova skapti menniskjuni, so tey kundu liva um ævir á jørðini

HVÍ DOYGGJA VIT?

9 Í urtagarðinum Eden segði Jehova við Ádam: „Tú hevur loyvi at eta av øllum trøum í urtagarðinum uttan av trænum til kunnskap um gott og ilt; av tí mást tú ikki eta; tann dag ið tú etur av tí, skalt tú vissuliga doyggja.“ (1. Mósebók 2:9, 16, 17) Hetta var lætt at skilja og ikki nakað órímiligt krav. Jehova hevði skapt Ádam og Evu, og tí hevði hann rætt til at gera av, hvat var gott og ónt. Hann visti, hvat var best fyri tey. Um tey høvdu aktað Jehova, so høvdu tey víst, at tey høvdu virðing fyri honum. Og tað hevði eisini verið ein góður máti at vísa takksemi fyri alt tað, sum hann hevði givið teimum.

10 Ádam og Eva valdu tíverri ikki at akta Jehova. Satan segði við Evu: „Hevur Gud virkuliga sagt, at tit ikki mugu eta av øllum trøunum í havanum?“ Eva svaraði: „Vit sleppa at eta fruktina av trøunum í havanum, men ikki fruktina av tí trænum, sum stendur mitt í havanum. Tí Gud hevur sagt: ’Tit mugu ikki eta av henni, nei, heldur ikki nema við hana, tí so skulu tit doyggja.’“ – 1. Mósebók 3:1-3, *NW*.

11 Tá segði Satan: „Tit skulu als ikki doyggja. Tí Gud veit, at tann dagin, tit eta av henni, skulu eygu tykkara verða latin upp, og tit skulu verða sum Gud og vita, hvat er gott og ónt.“ (1. Mósebók 3:4-6, *NW*) Satan vildi hava Evu at halda, at hon sjálv kundi gera av, hvat var gott, og hvat var ónt. Og hann leyg um, hvat fór at henda, um hon át av fruktini. Satan segði, at Eva ikki skuldi doyggja. So hon át av fruktini og gav eisini Ádami burturav.

---

9. Hví var tað, sum Jehova kravdi av Ádami og Evu, ikki órímiligt?
10, 11. (a) Hvussu fekk Satan Ádam og Evu at ganga ímóti tí, sum Gud hevði sagt? (b) Hví er eingin umbering fyri tað, sum Ádam og Eva gjørdu?

Ádam og Eva vistu, at Jehova hevði sagt, at tey *ikki* máttu eta av fruktini. Tá ið tey ótu av henni, valdu tey at ganga beint ímóti tí, sum Gud hevði sagt. Soleiðis vístu tey, at tey ikki høvdu virðing fyri faðir sínum, sum elskaði tey so nógv. Eingin umbering er fyri tað, sum tey gjørdu!

12 Sum tað er syrgiligt, at tey fyrstu menniskjuni høvdu so lítla virðing fyri Jehova, sum hevði skapt tey. Hugsa tær, at tú í nógv ár hevur gjørt alt fyri at uppala tíni børn væl, men so gera tey uppreistur. Tey ganga beint ímóti tínum týðiligu ávaringum og enda við at oyðileggja sítt lív. Hevði tað ikki gjørt teg ótrúliga keddan?

13 Tá ið Ádam og Eva valdu ikki at akta Gud, mistu tey møguleikan at liva um ævir. Jehova segði við Ádam: „Mold ert tú, og mold skalt tú aftur verða!“ **(Les 1. Mósebók 3:19.)** Ádam skuldi altso blíva mold aftur, sum um hann ongantíð var blivin skaptur. (1. Mósebók 2:7) Tá ið Ádam doyði, var hann heilt einfalt ikki til longur.

14 Um Ádam og Eva høvdu aktað Gud, høvdu tey verið á lívi enn í dag.

Ádam kom úr moldini, og hann fór aftur í moldina

12. Hví er tað so syrgiligt, at Ádam og Eva ikki aktaðu Jehova?
13. Hvat meinti Jehova, tá ið hann segði: „Mold skalt tú aftur verða“?
14. Hví doyggja vit?

Men tá ið tey gingu ímóti tí, sum hann hevði sagt, syndaðu tey, og at enda doyðu tey. Syndin er sum ein ræðulig sjúka, vit hava arvað frá teimum fyrstu menniskjunum. Vit eru øll fødd sum syndarar, og tí doyggja vit. (Rómbrævið 5:12) Men tað var ikki tað, Gud ætlaði við menniskjunum. Hann ætlaði ongantíð, at menniskjuni skuldu doyggja, og Bíblian rópar enntá deyðan fyri ein 'fígginda'. – 1. Korintbrøv 15:26.

SANNLEIKIN UM DEYÐAN GEVUR OKKUM FRIÐ Í SINNIÐ

15 Sannleikin um deyðan fríar okkum undan nógvum skeivum lærum og gevur okkum frið í sinnið. Bíblian lærir, at tey deyðu hvørki pínast ella eru kedd. Vit fáa ikki tosað við tey, og tey fáa ikki tosað við okkum. Vit kunnu ikki hjálpa teimum, og tey kunnu ikki hjálpa okkum. Vit skulu ikki vera bangin fyri teimum deyðu, tí tey fáa ikki gjørt okkum nakað. Men kortini læra nógvir átrúnaðir, at tey deyðu liva víðari, og at mann kann hjálpa teimum, um mann gevur prestum ella øðrum átrúnaðarligum leiðarum pengar. Men vit vita, hvat hendir, tá ið vit doyggja, og lata okkum tí ikki lumpa av sovorðnum lygnum.

16 Satan brúkar falskan átrúnað til at fáa okkum at halda, at tey deyðu liva víðari onkra aðrastaðni. Til dømis læra nakrir átrúnaðir, at vit hava eina sál, sum livir víðari, tá ið vit doyggja. Hvat læra tey, har sum tú gongur í kirkju ella á møti? Læra tey tað sama, sum Bíblian lærir? Satan roynir at fáa fólk at trúgva lygnum og soleiðis forða teimum í at læra Jehova at kenna.

---

15. Hvussu gevur sannleikin um deyðan okkum frið í sinnið?
16. Hvat læra nógvir átrúnaðir um deyðan?

17 Nakað av tí, sum nógvir átrúnaðir læra, er beinleiðis skelkandi. Til dømis læra fleiri, at ónd menniskju skulu brenna í helviti um allar ævir. Henda lygnin er ein grov háðan ímóti Jehova. Hann hevði ongantíð loyvt, at menniskju skuldu blíva pínd! **(Les 1. Jóhannesarbræv 4:8.)** Hvat hevði tú hugsað um ein pápa, sum straffaði sonin við at leggja hondina hjá honum á eina glóðheita kókiplátu? Tú hevði hildið, at hann var ræðuliga óndur. Tú hevði ikki viljað havt nakað við hann at gera. Og tað er akkurát tað, Satan vil hava okkum at hugsa um Jehova!

18 Í nøkrum átrúnaðum siga tey, at menniskju verða andar, tá ið tey doyggja. Tey halda, at tey skulu vísa andunum virðing og enntá vera bangin fyri teimum, tí andarnir antin kunnu blíva teirra vinir ella fíggindar. Nógv trúgva hesi lygnini. Tey ræðast tey deyðu og tilbiðja tey í staðin fyri Jehova. Men minst til, at tey deyðu hvørki føla nakað ella vita nakað, so tað er eingin grund til at vera bangin fyri teimum. Jehova er hin einasti sanni Gud. Hann hevur skapt okkum, og tí eiga vit bara at tilbiðja hann. – Opinberingin 4:11.

19 Tað er ein lætti at vita sannleikan um deyðan. Og tað hjálpir okkum eisini at skilja tey fantastisku lyftini, sum Jehova hevur givið okkum um framtíðina.

20 Fyri langari tíð síðani spurdi ein tænari hjá Gudi, sum æt Job: „Táið maður doyr, livnar hann tá upp aftur!“ (Job 14:14) Ber tað veruliga til, at ein, sum er deyður, kann fáa lívið aftur? Svarið, Bíblian gevur, er sera uggandi. Næsti kapittulin snýr seg um tað.

---

17. Hví er helvitislæran ein háðan ímóti Jehova?
18. Hví skulu vit ikki vera bangin fyri teimum deyðu?
19. Hví er tað gott at vita sannleikan um deyðan?
20. Hvat fáa vit at vita í næsta kapitli?

1 TÁ IÐ ONKUR DOYR, ER HANN IKKI TIL LONGUR

„Hini deyðu vita einki.“– Prædikarin 9:5

Hvat hendir, tá ið vit doyggja?

Sálmur 146:3, 4; Prædikarin 9:6, 10
Tá ið vit doyggja, síggja vit einki, hoyra einki og hugsa einki.

Jóhannes 11:11-14
Jesus samanbar deyðan við svøvn.

2 JEHOVA ÆTLAÐI ONGANTÍÐ, AT MENNISKJUNI SKULDU DOYGGJA

„Av trænum til kunnskap um gott og ilt ... mást tú ikki eta; tann dag ið tú etur av tí, skalt tú vissuliga doyggja.“– 1. Mósebók 2:17

Hví doyggja vit?

1. Mósebók 3:1-6, *NW*
Satan leyg um, hvat fór at henda, um Eva ikki aktaði Gud. Tá ið Ádam og Eva gingu ímóti tí, sum Jehova hevði sagt, syndaðu tey, og at enda doyðu tey.

1. Mósebók 3:19
Tá ið Ádam doyði, var hann ikki til longur.

Rómbrævið 5:12
Syndin er sum ein ræðulig sjúka, vit hava arvað frá teimum fyrstu menniskjunum. Vit eru øll fødd sum syndarar, og tí doyggja vit.

1. Korintbræv 15:26
Bíblian rópar deyðan ein fígginda.

3 SANNLEIKIN UM DEYÐAN GEVUR OKKUM FRIÐ Í SINNIÐ

„Táið maður doyr, livnar hann tá upp aftur! ... Tú skuldi tá rópt, og eg skuldi svarað.“– Job 14:14, 15

Hvørjum skeivum lærum sleppa vit undan, tá ið vit vita sannleikan um deyðan?

1. Jóhannesarbræv 4:8
Læran um eitt brennandi helviti er ein grov háðan ímóti Jehova. Hann hevði ongantíð loyvt, at menniskju skuldu blíva pínd.

Opinberingin 4:11
Nógv ræðast tey deyðu og tilbiðja tey í staðin fyri Jehova. Men Jehova er hin einasti sanni Gud, og vit eiga bara at tilbiðja hann.

TEY DEYÐU FÁA LÍVIÐ AFTUR!

HUGSA tær, at tú vart dømdur lívlanga fongsulsrevsing fyri nakað, tú ikki hevði gjørt. Tú sært ongan møguleika fyri at blíva leyslatin aftur. Framtíðarútlitini eru døpur, og tú fært einki gjørt við tað. Men beint sum tú hevur mist alla vón, finnur tú út av, at onkur hevur vald at lata teg leysan, og at hann hevur lovað at hjálpa tær. Hvussu hevði tú havt tað?

2 Deyðin hevur tikið okkum øll til fanga. Og vit fáa einki gjørt við tað. Men Jehova hevur vald at fría okkum undan deyðanum, og hann hevur lovað, at „hin síðsti fíggindin, ið til einkis verður gjørdur, er deyðin“. – 1. Korintbræv 15:26.

3 Sum tað verður ein lætti, tá ið vit ongantíð skulu hugsa um deyðan aftur. Men hvussu við teimum, sum longu eru deyð? Jehova hevur lovað at geva teimum lívið aftur. Hugsa tær, hvussu fantastiskt tað verður! Í Esaias 26:19 stendur, at ’hini deyðu skulu livna upp aftur’. Í Bíbliuni verður hetta rópt uppreisnin.

TÁ IÐ EIN, VIT ERU GÓÐ VIÐ, DOYR

4 Tá ið onkur í familjuni ella ein góður vinur doyr, kann sorgin vera so tung, at vit ikki orka at bera hana. Vit føla okkum púra hjálparleys. Vit fáa einki gjørt fyri at fáa viðkomandi aftur. Men Bíblian gevur

---

1-3. Hvussu kunnu vit siga, at vit øll eru fangar, og hvussu fer Jehova at fría okkum?

4. (a) Hvat kann geva okkum troyst, tá ið vit missa ein, vit eru góð við? (b) Hvørjar góðar vinir hevði Jesus millum annað?

okkum troyst. **(Les 2. Korintbræv 1:3, 4.)** Hon vísir, at Jehova og Jesus gjarna vilja geva okkara kæru lívið aftur. Vit kunnu kanna eitt dømi. Tá ið Jesus var á jørðini, plagdi hann ofta at vitja Lazarus og systrarnar hjá honum, Martu og Mariu. Tey vóru øll trý góðir vinir hjá Jesusi. Bíblian sigur: „Jesus elskaði Martu og systur hennara og Lazarus.“ Men so ein dagin doyði Lazarus. – Jóhannes 11:3-5.

5 Jesus fór til Martu og Mariu fyri at troysta tær. Tá ið Marta hoyrdi, at Jesus var á veg, fór hon ímóti honum. Hon var glað fyri at síggja Jesus, men segði við hann: „Hevði Tú verið her, so hevði bróðir ikki doyð!“ Marta helt, at Jesus var komin ov seint. Eina løtu seinni møtti Jesus Mariu, sum eisini var kedd og græt. Tá ið hann sá, hvussu keddar tær vóru, bleiv hann sera rørdur og fór sjálvur at gráta. (Jóhannes 11:21, 33-35) Hann føldi ta djúpu sorgina, vit føla, tá ið vit missa ein av okkara nærmastu.

6 Tað troystar okkum at vita, at Jesus hevur tað upp á sama máta sum vit, tá ið onkur doyr. Og soleiðis hevur Jehova tað eisini. (Jóhannes 14:9) Jehova hevur vald at beina fyri deyðanum, og tað fer hann heilt skjótt at gera.

„LAZARUS, KOM ÚT!“

7 Jesus kom til grøvina hjá Lazarusi. Ein stórur steinur var rullaður fyri inngongdina, men Jesus

---

5, 6. (a) Hvussu ávirkaði tað Jesus at síggja familju og vinir hjá Lazarusi syrgja? (b) Hví er tað ein troyst at vita, hvussu Jesus hevur tað, tá ið onkur doyr?

7, 8. Hví vildi Marta ikki, at steinurin skuldi rullast burtur? Hvat gjørdi Jesus?

segði: 'Takið steinin burtur.' Marta helt tó ikki hetta vera eitt gott hugskot, tí líkið av Lazarusi hevði longu ligið í grøvini í fýra dagar. (Jóhannes 11:39) Hon visti ikki, hvat Jesus ætlaði sær at gera.

8 Steinurin bleiv rullaður burtur, og Jesus rópti: „Lazarus, kom út!" Tað, sum Marta og Maria nú sóu, var heilt ófatiligt. „Tá kom hin deyði út, bundin við líkverju um føtur og hendur." (Jóhannes 11:43, 44) Lazarus var á lívi! Nú kundi hann aftur vera saman við familju og vinum. Tey kundu klemma hann og práta við hann. Jesus hevði reist Lazarus upp frá deyðum. Eitt satt undur!

„GENTA, REIS TEG UPP!"

9 Var tað í egnari megi, at Jesus reisti menniskju upp frá deyðum? Nei, áðrenn Jesus reisti Lazarus upp, bað hann til Jehova, og Jehova gav honum megina til at reisa Lazarus upp. **(Les Jóhannes 11:41, 42.)** Lazarus var ikki tann einasti, sum fekk eina uppreisn. Í Bíbliuni hoyra vit til dømis um eina 12 ára gamla gentu, sum var sera sjúk. Pápi hennara, sum æt Jairus, var heilt frá sær sjálvum. Hansara einasta barn var um at doyggja, og hann bønaði Jesus um at grøða hana. Meðan hann stóð og tosaði við Jesus, komu nakrir menn og søgdu: „Dóttir tín er deyð; hví ómakar tú Meistaran longur!" Men Jesus segði við Jairus: „Óttast ikki, trúgv bert, so skal hon verða frísk!" Og so fór hann við Jairusi heim. Sum teir nærkaðust húsunum, sá og hoyrdi Jesus fólk gráta. Hann segði við tey:

9, 10. (a) Hvør gav Jesusi megi at reisa menniskju upp frá deyðum? (b) Hví er tað ein troyst at lesa um tey, sum fingu eina uppreisn?

„Grátið ikki! Hon er ikki deyð, hon svevur!“ Mamman og pápin hava sikkurt hugsað um, hvat Jesus meinti við. Jesus segði við øll fólkini, at tey skuldu fara av stað, og so bað hann foreldrini koma við sær inn í rúmið, har lítla dóttir teirra lá. Jesus tók í hondina á henni og segði: „Genta, reis teg upp!“ Gentan reisti seg upp og fór at ganga. Hugsa tær, hvussu glað foreldrini blivu! Jesus hevði reist dóttur teirra upp frá deyðum. (Markus 5:22-24, 35-42; Lukas 8:49-56) Hvørja ferð tey sóu dóttur sína eftir hetta, blivu tey mint á, hvat Jehova og Jesus høvdu gjørt fyri tey.*

10 Men øll tey, sum Jesus reisti upp frá deyðum, doyðu aftur seinni. Var tað so til onga nyttu, at hann gjørdi tað? Nei, als ikki. Hesar frásøgurnar í Bíbliuni geva okkum vón. Jehova vil gjarna geva teimum, sum eru deyð, lívið aftur, og hann fer eisini at gera tað.

HVAT KUNNU VIT LÆRA?

11 Bíblian sigur: „Hini deyðu vita einki.“ (Prædikarin 9:5) Og soleiðis var tað eisini hjá Lazarusi. Jesus segði, at tað var sum, at Lazarus bara hevði sovið. (Jóhannes 11:11) Tá ið Lazarus lá í grøvini, visti hann als einki.

12 Nógv sóu tað, tá ið Jesus reisti Lazarus upp. Sjálvt fíggindar Jesusar vistu, at hann hevði gjørt hetta

* Fleiri frásøgur eru í Bíbliuni um nøkur, sum blivu reist upp frá deyðum. Tað vóru bæði ung og gomul, menn og kvinnur, ísraelsfólk og fremmand. Nakrar av frásøgunum eru at finna her: 2. Kongabók 4:32-37; 13:20, 21; Lukas 7:11-17; Ápostlasøgan 9:36-42; 20:7-12.

11. Hvat lærir Prædikarin 9:5 okkum um Lazarus?
12. Hvussu vita vit, at Lazarus bleiv reistur upp frá deyðum?



Elisa reisti ein drong
upp frá deyðum.
– 2. Kongabók 4:32-37

Pætur ápostul reisti
eina kvinnu, sum æt
Dorkas, upp frá deyðum.
– Ápostlasøgan 9:36-42

Hugsa tær, hvussu glað
øll vórðu, tá ið Lazarus
fekk lívið aftur!
– Jóhannes 11:38-44

undrið. Lazarus var á lívi, og tað prógvaði, at undriið var farið fram. (Jóhannes 11:47) Nógv fólk komu at vitja Lazarus, og tey fóru at trúgva upp á, at tað var Gud, sum hevði sent Jesus. Fíggindarnir hjá Jesusi blivu illir um hetta, og tí ætlaðu teir at drepa bæði Jesus og Lazarus. – Jóhannes 11:53; 12:9-11.

13 Jesus segði, at „øll tey, sum eru í grøvunum“, skulu fáa eina uppreisn. (Jóhannes 5:28) Øll, sum Jehova goymir í sínum minni, verða livandi aftur. Men um Jehova skal kunna reisa onkran upp frá deyðum, má hann minnast alt um tann persónin. Ger hann virkuliga tað? Hugsa um hetta: Milliardir av stjørnum eru í alheiminum, og Bíblian sigur, at Jehova veit, hvussu hvør einasta stjørna eitur. **(Les Esaias 40:26.)** Tá ið hann minnist, hvussu allar stjørnurnar eita, minnist hann sjálvandi eisini alt um tey, sum hann fer at reisa upp frá deyðum. Jehova hevur skapt alt, so vit kunnu vera vís í, at hann hevur megi at geva teimum deyðu lívið aftur.

14 Ein trúfastur tænari hjá Jehova, sum æt Job, ivaðist ikki í, at tey deyðu fáa lívið aftur. Hann spurdi: „Táið maður doyr, livnar hann tá upp aftur!“ Og so segði hann við Jehova: „Tú skuldi tá rópt, og eg skuldi svarað, Tær skuldi *longst eftir* handaverki Tínum.“ Job visti altso, at Jehova *gleðir seg til* at geva teimum deyðu lívið aftur. – Job 14:13-15.

15 Hvørjar kenslur vekur tað í tær, at tey deyðu kunnu fáa lívið aftur? Tað er sanniliga ein stór troyst

---

13. Hvussu vita vit, at Jehova er førur fyri at geva teimum deyðu lívið aftur?
14, 15. Hvat læra orðini hjá Job okkum um uppreisnina?

at vita, at Jehova gleðir seg til at reisa fólk upp frá deyðum. Men tú hugsar kanska: 'Hvussu við mínari familju og vinfólkum, sum eru deyð, fáa tey eisini eina uppreisn?' Bíblian vísir, hvør fær eina uppreisn, og hvar tey skulu liva. Tað fara vit at kanna nærri.

'TEY SKULU HOYRA RØDD HANSARA OG KOMA FRAM'

16 Tey, sum blivu vakt upp frá deyðum á Bíbliunnar døgum, kundu aftur vera saman við familju og vinum her á jørðini. Soleiðis fer tað eisini at vera í framtíðini, bara uppaftur betri. Hvussu tá? Tey, sum fáa lívið aftur her á jørðini, fáa møguleika at liva í allar ævir. Og heimurin verður eisini heilt øðrvísi, enn hann er í dag. Hvørki kríggj, kriminalitetur ella sjúka fer at vera til.

17 Hvør fær eina uppreisn? Jesus segði, at *'øll* tey, sum eru í grøvunum, skulu hoyra rødd Hansara, og koma fram'. (Jóhannes 5:28, 29) Og í Opinberingini 20:13 stendur: „Havið gav aftur hini deyðu, sum í tí vóru; og deyðin og deyðaríkið góvu aftur hini deyðu, sum í teimum vóru." Ja, milliardir av menniskjum verða livandi aftur. Paulus ápostul segði eisini, at „uppreisn verður, bæði av rættvísum og órættvísum". **(Les Ápostlasøguna 24:15.)** Hvat vil tað siga?

18 Tey rættvísu eru millum annað nøkur, sum tilbóðu Jehova, langt áðrenn Jesus kom niður á jørðina.

---

16. Hvussu verður lívið hjá teimum, sum fáa eina uppreisn her á jørðini?
17. Hvør fær eina uppreisn?
18. Hvørji eru tey rættvísu, sum fáa eina uppreisn?

Til dømis verða Nóa, Ábraham, Sára, Móses, Rutt og Ester millum tey, sum fáa eina uppreisn og skulu liva aftur her á jørðini. Tú kanst lesa um nøkur av teimum í 11. kapitli í Hebrearabrævinum. Hvat við trúføstum tænarum hjá Jehova, sum doyggja nú á døgum? Teir hoyra eisini til tey rættvísu, sum fáa eina uppreisn.

Í paradísinum verða tey deyðu reist upp og sleppa at vera saman við sínum kæru aftur

19 Tey órættvísu eru øll tey menniskjuni, sum ikki høvdu møguleika at læra Jehova at kenna, áðrenn tey doyðu. Men Jehova hevur ikki gloymt tey. Hann fer at reisa tey upp frá deyðum og geva teimum møguleika at læra um hann og at tæna honum.

20 Vil tað siga, at øll, sum eru deyð, fáa eina uppreisn? Nei. Jesus segði, at tey, sum eru í Gehenna, ikki skuldu fáa lívið aftur. Gehenna verður umsett „helviti“ í teimum føroysku bíbliutýðingunum. (Lukas 12:5) Hvør ger av, um eitt menniskja fær lívið aftur ella ikki? Jehova hevur givið Jesusi myndugleika at vera „dómari yvir livandi og deyðum“, men hann er sjálvur tann hægsti dómarin. (Ápostlasøgan 10:42) Jehova fer ikki at reisa tey upp, sum eru ónd og ikki vilja broyta seg. – Les endagrein 19.

NØKUR FÁA LÍV Í HIMLI

21 Bíblian sigur eisini, at nøkur menniskju fáa lív í himli. Tá ið tey verða reist upp frá deyðum, fáa tey ikki fysiskar kroppar, men blíva andaskapningar.

22 Jesus var tann fyrsti, sum fekk eina sovorðna uppreisn. (Jóhannes 3:13) Tríggjar dagar eftir at Jesus bleiv dripin, gav Jehova honum lívið aftur. (Sálmur 16:10; Ápostlasøgan 13:34, 35) Men Jesus fekk ikki ein fysiskan kropp. Pætur ápostul greiddi frá, at Jesus „leið deyðan í holdinum, men varð gjørdur livandi í andanum“. (1. Pætursbræv 3:18) Jesus fekk lív sum ein veldigur andaskapningur. (1. Korintbræv 15:3-6)

---

19. Hvørji eru tey órættvísu, og hvønn møguleika fáa tey?
20. Hvørji fáa ikki eina uppreisn?
21, 22. (a) Hvat vil tað siga at blíva reistur upp til lív í himli? (b) Hvør var tann fyrsti, sum bleiv reistur upp til lív í himli?

Men Bíblian sigur, at hann ikki skuldi vera tann einasti, sum fekk eina sovorðna uppreisn.

23 Beint áðrenn Jesus doyði, segði hann við sínar trúføstu lærisveinar: „Eg fari burtur at gera tykkum stað til reiðar.“ (Jóhannes 14:2) Hetta merkir, at nøkur av teimum, sum fylgdu Jesusi, skuldu vera saman við honum í himli. Hvussu nógv? Jesus segði, at tað bara vóru nøkur fá. Hann nevndi tey eitt ’lítið fylgi’. (Lukas 12:32) Jóhannes ápostul segði, akkurát hvussu stórt talið var. Hann slapp at síggja Jesus standa á Zionsfjalli í himli saman við 144.000. – Opinberingin 14:1.

24 Nær skuldu tey 144.000 verða reist upp? Bíblian sigur, at tað skuldi vera aftan á, at Jesus var farin at ráða sum kongur í himli. (1. Korintbrævv 15:23) Og nú hevur Jesus verið kongur í eina tíð, so tey flestu av teimum 144.000 eru longu reist upp til lív í himli. Tey, sum eru eftir á jørðini av teimum 144.000, verða reist upp til himmals í tí løtuni, tey doyggja. Men flestøll menniskju, sum eru deyð, fáa eina uppreisn einaferð í framtíðini og skulu liva í einum paradísi her á jørðini.

25 Jehova fer heilt skjótt at fría menniskjuni undan deyðanum, og deyðin verður ikki til longur! **(Les Esaias 25:8.)** Vit hava lært, at nøkur skulu liva í himli. Men hvat skulu tey gera har? Í Bíbliuni stendur, at tey skulu ráða saman við Jesusi í eini ríkisstjórn. Tann næsti kapittulin snýr seg um ta stjórnina.

23, 24. Hvat er ’lítla fylgið’, sum Jesus tosaði um, og hvussu nógv eru við í tí?
25. Hvat snýr næsti kapittulin seg um?

1 JEHOVA BEINIR FYRI DEYÐANUM

„Hin síðsti fíggindin, ið til einkis verður gjørdur, er deyðin.“– 1. Korintbræv 15:26

Hvørja troyst gevur Bíblian okkum, tá ið onkur doyr?

2. Korintbræv 1:3, 4
Tá ið onkur í familjuni ella ein góður vinur doyr, kunnu vit føla okkum púra hjálparleys. Bíblian gevur okkum troyst.

Esaias 25:8; 26:19
Jehova hevur vald at beina fyri deyðanum. Hann fer enntá at geva teimum, sum eru deyð, lívið aftur.

2 VIT KUNNU LÍTA Á, AT TEY DEYÐU FÁA LÍVIÐ AFTUR

„Genta, Eg sigi tær: Reis teg upp!“– Markus 5:41

Hví kunnu vit líta á, at tey deyðu fáa lívið aftur?

Jóhannes 11:1-44
Jesus reisti Lazarus upp.

Markus 5:22-24, 35-42
Jesus reisti eina lítla gentu upp.

Jóhannes 11:41, 42
Jehova gav Jesusi megi at reisa deyð upp.

Jóhannes 12:9-11
Nógv sóu Jesus reisa fólk upp frá deyðum. Sjálvt fíggindarnir hjá Jesusi vistu, at hann var førur fyri tí.

3 JEHOVA FER AT GEVA MILLIARDUM AV MENNISKJUM LÍVIÐ AFTUR

„Tú skuldi ... rópt, og eg skuldi svarað, Tær skuldi longst eftir handaverki Tínum.“– Job 14:13-15

Hvørji fáa lívið aftur?

Jóhannes 5:28, 29
Øll, sum Jehova goymir í sínum minni, fáa lívið aftur.

Ápostlasøgan 24:15
Bæði rættvís og órættvís fáa lívið aftur.

Esaias 40:26
Jehova minnist, hvussu hvør einasta stjørna eitur, so tað er einki fyri hjá honum at minnast alt um tey, sum hann fer at reisa upp frá deyðum.

4 NØKUR FÁA LÍV Í HIMLI

„Eg fari burtur at gera tykkum stað til reiðar.“– Jóhannes 14:2

Hvørji verða reist upp til lív í himli?

1. Pætursbræv 3:18
Jesus var tann fyrsti, sum bleiv reistur upp til lív í himli.

Lukas 12:32
Jesus segði, at bara nøkur fá av teimum, sum fylgja honum, fáa lív í himli.

Opinberingin 14:1
Jehova hevur útvalt 144.000, sum skulu liva í himli.

HVAT ER GUDS RÍKI?

NÓGV kenna bønina faðirvár. Jesus brúkti hesa bønina til at vísa lærisveinunum, hvussu teir skuldu biðja. Hvat skuldu teir biðja um? Og hví hevur henda bønin týdning fyri okkum?

2 Jesus segði: „Tit [skulu] biðja soleiðis: ’Faðir okkara, Tú, sum ert í Himli! Heilagt verði navn Títt! Komi ríki Títt! Verði vilji Tín, sum í Himli, so á jørðini við!’“ **(Les Matteus 6:9-13.)** Hví lærdi Jesus okkum at biðja um hesi trý tingini? – Les endagrein 20.

3 Vit hava longu lært, at Gud eitur Jehova. Og vit hava eisini hoyrt, hvat Guds ætlan er við okkum menniskjum og jørðini. Men hvat meinti Jesus við, tá ið hann segði: „Komi ríki Títt“? Í hesum kapitlinum fáa vit at vita, hvat Guds ríki er, hvat tað fer at gera, og hvussu tað fer at halga Guds navn.

HVAT ER GUDS RÍKI?

4 Guds ríki er ein stjórn, sum Jehova hevur stovnað í himli, og hann hevur valt Jesus til kong. Jesus er „Kongur konganna og Harri harranna“. (1. Timoteusarbræv 6:15) Jesus hevur størri vald enn allir

1. Hvørja kenda bøn fara vit at kanna nærri?
2. Nevn trý týðandi ting, sum Jesus lærdi okkum at biðja um.
3. Hvat fáa vit at vita um Guds ríki í hesum kapitlinum?
4. Hvat er Guds ríki, og hvør er kongur har?

stjórnarleiðarar á jørðini til samans, og hann er førur fyri at gera alt í heiminum gott aftur.

5 Fjøruti dagar eftir at Jesus var reistur upp frá deyðum, fór hann aftur til himmals. (Ápostlasøgan 2:33) Seinni setti Gud hann til kong í sínum ríki. Guds ríki hevur sæti í himli og skal ráða yvir jørðini. (Opinberingin 11:15) Tí sigur Bíblian um Guds ríki, at tað er eitt 'himmalskt ríki'. – 2. Timoteusarbræv 4:18.

6 Bíblian sigur, at Jesus er tann einasti, 'sum hevur ódeyðiligleika', og tí er hann mektigari enn allir kongar á jørðini. (1. Timoteusarbræv 6:16) Allir stjórnarleiðarar doyggja fyrr ella seinni, men Jesus fer ongantíð at doyggja. Alt tað góða, Jesus fer at gera fyri okkum, varir í allar ævir.

7 Í Bíbliuni stendur, at Jesus fer at vera ein góður og rættvísur kongur: „Á Honum skal hvíla Andi HARRANS, Andi vísdóms og vits, Andi ráðs og styrki, Andi kunnskapar og ótta HARRANS. Hugur Hansara skal standa til at óttast HARRAN; Hann skal ikki døma eftir tí, ið eygu Hansara síggja, og ikki skifta rætt eftir tí, ið oyru Hansara hoyra; nei, Hann skal við rættvísi døma tey, ið lítið hava at týða.“ (Esaias 11:2-4) Kundi tú hugsað tær ein sovorðnan kong?

8 Jehova hevur útvalt nakrar menn og kvinnur, sum skulu ráða saman við Jesusi í Guds ríki. Til døm-

---

5. Hvar hevur Guds ríki sæti, og hvørjum skal tað ráða yvir?
6, 7. Hví er Jesus ein betri kongur enn allir kongar á jørðini?
8. Hvussu vita vit, at Jesus ikki skal ráða einsamallur?

is segði Paulus ápostul við Timoteus: „Halda vit út, skulu vit eisini ráða við Honum.“ (2. Timoteusarbræv 2:12) Hvussu nógv skulu vera kongar saman við Jesusi?

9 Í 7. kapitli lósu vit, at Jóhannes ápostul fekk eina sjón og sá Jesus sum kong í himli saman við 144.000 øðrum kongum. Hvørji eru tey 144.000? Jóhannes sigur: „Hetta eru teir, ið fylgja lambinum [Jesusi], hvar tað so fer. Hesir eru keyptir frá menniskjunum.“ **(Les Opinberingina 14:1, 4.)** Tey 144.000 eru trúføst kristin, sum Gud hevur valt at vera kongar saman við Jesusi yvir jørðini. Tá ið tey doyggja, verða tey reist upp til lív í himli. (Opinberingin 20:6) Í fyrstu øld fór Jehova undir at velja tey, sum skuldu hoyra til tey 144.000.

10 Tá ið vit hugsa um, hvørji Jehova hevur valt at ráða í sínum ríki, er tað týðiligt, at hann er góður við okkum. Jesus verður ein góður kongur, tí hann skilur, hvussu tað er at vera menniskja. Paulus segði, at Jesus følir við okkum og hevur „samkenslu við veikleikum okkara“. Hann „er freistaður [ella royndur] í øllum á sama hátt sum vit“. (Hebrearabrævið 4:15; 5:8) Og tey 144.000 vita, hvussu tað er at stríðast við ófullkomileika og sjúku. So vit kunnu vera vís í, at bæði Jesus og tey 144.000 skilja, hvussu vit hava tað, og kunnu seta seg inn í okkara trupulleikar.

---

9. Hvussu nógv skulu ráða saman við Jesusi? Nær fór Jehova undir at velja tey út?
10. Hví er tað gott, at Jesus og tey 144.000 skulu ráða yvir menniskjunum?

HVAT FER GUDS RÍKI AT GERA?

11 Jesus lærdi sínar lærisveinar at biðja um, at Guds vilji skuldi henda í himli og á jørð. Hví skuldu teir biðja um, at Guds vilji skuldi henda í himli? Vit lósu í 3. kapitli, at Satan Djevulin gjørdi uppreistur ímóti Jehova. Eftir hetta loyvdi Jehova Satani og teimum óndu einglunum at verða verandi í himli í eina tíð. So tað vóru ikki øll í himli, sum gjørdu Guds vilja. Vit hoyra meira um hetta í 10. kapitli.

12 Opinberingin kapittul 12 vísir, at Jesus, stutt eftir at hann var blivin kongur í Guds ríki, skuldi fara í bardaga ímóti Satani. **(Les Opinberingina 12:7-10.)*** Í ørindi 10 verða tvær týðandi hendingar nevndar: Guds ríki byrjar at ráða við konginum Jesusi á odda, og Satan verður kastaður úr himli niður á jørðina. Sum vit fara at lesa seinni, er hetta longu hent.

13 Hugsa tær, hvussu glaðir teir trúføstu einglarnir vóru, táið Satan og hansara óndu einglar blivu blakaðir út úr himli. Í Bíbliuni stendur: „Fegnist tí, tit Himlar og tit, sum í teimum búgva!“ (Opinberingin 12:12) Nú er friður og einleiki í himli, tí øll, sum eru har, gera Guds vilja.

---

* Mikael er eitt annað navn fyri Jesus. Fleiri upplýsingar eru at finna í endagrein 23.

---

11. Hví lærdi Jesus sínar lærisveinar at biðja um, at Guds vilji skuldi henda í himli?
12. Hvørjar tvær týðandi hendingar verða nevndar í Opinberingini 12:10?
13. Hvat hendi í himli, táið Satan bleiv blakaður út?

14 Men støðan er ein heilt onnur her á jørðini. Nógv ræðuligt hendir, 'tí Djevulin er komin niður til okkara í stórari vreiði, tí hann veit, at tíðin, hann hevur, er so stutt'. (Opinberingin 12:12) Satan er rasandi. Hann er blakaður út úr himli, og hann veit, at hann skjótt ikki sleppur at ávirka menniskjuni longur. Og tí roynir hann alt, hann er mentur, at skapa trupulleikar, sorg og pínu á allari jørðini.

15 Men Guds ætlan við jørðini er ikki broytt. Hann vil, at menniskju skulu hava tað gott og búgva í einum paradísi á jørðini í allar ævir. (Sálmur 37:29) Men hvussu fer Guds ríki at syrgja fyri tí?

16 Í Dániel 2:44 stendur: „Á teimum døgum ið hesir kongar eru, skal Gud Himmalsins grunda ríki, sum í allar ævir ikki skal verða lagt í oyði, og hetta ríki skal ongari aðrari tjóð verða givið í hendur; tað skal sora øll hini ríkini og forkoma teimum, men sjálvt skal tað standa fast í allar ævir." Hvat lærir hetta bíbliuørindið okkum um Guds ríki?

17 Fyri tað fyrsta læra vit, at Guds ríki skuldi byrja at ráða „á teimum døgum ið hesir kongar eru". Tað merkir, at aðrar ríkisstjórnir framvegis skuldu vera á jørðini, tá ið Guds ríki fór at ráða. Fyri tað annað læra vit, at Guds ríki skuldi halda fram at ráða í allar ævir, og at eingin onnur stjórn skuldi koma í staðin fyri tað. Og fyri tað triðja skuldi kríggj vera millum Guds ríki og allar aðrar ríkisstjórnir. Guds ríki fer at vinna

---

14. Hvat er hent á jørðini, síðani Satan bleiv blakaður út úr himli?
15. Hvat er Guds ætlan við jørðini?
16, 17. Hvat lærir Dániel 2:44 okkum um Guds ríki?

og verður tað einasta ríkið, sum skal ráða yvir jørðini. Tá fáa vit ta bestu stjórnina, sum hugsast kann!

18 Hvat fer at henda beint áðrenn kríggið millum Guds ríki og ríkisstjórnirnar á jørðini? Teir óndu einglarnir fara at villleiða „kongarnar á øllum jarðarríki“ og „savna teir saman til bardagan hin stóra dag Guds hins Alvalda“. Í hesum krígnum, sum verður rópt Harmageddon, fara heimsins leiðarar altso at berjast ímóti Guds ríki. – Opinberingin 16:14, 16; les endagrein 10.

19 Hví hava vit brúk fyri Guds ríki? Vit kunnu nevna tríggjar grundir. Ein er, at vit øll eru syndarar og tí blíva gomul og doyggja. Men tá ið Guds ríki ræður, fáa vit ævigt lív. Í Jóhannes 3:16 stendur: „So elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív.“

20 Ein onnur grund til, at vit hava brúk fyri Guds ríki, er, at vit liva í einum heimi, sum er fullur av óndskapi. Nógv lúgva, snýta og eru ómoralsk, og vit kunnu ikki forða teimum í tí. Men Gud fer at beina fyri teimum í Harmageddon, um tey ikki vilja broyta seg. **(Les Sálm 37:10.)** Ein triðja grund til, at vit hava brúk fyri Guds ríki, er, at eingin stjórn á jørðini hevur verið før fyri at loysa trupulleikarnar í heiminum. Nógvar ríkisstjórnir eru korruptar og kúga sínar borgarar, og tær hava als ongan áhuga í at hjálpa

---

18. Hvussu eitur kríggið millum Guds ríki og ríkisstjórnirnar á jørðini?

19, 20. Hví hava vit brúk fyri Guds ríki?

Síðani Satan og hansara óndu einglar blivu blakaðir út úr himli, eru viðurskiftini í heiminum versnað. Men skjótt fer Gud at broyta alt til tað betra

menniskjum at læra Gud at kenna. Bíblian sigur tað, sum tað er: „Eitt menniskja ræður yvir øðrum, tí til vanlukku.“ – Prædikarin 8:9.

21 Eftir Harmageddon fer Guds ríki at syrgja fyri, at Guds vilji hendir á jørðini. Til dømis fer tað at beina fyri Satani og hansara óndu einglum. (Opinberingin 20:1-3) Við tíðini fer eingin at blíva sjúkur og doyggja. Loysigjaldið ger, at øll trúføst menniskju sleppa at liva um ævir í einum paradísi her á jørðini. (Opinberingin 22:1-3) Guds ríki fer eisini at halga Guds navn. Tað merkir, at tá ið Guds ríki ræður, fara øll menniskju at vísa Jehova og hansara navni virðing. – Les endagrein 21.

NÆR BLEIV JESUS KONGUR?

22 Jesus bleiv ikki kongur, meðan hann var á jørðini, tí hann lærdi sínar lærisveinar at biðja um, at Guds ríki skuldi *koma.* Ríkið var altso ikki stovnað enn. Jesus bleiv heldur ikki kongur, beint tá ið hann kom aftur til himmals. Tað síggja vit út frá tí, sum

---

21. Hvussu fer Guds ríki at syrgja fyri, at Guds vilji hendir á jørðini?
22. Hvussu vita vit, at Jesus hvørki bleiv kongur, meðan hann var á jørðini, ella beint sum hann kom aftur til himmals?

Guds ríki fer at syrgja fyri,
at Guds vilji hendir á jørðini

bæði Pætur og Paulus skrivaðu, eina tíð eftir at Jesus var blivin reistur upp. Teir vístu á, at profetiin í Sálmi 110:1 var um Jesus. Í profetiini sigur Jehova: „Set Teg við høgru hond Mína, inntil Eg leggi fíggindar Tínar sum skammul fyri føtur Tínar!“ (Ápostlasøgan 2:32-35; Hebrearabrævið 10:12, 13) Hvussu leingi skuldi Jesus bíða, áðrenn Jehova fór at gera hann til kong?

23 Síðst í 19. øld fór ein lítil bólkur av kristnum monnum at kanna Bíbliuna gjølla, og teir komu fram til, at 1914 skuldi vera eitt serligt ár. Síðani 1914 hava viðurskiftini í heiminum víst, at teir høvdu rætt. Tað var tað árið, Jesus bleiv kongur. (Sálmur 110:2) Skjótt aftaná bleiv Satan kastaður niður á jørðina, og nú hevur hann bara stutta tíð eftir. (Opinberingin 12:12) Bíblian rópar hetta stutta tíðarskeiðið fyri teir síðstu dagarnar. Liva vit í tí tíðini nú? Nær fer Guds ríki at fullføra Guds vilja her á jørðini? Tað fáa vit svar upp á í næsta kapitli. – Les endagrein 22.

---

23. (a) Nær bleiv Jesus kongur? (b) Hvat fáa vit svar upp á í næsta kapitli?

1 GUDS RÍKI ER EIN STJÓRN

„Komi ríki Títt! Verði vilji Tín, sum í Himli, so á jørðini við!“– Matteus 6:9-13

Hvat er Guds ríki?

Opinberingin 11:15
Guds ríki er ein stjórn, sum fer at ráða yvir jørðini úr himli.

1. Timoteusarbræv 6:15
Jesus er kongurin í Guds ríki.

Opinberingin 14:1, 4
144.000 menniskju skulu ráða saman við Jesusi úr himli.

Hebrearabrævið 4:15; 5:8
Jesus og tey 144.000 skilja, hvussu vit hava tað, og vita, hvørjar trupulleikar vit stríðast við.

2 JESUS VERÐUR TANN BESTI KONGURIN, VIT KUNNU HUGSA OKKUM

„Hann skal við rættvísi døma tey, ið lítið hava at týða.“– Esaias 11:4

Hví er Jesus tann besti kongurin?

1. Timoteusarbræv 6:16
Allir stjórnarleiðarar á jørðini doyggja fyrr ella seinni, men Jesus fer ongantíð at doyggja. Alt tað góða, Jesus fer at gera fyri okkum, varir í allar ævir.

Esaias 11:2-4
Jesus fær gjørt nógv meira enn nakar stjórnarleiðari á jørðini. Hann hevur størri vald enn allir stjórnarleiðarar til samans. Hann er rættvísur og hevur samkenslu við okkum.

3 GUDS RÍKI FER AT SYRGJA FYRI, AT GUDS VILJI HENDIR

„Gud Himmalsins [skal] grunda ríki, sum í allar ævir ikki skal verða lagt í oyði.“– Dániel 2:44

Hvat hevur Guds ríki longu gjørt? Hvat fer tað at gera í framtíðini?

Opinberingin 12:7-12
Tá ið Jesus var blivin kongur í 1914, kastaði hann Satan út úr himli og niður á jørðina. Og tí er so nógv neyð, sorg og pína um alla jørðina.

Prædikarin 8:9; Opinberingin 16:16
Í Harmageddon fer Guds ríki at beina fyri øllum øðrum ríkisstjórnum.

Sálmur 37:10
Gud fer at beina fyri óndum menniskjum, sum ikki vilja broyta seg.

Opinberingin 22:1-3
Tá ið Guds ríki ræður yvir jørðini, fer eingin at blíva sjúkur og doyggja. Øll fara at vísa Gudi virðing.

KAPITTUL 9

ER HEIMSINS ENDI NÆR?

HEVUR tú nakrantíð hugt at tíðindunum og hugsað: 'Nú kann tað ikki blíva verri'? Tað hendir so nógv ónt í heiminum, at nøkur halda, at heimsins endi er nær. Er hann tað? Ber tað til at fáa nakað at vita um framtíðina? Ja, men vit menniskju eru ikki før fyri at spáa um hana. Tað er bara Jehova Gud, sum veit, hvat fer at henda við okkum og jørðini í framtíðini, og hann fortelur okkum tað í Bíbliuni. – Esaias 46:10; Jákupsbrævið 4:14.

2 Tá ið vit lesa um heimsins enda í Bíbliuni, er talan ikki um, at sjálv jørðin verður oyðiløgd, men at allur óndskapur fær ein enda. Jesus segði, at Guds ríki skuldi ráða yvir jørðini. (Lukas 4:43) Lærisveinarnir hjá honum vóru forvitnir og spurdu hann: „Sig okkum, nær hetta fer at henda! Og hvat er tekinið fyri, at Tú kemur, og endi er á tíðini?“ (Matteus 24:3) Jesus nevndi ikki nakran ávísan dag, men hann fortaldi teimum, hvat fór at henda beint áðrenn heimsins enda. Tað, sum hann fortaldi, hendir beint nú.

3 Hesin kapittulin vísir á nøkur prógv fyri, at heimsins endi er nær. Men fyrst skulu vit hoyra um ein bardaga, sum fór fram í himli, tí tað kann hjálpa okkum at skilja, hví so nógv ræðuligt hendir á jørðini.

---

1. Hvar kunnu vit fáa nakað at vita um framtíðina?
2, 3. Hvat vildu lærisveinarnir hjá Jesusi vita, og hvat svaraði Jesus?

BARDAGI Í HIMLI

4 Vit hoyrdu í 8. kapitli, at Jesus bleiv kongur í himli í 1914. (Dániel 7:13, 14) Í Opinberingini fáa vit meira at vita um, hvat hendi tá. Har stendur: „Bardagi varð í Himli: Mikael [Jesus] og einglar hansara tóku at berjast við drekan [Satan], og drekin og einglar hansara bardust.“ Satan og hansara óndu einglar taptu bardagan og blivu kastaðir niður á jørðina. Hugsa tær, hvussu glaðir einglarnir í himli vóru! Men Bíblian sigur, at tað fór at fáa ræðuligar avleiðingar fyri menniskjuni á jørðini. Hví tað? Jú, Djevulin er í øðini, „tí hann veit, at tíðin, hann hevur, er so stutt“. – Opinberingin 12:7, 9, 12.

5 Djevulin roynir at gera tað so trupult hjá menniskjunum sum gjørligt. Hann er rasandi, tí skjótt fer Gud at forða honum í at gera meira um seg á jørðini. Men latið okkum venda aftur til tað, sum Jesus segði skuldi henda á teimum síðstu døgunum. – Les endagreinarnar 23 og 24.

TEIR SÍÐSTU DAGARNIR

6 **Kríggj.** Jesus segði: „Tjóð skal reisast móti tjóð, og ríki móti ríki.“ (Matteus 24:7) Sambært eini fráboðan frá Worldwatch Institute eru meira enn 100 milliónir menniskju deyð í kríggi síðani 1914,

---

4, 5. (a) Hvat hendi í himli, stutt eftir at Jesus bleiv kongur? (b) Hvussu skuldi tað sambært Opinberingini 12:12 vera á jørðini, eftir at Satan var blakaður út úr himli?

6, 7. Hvussu er tað, sum Jesus segði um kríggj og hungursneyð, gingið út?

og tað eru fleiri enn nakrantíð áður. Tey 100 árini millum ár 1900 og ár 2000 doyðu tríggjar ferðir fleiri í kríggi enn tey undanfarnu 1.900 árini til samans! Tað er ræðuligt at hugsa um alla ta neyð og pínu, sum kríggj hevur verið orsøk til.

7 Hungursneyð. Jesus segði: „Hungur ... skal vera.“ (Matteus 24:7) Vit hava ongantíð framleitt so nógvan mat sum nú, og kortini fáa nógv ikki nokk at eta. Hví? Antin tí tey ikki hava ráð til at keypa mat, ella tí tey ikki eiga nakra jørð at dyrka. Umleið 10 prosent av heimsins íbúgvum liva í ekstremum fátækradømi. Sambært Heimsheilsustovninum, WHO, er hungursneyð høvuðsorsøkin til, at milliónir av børnum doyggja hvørt ár.

8 Jarðskjálvtar. Jesus segði: „Stórir jarðskjálvtar skulu vera.“ (Lukas 21:11) Hvørt ár hoyra vit um nógvar stór-

8, 9. Hvussu er tað, sum Jesus segði um jarðskjálvtar og sjúkur, gingið út?

ar jarðskjálvtar. Síðani ár 1900 eru fleiri enn tvær milliónir fólk deyð í jarðskjálvtum. Og sjálvt um tað ber til at uppdaga jarðskjálvtar fyrr enn áður, krevja teir framvegis nógv offur.

9 **Sjúkur.** Jesus segði, at pestur skuldi vera. Ræðuligar sjúkur skuldu herja og drepa nógv. (Lukas 21:11) Hóast nógvar sjúkur kunnu viðgerast vegna læknafrøðilig framstig, eru framvegis nógvar sjúkur, sum ikki kunnu grøðast. Hvørt ár doyggja milliónir av krabbameini, tuberklum og øðrum sjúkum. Aftrat tí hevur mann tey seinastu 40 árini uppdagað meira enn 30 nýggjar sjúkur, og fleiri av teimum kunnu ikki grøðast.

HVUSSU SKULDU MENNISKJUNI VERA Á SÍÐSTU DØGUM?

10 Í 2. Timoteusarbrævi 3:1-5 stendur: „Á síðstu døgum skulu koma torførar tíðir.“

---

10. Hvussu gongur 2. Timoteusarbræv 3:1-5 út í dag?

Síðani verður sagt, hvussu menniskju skuldu vera á teimum síðstu døgunum. Tey skuldu ...

- vera sjálvsøkin
- elska pengar
- vera ólýðin ímóti foreldrum
- vera óálítandi
- vera kærleiksleys í familjuni
- mangla sjálvstamarhald
- vera illsint og harðlig
- elska at stuttleika sær og njóta lívið í staðin fyri at elska Gud
- lata sum um, at tey elska Gud, men nokta at akta hann

11 Eru fólk soleiðis, har sum tú býrt? Tað er í hvussu er nakað, sum eyðkennir nógv fólk um allan heimin. Men Gud fer skjótt at gera nakað við tað. Hann lovar: „Táið gudleys [ella tey óndu] grógva sum grasið, og øll tey, ið gera órætt, blóma, so er tað bert til at verða oydd við alla.“ – Sálmur 92:8.

---

11. Hvat fer at henda við teimum óndu sambært Sálmi 92:8?

GÓÐ TÍÐINDI

12 Bíblian sigur, at heimurin skuldi vera fullur av óndskapi, sorg og pínu á teimum síðstu døgunum. Men hon sigur eisini, at nakað gott skuldi henda.

13 Fólk skuldu skilja Bíbliuna. Dániel profetur skrivaði, hvat skuldi henda á teimum síðstu døgunum. Hann segði: „Kunnskapurin skal verða stórur.“ (Dániel 12:4) Jehova skuldi lata sítt fólk skilja Bíbliuna betur enn nakrantíð áður. Hetta hevur hann serliga gjørt síðani 1914. Hann hevur til dømis lært okkum, hvørja ætlan hann hevur við jørðini og menniskjunum, hvønn týdning hansara navn hevur, hvat loysigjaldið er, hvat hendir, tá ið vit doyggja, og at tey deyðu fáa lívið aftur. Vit hava lært, at tað bara er Guds ríki, sum kann loysa heimsins trupulleikar. Og vit hava fingið at vita, hvat skal til fyri at blíva lukkuligur, og hvussu vit kunnu gleða Gud. Hvat hava nógv gjørt, eftir at tey hava fingið alt hetta at vita? Svarið er at finna í nøkrum, Jesus segði um teir síðstu dagarnar. – Les endagreinarnar 21 og 25.

14 Tey góðu tíðindini skuldu boðast um allan heimin. Tá ið Jesus tosaði um teir síðstu dagarnar, segði hann: „Hetta evangelium ríkisins skal verða prædikað um alt jarðarríki.“ (Matteus 24:3, 14) Tey góðu tíðindini um Guds ríki verða boðað í umleið 240 londum og á meira enn 1.000 málum. Jehova vitni úr „øllum tjóðum, ættum, fólkum og tungumálum“ fortelja øðrum, hvat Guds ríki er, og hvat

---

12, 13. Hvat hevur Jehova lært okkum?
14. Hvar verða tey góðu tíðindini um Guds ríki boðað, og hvør er tað, sum boðar?

tað fer at gera fyri mannaættina. Og tey gera tað ókeypis. (Opinberingin 7:9) Jesus segði eisini, at nógv fóru at hata tey og forfylgja teimum, men einki kann steðga boðanararbeiðinum. – Lukas 21:17.

HVAT FERT TÚ AT GERA?

15 Heldur tú, at vit liva á teimum síðstu døgunum? Nógvar profetiir um teir síðstu dagarnar ganga út beint nú. Jehova fer skjótt at steðga boðanararbeiðinum, og „tá skal endin koma“. (Matteus 24:14) Hvat er „endin“? Tað er Harmageddon, Guds kríggj, sum beinir fyri øllum óndskapi. Jesus og hansara einglar fara at beina fyri øllum teimum, sum ikki vilja akta Jehova og Jesus. (2. Tessalonikabrævi 1:6-9) Eftir tað kunnu Satan og hansara óndu einglar ikki ávirka menniskjuni longur. Men tey, sum akta Gud og stuðla hansara ríki, sleppa at uppliva, at øll Guds lyfti ganga út. – Opinberingin 20:1-3; 21:3-5.

16 Hesin heimurin, sum Satan hevur ræði yvir, verður skjótt burtur. Tí er tað sera umráðandi, at vit spyrja okkum sjálv: ’Hvat eigi eg at gera?’ Jehova vil, at tú skalt læra hann betur at kenna. Tí mást tú taka tað at kanna Bíbliuna í álvara. (Jóhannes 17:3) Jehova vitni hava møti hvørja viku. Har fáa vit hjálp til at skilja Bíbliuna. Royn at koma á hesi møtini so ofta sum gjørligt. **(Les Hebrearabrævið 10:24, 25.)** Finnur tú út av, at tú noyðist at gera nakrar broytingar,

---

15. (a) Hvat sannførir teg um, at vit liva á teimum síðstu døgunum? (b) Hvat fer at henda við teimum, sum akta Jehova, og teimum, sum ikki akta hann?
16. Hvat er neyðugt at gera, nú tá ið endin er so nær?

„Hetta evangelium ríkisins skal verða prædikað um alt jarðarríki.“
– Matteus 24:14

mást tú endiliga gera tað. Tí so verður títt vinalag við Jehova enn betri. – Jákupsbrævið 4:8.

17 Paulus ápostul greiddi frá, at hesin óndi heimurin verður fyribeindur, tá ið tey flestu ikki vænta tað. Hann segði faktiskt, at dagurin skuldi koma líka óvæntað „sum tjóvur á nátt“. (1. Tessalonikabræv 5:2) Jesus segði, at nógv fóru at vera líkaglað við prógvini, sum vísa, at vit liva á síðstu døgum. Hann segði: „Eins og var á døgum Nóa, so skal eisini verða, táið Menniskjasonurin kemur [ella á síðstu døgum]. Sum tey á døgunum fyri flóðina ótu og drukku, giftust og giftu, líka til tann dag Nóa fór inn í ørkina, og tey vitstu av ongum [góvu ikki gætur, *NW*], fyrrenn flóðin kom og tók tey øll – so skal eisini vera, táið Menniskjasonurin kemur.“ – Matteus 24:37-39.

18 Jesus ávaraði okkum og segði, at vit skuldu ansa okkum fyri „nógvari njótan og drykkjuskapi og stúran fyri hesum lívi“, so endin ikki skuldi koma á okkum knappliga „eins og snerra“. Hann segði, at endin skuldi koma „á øll tey, sum á allari jørðini búgva“. Og so legði hann aftrat: „Vakið hvørja stund og biðið, so tit kunnu vera før fyri at sleppa undan øllum hesum, ið koma skal, og verða standandi fyri Menniskjasyninum!“ (Lukas 21:34-36) Hví er tað so umráðandi at lurta eftir hesi ávaringini frá Jesusi? Tí óndi heimurin hjá Satani skjótt verður fyribeindur. Bara tey, sum Jehova og Jesus góðkenna, yvirliva endan og sleppa at liva í allar ævir á jørðini. – Jóhannes 3:16; 2. Pætursbræv 3:13.

---

17. Hví kemur heimsins endi óvart á tey flestu?
18. Hvørja ávaring gav Jesus okkum?

1 JEHOVA SIGUR OKKUM, HVAT FER AT HENDA Í FRAMTÍÐINI

„Frá upphavi kunngeri [Eg] endan og langt frammanundan tað, ið enn ikki hevur hent.“– Esaias 46:10

Hvat vita vit um teir síðstu dagarnar?

Dániel 7:13, 14
Jesus bleiv kongur í himli í 1914.

Matteus 24:3-14
Jesus segði, at torførar tíðir skuldu koma.

Opinberingin 12:7-9, 12
Stutt eftir at Jesus bleiv kongur, blakaði hann Satan út úr himli og niður á jørðina. Satan er rasandi, tí hann veit, at Gud skjótt fer at forða honum í at gera meira um seg.

2 VIT LIVA Á SÍÐSTU DØGUM

„Hvat er tekinið fyri, at ... endi er á tíðini?“– Matteus 24:3

Hevur tú sæð bíbliuprofetiir ganga út?

Matteus 24:7; Lukas 21:11
Kríggj, hungursneyð, jarðskjálvtar og sjúkur herja meira enn nakrantíð áður.

2. Timoteusarbræv 3:1-5
Paulus ápostul skrivaði, hvussu fólk skuldu vera á síðstu døgum.

Dániel 12:4
Gud hjálpir sínum fólki at skilja Bíbliuna betur enn nakrantíð áður.

Matteus 24:14
Tey góðu tíðindini um Guds ríki verða boðað um alla jørðina.

3 VÍS, AT TÚ VILT GERA GUDS VILJA

„Dagur Harrans kemur sum tjóvur á nátt.“– 1. Tessalonikabræv 5:2

Hvat mást tú gera, nú tá ið endin er so nær?

Jóhannes 17:3
Tak tað at kanna Bíbliuna í álvara.

Hebrearabrævið 10:24, 25
Kom á møtini hjá Jehova vitnum.

Jákupsbrævið 4:8
Ger neyðugu broytingarnar fyri at fáa tættari samband við Gud.

Lukas 21:34-36
Lat einki koma ímillum teg og títt vinalag við Jehova.

KAPITTUL 10

EINGLAR OG ILLIR ANDAR

JEHOVA vil, at vit skulu kenna hansara familju, sum millum annað fevnir um einglarnar. Í Bíbliuni verða teir róptir „synir Guds“. (Job 38:7) Hvat gera einglarnir? Hvussu hava teir hjálpt menniskjum fyrr í tíðini? Og kunnu teir hjálpa okkum í dag? – Les endagrein 8.

2 Fyri fyrst er tað gott at vita, hvar einglarnir koma frá. Tá ið Jehova hevði skapt Jesus, „bleiv alt annað í himlinum og á jørðini skapt“. (Kolossebrævið 1:16, *NW*) So einglarnir blivu eisini skaptir. Bíblian sigur, at teir eru fleiri hundrað milliónir í tali. – Sálmur 103:20; Opinberingin 5:11.

3 Í Bíbliuni stendur, at Jehova skapti einglarnar, áðrenn hann skapti jørðina. Teir tæntu Jehova sum ein stór familja. Hvussu ávirkaði tað einglarnar, tá ið teir sóu jørðina fyri fyrstu ferð? Jobs bók sigur okkum, at teir blivu øgiliga glaðir. – Job 38:4-7.

EINGLARNIR HJÁLPA GUDS FÓLKI

4 Einglarnir hava altíð verið góðir við menniskjuni, og teir hava altíð verið áhugaðir í at vita, hvørja ætlan Jehova hevur við jørðini og menniskjunum. (Orðtøkini 8:30, 31; 1. Pætursbræv 1:11, 12) Teir blivu uttan iva ógvuliga keddir, tá ið Ádam og Eva gjørdu uppreistur. Og teir mugu vera enn meira keddir nú, tá ið teir

1. Hví er tað gott at vita nakað um einglarnar?
2. Hvar koma einglarnir frá? Hvussu nógvir einglar eru til?
3. Hvat sigur Job 38:4-7 okkum um einglarnar?
4. Hvussu vita vit, at einglarnir eru góðir við menniskjuni?

síggja, at tey flestu menniskjuni hava vent Jehova bakið. Men tá ið onkur vendir við og velur at tæna Gudi, verða teir glaðir. (Lukas 15:10) Einglarnir eru sera góðir við tey, sum tæna Gudi. Jehova brúkar einglar til at hjálpa sínum tænarum her á jørðini og til at verja teir. (Hebrearabrævið 1:14) Latið okkum kanna nøkur dømi.

„Gud mín sendi eingil Sín
og læt aftur munn leyvanna.“
– Dániel 6:23

5 Jehova sendi tveir einglar til Lot og hansara familju fyri at hjálpa teimum at flýggja, tá ið býirnir Sodoma og Gomorra skuldu leggjast í oyði. (1. Mósebók 19:15, 16) Fleiri hundrað ár seinni bleiv Dániel profetur kastaður í eitt leyvubøli, men einki hendi við honum, tí Gud „sendi eingil Sín og læt aftur munn leyvanna“. (Dániel 6:23) Tá ið Pætur ápostul sat fongslaður, sendi Jehova ein eingil, sum skuldi føra hann út úr fongslinum. (Ápostlasøgan 12:6-11) Einglar hjálptu eisini Jesusi, meðan hann var á jørðini. Tað gjørdu teir millum annað, eftir at hann var blivin doyptur. (Markus 1:13) Og beint áðrenn Jesus bleiv dripin, kom ein eingil og „styrkti Hann“. – Lukas 22:43.

6 Nú á døgum vísa einglar seg ikki fyri menniskjum. Men Gud brúkar framvegis einglarnar til at hjálpa sínum tænarum. Bíblian sigur: „Eingil HARRANS tekur støðu rundan um tey, ið óttast Hann, og fríar tey út.“ (Sálmur 34:8) Hava vit veruliga brúk fyri, at nakar verjir okkum? Ja, tí vit hava sterkar fíggindar, sum vilja skaða okkum. Hvørjir eru teir? Hvar koma teir frá? Og hvussu royna teir at skaða okkum? Fyri at fáa svar upp á hesar spurningarnar mugu vit vita, hvat hendi, stutt eftir at Ádam og Eva blivu skapt.

ÓSJÓNLIGIR FÍGGINDAR

7 Í 3. kapitli lósu vit um ein eingil, sum gjørdi uppreistur ímóti Gudi og vildi ráða yvir menniskjum. Bíblian kallar hann Satan Djevulin. (Opinberingin 12:9)

---

5. Hvussu hava einglar hjálpt menniskjum?
6. (a) Hvussu vita vit, at einglar hjálpa Guds fólki í dag? (b) Hvørjar spurningar fara vit at fáa svar upp á?
7. Hvat hevur Satan klárað?

Satan vildi eisini hava onnur at gera uppreistur ímóti Gudi. Hann kláraði at lumpa Evu, og síðani tá hevur hann lumpað tey flestu menniskjuni. Men nøkur vórðu verandi trúføst móti Jehova, sum til dømis Ábel, Enok og Nóa. – Hebrearabrævið 11:4, 5, 7.

8 Á Nóa døgum gjørdu nakrir einglar uppreistur og fóru niður á jørðina at liva sum menniskju. Hví gjørdu teir tað? Bíblian sigur, at teir vildu sleppa at gifta seg við kvinnum her á jørðini. **(Les 1. Mósebók 6:2.)** Men tað var ikki rætt av teimum. (Judasarbrævið 6) Hesir óndu einglarnir vóru ógvisligir og harðligir, og tey flestu, sum livdu tá, blivu líka sum teir. Jehova valdi at beina fyri teimum óndu menniskjunum í eini vatnflóð, sum kom yvir alla jørðina. Men hann bjargaði sínum trúføstu tænarum. (1. Mósebók 7:17, 23) Hvussu við teimum óndu einglunum? Teir fóru aftur til himmals fyri at yvirliva. Bíblian rópar hesar óndu einglarnar fyri illar andar. Teir valdu at taka undir við Satani í uppreistrinum, og hann kom at ráða yvir teimum. – Matteus 9:34.

9 Av tí at teir illu andarnir høvdu gjørt uppreistur, sluppu teir ikki aftur at vera ein partur av familjuni hjá Jehova. (2. Pætursbræv 2:4) Tað ber ikki longur til hjá illum andum at broyta seg til menniskju, men teir ávirka og lumpa framvegis allan heimin. (Opinberingin 12:9; 1. Jóhannesarbræv 5:19) Latið okkum finna út av, hvussu teir illu andarnir eru førir fyri at lumpa so nógv. – **Les 2. Korintbræv 2:11.**

---

8. (a) Hvat var tað, sum gjørdi, at nakrir einglar blivu til illar andar? (b) Hvat gjørdu teir illu andarnir fyri at yvirliva vatnflóðina?
9. (a) Hvat hendi við illu andunum, tá ið teir fóru aftur til himmals? (b) Hvørjum fara vit at hyggja nærri at nú?

HVUSSU LUMPA ILLIR ANDAR MENNISKJU?

10 Teir illu andarnir lumpa menniskju upp á nógvar ymiskar mátar. Tá ið fólk fáast við tað yvirnatúrliga, koma tey í veruleikanum í samband við teir illu andarnar, antin beinleiðis ella gjøgnum onkran annan, sum til dømis eina spákonu ella ein andamanara. Bíblian sigur, at vit skulu halda okkum langt burtur frá øllum, sum hevur við illar andar og okkultismu at gera. (Galatiabrævið 5:19-21) Hví sigur hon tað? Tí eins og ein veiðimaður brúkar eina fellu til at fanga djór í, royna teir illu andarnir at lokka okkum í eina fellu, so teir kunnu fáa vald á okkum. – Les endagrein 26.

11 Eitt, sum illu andarnir brúka, er spádómur. Tað vil siga at royna at fáa nakað at vita um framtíðina ella tað ókenda gjøgnum yvirnatúrligar kreftir. Summi gera hetta við at lesa horoskop, brúka eina krystallkúlu ella spáa í lógvanum á fólki. Nógv halda, at sovorðið er púra óskyldigt, men tað er tað ikki. Tað er sera vandamikið. Bíblian vísir, at illir andar og tey, sum spáa, samstarva. Í Ápostlasøguni 16:16-18 lesa vit um ein spádómsanda, sum hjálpti einari gentu at spáa um framtíðina. Men tá ið Paulus ápostul hevði rikið andan út, misti gentan henda førleikan.

12 Teir illu andarnir brúka eisini nakað annað til at lumpa fólk. Teir royna at fáa okkum at halda, at tey deyðu liva víðari í einum øðrum heimi, at vit kunnu tosa við tey, og at tey kunnu skaða ella hjálpa okkum. Onkur, sum hevur mist ein kæran, fer kanska til ein

---

10. Hvussu lumpa teir illu andarnir menniskju?
11. Hvat er spádómur, og hví skulu vit halda okkum frá tí?
12. (a) Hví er tað vandamikið at royna at tosa við tey deyðu? (b) Hví halda Jehova vitni seg frá ymiskum siðum?

HVUSSU KANST TÚ VERJA TEG?

- Slepp tær av við alt, sum hevur við gand, illar andar og tað yvirnatúrliga at gera
- Les og kanna Bíbliuna
- Bið til Jehova

andamanara, sum sigur seg kunna tosa við tey deyðu. Andamanarin sigur kanska okkurt áhugavert um tann deyða og hermir kanska enntá eftir røddini hjá viðkomandi. (1. Sámuelsbók 28:3-19) Fólk kunnu halda, at tað er tann deyði, sum tosar, men sannleikin er, at tey fáa samband við teir illu andarnar. Nógvir siðir í sambandi við jarðarferðir byggja eisini á tankan um, at tey deyðu liva víðari. Jehova vitni taka ikki lut í slíkum siðum, og tí kann tað koma fyri, at vinir og skyldfólk kritisera tey, háða tey ella nokta at hava nakað við tey at gera. Men tey deyðu liva ikki víðari nakrastaðni. Tað ber ikki til at tosa við tey, og tey kunnu hvørki skaða ella hjálpa okkum. (Sálmur 115:17) So ver varin. Royn ongantíð at fáa samband við tey deyðu ella teir illu andarnar, og halt teg burtur frá øllum, sum hevur við tað okkulta at gera. – **Les 5. Mósebók 18:10, 11;** Esaias 8:19.

13 Teir illu andarnir royna ikki bara at lumpa fólk, men eisini at gera tey bangin. Satan og hansara illu andar vita, at Gud skjótt fer at forða teimum í at gera meira um seg á jørðini, og tí eru teir meira ógvisligir og harðligir enn nakrantíð. (Opinberingin 12:12, 17) Men túsundtals menniskju, sum fyrr ræddust teir illu andarnar, ræðast teir ikki longur. Hvat hjálpti teimum at sleppa av við hesa ræðsluna?

VINN STRÍÐIÐ ÍMÓTI ILLU ANDUNUM

14 Bíblian vísir, hvussu vit kunnu verja okkum ímóti illu andunum, og hvussu vit kunnu gera okkum leys av teimum. Í býnum Efesus vóru nøkur, sum fingust við

13. Hvat hevur eydnast hjá nógvum, sum fyrr ræddust teir illu andarnar?
14. Hvussu kunnu vit gera okkum leys av teimum illu andunum?

tað okkulta, áðrenn tey blivu kristin. Hvussu gjørdu tey seg leys av tí? Bíblian sigur: „Mong av teimum, ið høvdu fingist við at ganda, bóru saman bøkur sínar og brendu tær upp fyri eygum alra.“ (Ápostlasøgan 19:19) Av tí at tey gjarna vildu vera kristin, beindu tey fyri øllum bókum, sum tey áttu um gand. Nakað líknandi krevst í dag. Øll, sum vilja tæna Jehova, mugu sleppa sær av við alt, sum hevur við okkultismu at gera. Tað fevnir um alt, sum fær gand, illar andar og tað yvirnatúrliga at virka óskyldigt og spennandi. Tað kundi til dømis verið bøkur, bløð, horoskop, filmar, tónleikur, spøl ella plakatir. Og tað er eisini galdandi fyri amulettir og ymiskt annað, sum fólk hava uppi á sær fyri at verja seg ímóti tí ónda. – 1. Korintbræv 10:21.

15 Nøkur ár eftir at tey í Efesus høvdu brent bøkurnar um gand, skrivaði Paulus, at tey skuldu *halda fram* at stríðast ímóti ’andaheri óndskaparins’. (Efesusbrævið 6:12) Illu andarnir royndu altso framvegis at skaða tey, sjálvt um tey høvdu brent bøkurnar. Tey noyddust at gera nakað meira. Paulus segði við tey: „Lyftið ... skjøld trúarinnar! Við honum skulu tit vera ment at sløkkja allar gløðandi pílar hins ónda.“ (Efesusbrævið 6:16) Eins og ein skjøldur kann verja ein hermann í bardaga, kann okkara trúgv verja okkum. Um vit líta á, at Jehova kann verja okkum, verða vit før fyri at standa ímóti Satani og illu andunum. – Matteus 17:20.

16 Hvussu kunnu vit fáa sterkari trúgv? Vit mugu lesa í Bíbliuni hvønn dag og læra at líta á, at Jehova verjir okkum. Tá ið vit líta fult og fast á Jehova, eru

---

15. Hvat annað kunnu vit gera fyri at standa ímóti Satani og illu andunum?
16. Hvussu kunnu vit fáa sterkari trúgv?

Satan og illu andarnir ikki førir fyri at skaða okkum. – 1. Jóhannesarbrævv 5:5.

17 Hvat meira skuldu tey kristnu í Efesus gera? Har í býnum var tað vanligt, at fólk fingust við okkultismu. Og tí segði Paulus, at tey skuldu biðja ofta. (Efesusbrævið 6:18) Tey máttu biðja aftur og aftur til Jehova, tí tey høvdu brúk fyri hansara verju. Hvussu við okkum? Vit liva eisini í einum heimi, sum er fullur av okkultismu. Tí er tað umráðandi, at vit biðja til Jehova um hjálp, og at vit brúka hansara navn, tá ið vit biðja. **(Les Orðtøkini 18:10.)** Halda vit fram at biðja Jehova frelsa okkum frá Satani, svarar hann okkara bønum. – Sálmur 145:19; Matteus 6:13.

18 Lykilin til at standa ímóti Satani og illu andunum er at sleppa sær av við alt, sum hevur við okkultismu at gera, og at líta á, at Jehova verjir okkum. Vit skulu ikki ræðast teir. **(Les Jákupsbrævið 4:7, 8.)** Jehova er nógv sterkari enn illu andarnir. Hann straffaði teir á Nóa døgum, og í framtíðini fer hann at beina fyri teimum. (Judasarbrævið 6) Minst til, at vit ikki eru einsamøll í stríðnum. Jehova brúkar sínar einglar til at verja okkum. (2. Kongabók 6:15-17) Við hjálp frá Jehova kunnu vit vinna bardagan ímóti Satani og illu andunum. Ivast ongantíð í tí! – 1. Pætursbrævv 5:6, 7; 2. Pætursbrævv 2:9.

19 Men tá ið Satan og illu andarnir gera so nógv ónt, hví hevur Gud so ikki beint fyri teimum enn? Tað fáa vit svar upp á í næsta kapitli.

---

17. Hvat meira kunnu vit gera fyri at verja okkum ímóti illu andunum?
18, 19. (a) Hvussu kunnu vit vinna bardagan ímóti Satani og illu andunum? (b) Hvat fáa vit svar upp á í næsta kapitli?

1 EINGLARNIR HOYRA TIL GUDS FAMILJU

„Lovið HARRANUM, tit einglar Hansara, tit veldigu í mátti.“– Sálmur 103:20

Hvat vita vit um einglarnar?

Job 38:4-7
Jehova skapti einglarnar, áðrenn hann skapti jørðina.

Opinberingin 5:11
Milliónir av einglum eru til.

1. Pætursbræv 1:11, 12
Einglar hava altíð verið áhugaðir í Guds ætlan við jørðini.

Lukas 15:10
Einglarnir eru sera góðir við tey, sum tæna Jehova.

2 EINGLARNIR HJÁLPA GUDS TÆNARUM

„Eingil HARRANS tekur støðu rundan um tey, ið óttast Hann, og fríar tey út.“– Sálmur 34:8

Hvussu vita vit, at einglar kunnu hjálpa menniskjum?

1. Mósebók 19:15, 16; Dániel 6:23; Lukas 22:43; Ápostlasøgan 12:6-11
Einglar hjálptu Lot, Dánieli, Jesusi og Pæturi.

Hebrearabrævið 1:14
Jehova brúkar framvegis einglar til at hjálpa sínum tænarum og til at verja teir.

3 ÓNDIR EINGLAR ROYNA AT SKAÐA OKKUM

„Vit skulu ikki verða dáraðir [ella lumpaðir] av Satan; tí tað, sum hann hevur í huga, eru vit ikki ókunnigir við.“– 2. Korintbrævi 2:11

Hvørjir eru illu andarnir, og hví eru teir vandamiklir?

Opinberingin 12:9
Ein eingil gjørdi uppreistur ímóti Jehova. Hann verður róptur Satan Djevulin.

1. Mósebók 6:2
Á Nóa døgum gjørdu nakrir einglar uppreistur og komu niður á jørðina.

Matteus 9:34
Teir tóku undir við uppreistrinum hjá Satani og gjørdust illir andar.

5. Mósebók 18:10, 11
Illu andarnir royna at lumpa fólk og skaða tey upp á allar møguligar mátar.

4 TÚ KANST VINNA STRÍÐIÐ ÍMÓTI SATANI OG ILLU ANDUNUM

„Standið Djevulinum ímóti, so skal hann flýggja frá tykkum!“– Jákupsbrævið 4:7

Hvussu kann Jehova hjálpa tær at standa ímóti Satani og illu andunum?

Ápostlasøgan 19:19
Slepp tær av við alt, sum fær gand, illar andar og tað yvirnatúrliga at virka óskyldigt og spennandi.

Efesusbrævið 6:16, 18
Styrk tína trúgv við at kanna Bíbliuna, og bið Jehova verja teg.

Orðtøkini 18:10
Brúka navnið hjá Jehova.

KAPITTUL 11

HVÍ HENDIR SO NÓGV ÓNT?

EIN flóðalda leggur eina heila bygd í oyði. Nakrir yvirgangsmenn spreingja eina bumbu á einum hotelli, sum er fult av gestum. Ein mamma fær krabbamein og doyr frá fimm børnum.

2 Nógv hava ilt við at skilja, hví sovorðið ræðuligt hendir. Tey undrast á, hví heimurin er so fullur av óndskapi, hatri og pínu. Undrast tú eisini?

3 Eisini tey, sum trúgva á Gud, kunnu hava ringt við at skilja, hví heimurin sær út, sum hann ger. Vit kunnu enntá lesa um sovorðnar persónar í Bíbliuni. Profeturin Habakkuk spurdi til dømis Jehova: „Hví letur Tú meg skoða óndskap, og hvussu fært Tú sjálvur sæð slíka órættvísi? Oyðing og yvirgangur standa fyri eygum mínum; av tí koma trætur, og stríð reisist upp.“ – Habakkuk 1:3.

4 Í Habakkuk 2:2, 3 lesa vit, hvussu Gud svaraði Habakkuk og samstundis lovaði, at alt skuldi blíva gott aftur. Bíblian vísir, at Jehova er sera góður við okkum menniskju. (1. Pætursbrævi 5:7) Faktiskt hatar hann óndskap og pínu nógv meira, enn vit gera. (Esaias 55:8, 9) Men hvussu ber tað so til, at tað hendir so nógv ónt í heiminum? Tað fara vit at kanna nærri nú.

1, 2. Hvat undrast nógv á?

3, 4. (a) Hvat spurdi Habakkuk um? (b) Hvussu svaraði Jehova honum?

HVÍ HENDIR SO NÓGV ÓNT?

5 Prestar og aðrir átrúnaðarligir leiðarar siga ofta, at tað er Guds vilji, tá ið okkurt ræðuligt hendir. Nakrir siga, at alt, sum hendir, er nakað, sum Gud frammanundan hevur gjørt av, og at vit ongantíð koma at skilja, hví sorgarleikir henda. Tá ið eitt barn doyr, kunnu nakrir enntá finna upp á at siga, at tað var Gud, sum tók tað, tí hann hevði brúk fyri einum eingli aftrat í himli. Men tað passar ikki. Jehova hevur ongantíð skyldina, tá ið nakað ræðuligt hendir. Bíblian sigur: „Gud ger vissuliga einki, sum er órættur, hin Alvaldi boyggir ikki rættin!“ – Job 34:12.

6 Nógv geva Gudi skyldina fyri alt tað ræðuliga, sum hendir, tí tey halda, at tað er hann, sum stýrir heiminum. Men sum vit lærdu í 3. kapitli, er tað Satan Djevulin, ið stýrir heiminum.

7 Bíblian sigur, at „allur heimurin er í valdinum hjá tí ónda“. (1. Jóhannesarbræv 5:19, *NS*) Satan, sum stýrir heiminum, er óndskapsfullur og ræðuligur. Hann „villleiðir allan heimin“. (Opinberingin 12:9) Nógv menniskju uppføra seg líka sum hann, og tað er ein av orsøkunum til, at heimurin er so fullur av lygnum, hatri og óndskapi.

8 Ein onnur orsøk er, at Ádam og Eva gjørdu uppreistur, og vit hava arvað syndina frá teimum. Tí hava menniskju lyndi til at gera tað, sum er skeivt, og at hevja seg sjálv upp. Tað gongur ofta út yvir onnur og kann føra

---

5. Hvat siga nógvir átrúnaðarligir leiðarar um sorgarleikir? Hvat lærir Bíblian?
6. Hví geva nógv Gudi skyldina fyri alt tað ræðuliga, sum hendir í heiminum?
7, 8. Hví hendir so nógv ónt í heiminum?

til kríggj, klandur og stríð. (Prædikarin 4:1; 8:9) Nakað annað, sum kann vera orsøk til, at fólk uppliva sorg og pínu, er tíð og tilvild. (Prædikarin 9:11) Til dømis kunnu tey verða fyri einum óhappi ella onkrum øðrum keðiligum, bara tí tey eru á skeivum staði ta skeivu tíðina.

9 Jehova hevur ongantíð skyldina, tá ið nakað ræðuligt hendir. Hann er ikki orsøk til kríggj, kriminalitet og kúgan. Tað er ikki Gud, sum fær jarðskjálvtar, ódnir, vatnflóðir ella aðrar náttúruvanlukkur at henda. Men tú hugsar kanska: 'Um Jehova er tann størsti í alheiminum, hví ger hann so einki fyri at steðga øllum tí ræðuliga, sum hendir?' Vit vita, at Gud er øgiliga góður við okkum, og tí má hann hava eina sera góða grund til at loyva óndskapi, sorg og pínu. – 1. Jóhannesarbræv 4:8.

HVÍ LOYVIR GUD, AT SO NÓGV ÓNT HENDIR?

10 Satan leyg fyri Ádami og Evu í urtagarðinum Eden. Hann ákærdi Gud fyri at vera ein vánaligan stjórnara og setti spurnartekn við, um hann hevði rætt til at ráða. Hann pástóð, at Gud ikki unti Ádami og Evu tað besta. Satan vildi hava tey at halda, at hann var ein betri stjórnari enn Jehova, og at tey ikki høvdu brúk fyri Gudi. – 1. Mósebók 3:2-5; les endagrein 27.

11 Ádam og Eva aktaðu ikki Jehova og gjørdu uppreistur ímóti honum. Tey hildu, at tey sjálv kundu gera av, hvat var rætt, og hvat var skeivt. Men spurningurin er: Hvussu kundi Jehova prógva, at tey fóru skeiv, og at hann veit, hvat er best fyri okkum?

---

9. Hví kunnu vit vera vís í, at Jehova hevur eina sera góða grund til at loyva óndskapi, sorg og pínu?
10. Hvat ákærdi Satan Jehova fyri?
11. Hvønn spurning mugu vit hava svar upp á?

12 Tað, sum Jehova upprunaliga ætlaði, var, at jørðin skuldi vera eitt paradís, og at eftirkomararnir hjá Ádami og Evu skuldu búgva har. Líkamikið hvat Satan fann upp á, kundi tað ikki broyta hesa ætlanina. (1. Mósebók 1:28; Esaias 55:10, 11) Tað er orsøkin til, at Jehova ikki beindi fyri Ádami og Evu beinanvegin, men læt tey fáa børn. Og tað gjørdi, at eftirkomararnir hjá Ádami og Evu fingu møguleika at velja, hvønn tey vildu hava at ráða yvir sær.

13 Tá ið Satan kom við sínum ákærum ímóti Jehova, vóru milliónir av einglum vitni til hendingina. (Job 38:7; Dániel 7:10) Tí læt Jehova Satan sleppa at stýra heiminum í eina tíð og gav honum soleiðis møguleika at prógva sínar ákærur. Og menniskjuni fingu eisini tíð til at royna ymiskar stjórnarhættir fyri at vita, um tey kláraðu seg betur uttan Gud.

14 Menniskjuni hava roynt at ráða yvir sær sjálvum í fleiri túsund ár, men tað hevur verið fullkomiliga miseydnað. Tað er púra greitt, at Satan er ein lygnari. Menniskju *hava brúk fyri* hjálp frá Gudi. Jeremias profetur hevði rætt, tá ið hann segði: „Eg veit, HARRI, at menniskjað ræður ikki sjálvt fyri vegi sínum, at ferðamaðurin er ikki mentur at stýra gongd síni!“ – Jeremias 10:23.

HVÍ HEVUR JEHOVA BÍÐAÐ SO LEINGI?

15 Hví hevur Jehova latið óndskap, sorg og pínu halda fram so leingi? Hví forðar hann ikki øllum tí ræðuliga, sum hendir? Tað hevur kravt tíð at prógva, at stýrið hjá

12, 13. (a) Hví beindi Jehova ikki fyri Ádami og Evu beinanvegin? (b) Hví hevur Jehova latið Satan og menniskju ráða?
14. Hvat hevur tíðin prógvað?
15, 16. (a) Hví hevur Jehova latið óndskap, sorg og pínu halda fram so leingi? (b) Hví hevur Jehova ikki loyst trupulleikarnar, sum Satan hevur verið orsøk til?

Satani er miseydnað. Menniskju hava roynt allar hugsandi stjórnarhættir, men einki hevur riggað. Sjálvt um tey hava gjørt stór framstig innan vísindi og tøkni, so hevur ongantíð verið so nógv órættvísi, fátækradømi, kriminalitetur og kríggj sum nú. Vit menniskju duga ikki at stýra uttan hjálp frá Gudi.

16 Jehova hevur ikki loyst trupulleikarnar, sum Satan hevur verið orsøk til upp gjøgnum tíðina. Um hann hevði gjørt tað, hevði hann í veruleikanum hjálpt Satani og stuðlað hansara stýri. Og tað hevði Jehova sjálvandi ongantíð gjørt. Haraftrat kundi tað givið menniskjunum ta fatan, at tey vóru før fyri at ráða sjálv. Men tað er ein lygn. Jehova lýgur ongantíð og kundi ikki funnið upp á at stuðlað nøkrum, sum byggir á eina lygn. – Hebrearabrævið 6:18.

17 Uppreisturin ímóti Gudi hevur verið orsøk til nógva sorg og pínu. Kann tað nakrantíð gerast gott aftur? Ja, alt ber til hjá Jehova. Hann leggur upp í leikin, so skjótt sum tað er prógvað, at allar ákærurnar frá Satani eru falskar. Aftan á tað fer hann at gera jørðina til eitt paradís, soleiðis sum hann ætlaði tað frá fyrstan tíð. „Øll tey, sum eru í grøvunum," verða vakt aftur til lívs. (Jóhannes 5:28, 29) Eingin fer nakrantíð at blíva sjúkur ella doyggja. Jehova fer at lata Jesus „gera verk Djevulsins til einkis", og tað merkir millum annað, at alt tað ónda, sum Satan hevur verið orsøk til, verður gjørt gott aftur. (1. Jóhannesarbræv 3:8) Inntil tað hendir, hava vit møguleika fyri at læra Jehova at kenna og velja hansara stýri, og tað eru vit sera takksom fyri. **(Les 2. Pætursbræv 3:9.)** Tá ið vit hava tað ringt, kunnu vit vera vís í,

---

17, 18. Hvat fer Jehova at gera við alt tað ónda, sum Satan hevur verið orsøk til?

at hann hjálpir okkum at halda út. – **Les 1. Korintbræv 10:13.**

18 Jehova hevur givið okkum ein frían vilja, og hann tvingar ongan at tæna sær. Latið okkum vita, hvat tað hevur at siga fyri okkum, at vit hava fingið hesa dýrabaru gávuna.

HVUSSU FERT TÚ AT BRÚKA TÍN FRÍA VILJA?

19 Tann fríi viljin er ein gáva frá Jehova, sum ger okkum nógv øðrvísi enn djórini. Tey fylgja sínum instinktum, men vit kunnu velja, hvussu vit vilja liva okkara lív, og um vit vilja tæna Jehova. (Orðtøkini 30:24-28) Vit eru ikki sum robottar. Vit sleppa at velja, hvussu vit vilja vera, hvørjum vit vilja vera saman við, og hvat vit vilja brúka okkara lív til. Tað er týðiligt, at Jehova vil, at vit skulu hava eitt gott lív.

20 Jehova vil, at vit skulu elska hann. (Matteus 22:37, 38) Ein pápi verður sera glaður, tá ið sonurin ella dóttirin heilt spontant sigur: ’Eg elski teg, babba!’ Soleiðis hevur Jehova tað eisini; hann vil ikki, at vit bara elska hann, tí vit føla, at vit noyðast. Hann hevur givið okkum møguleika at velja, um vit vilja tæna honum ella ikki. Satan, Ádam og Eva valdu at vraka Jehova. Hvussu fert *tú* at brúka tín fría vilja?

21 Brúka hann til at tæna Jehova. Tað hava fleiri milliónir longu gjørt, og soleiðis hava tey víst, at tey vraka Satan. (Orðtøkini 27:11, Dahl/Viderø) Hvat kanst tú gera fyri at sleppa at uppliva ein heim uttan óndskap, sorg og pínu? Tann spurningurin verður svaraður í næsta kapitli.

---

19. Hvat hevur Jehova givið okkum? Hví eru vit takksom fyri tað?
20, 21. Hvat er tað besta, tú kanst gera?

1 TAÐ ER IKKI GUDS SKYLD, AT FÓLK HAVA TAÐ RINGT

„Gud ger vissuliga einki, sum er órættur, hin Alvaldi boyggir ikki rættin!“– Job 34:12

Hví hendir so nógv ónt í heiminum?

1. Jóhannesarbræv 5:19, *NS*
Tað er Satan Djevulin, sum stýrir heiminum.

Prædikarin 8:9
Menniskju gera nógv ónt, sum gongur út yvir onnur.

Prædikarin 9:11
Viðhvørt uppliva fólk okkurt ræðuligt, tí tey eru á skeivum staði ta skeivu tíðina.

1. Pætursbræv 5:7
Jehova elskar menniskjuni, og hann hatar at síggja tey pínast.

2 SATAN SETTI SPURNARTEKN VIÐ, UM JEHOVA HEVÐI RÆTT TIL AT RÁÐA

„Gud veit, at ... eygu tykkara [verða] latin upp, so at tit verða sum Gud og kenna gott og ilt!“– 1. Mósebók 3:5

Hví beindi Jehova ikki fyri Satani beinanvegin?

1. Mósebók 3:2-5
Satan ákærdi Gud fyri at vera ein vánaligan stjórnara. Satan vildi hava menniskjuni at halda, at tey sjálv kundu gera av, hvat var rætt, og hvat var skeivt.

Job 38:7
Milliónatals einglar vóru hjástaddir, tá ið Satan ákærdi Jehova.

3 SATAN FÓR SKEIVUR

’Menniskjað er ikki ment at stýra gongd síni!’– Jeremias 10:23

Hví hevur óndskapur, sorg og pína plágað menniskjuni so leingi?

Esaias 55:9
Menniskju hava roynt nógvar ymiskar stjórnarhættir, men tey eru ikki før fyri at ráða yvir jørðini uttan hjálp frá Gudi.

2. Pætursbræv 3:9
Jehova er tolin og hevur givið okkum tíð at læra hann at kenna og møguleika at velja hann at ráða yvir okkum.

1. Jóhannesarbræv 3:8
Jehova fer at lata Jesus gera alt tað ónda, sum Satan hevur verið orsøk til, gott aftur.

4 VEL AT TÆNA JEHOVA

„Ver tú vísur, sonur mín, ... so at eg kann svara honum, sum háðar meg.“– Orðtøkini 27:11, Dahl/Viderø

Hví tvingar Jehova okkum ikki at tæna sær?

Orðtøkini 30:24-28
Djór fylgja instinktum, men Jehova hevur givið okkum menniskjum ein frían vilja. Vit kunnu velja, um vit vilja tæna honum ella ikki.

Matteus 22:37, 38
Jehova vil, at vit skulu tæna honum, tí vit elska hann.

KAPITTUL 12

HVUSSU KANST TÚ BLÍVA VINUR VIÐ GUD?

HVUSSU heldur tú, at ein vinur skal vera? Tær hevði helst dámt, at hann var umhugsin og hevði aðrar góðar eginleikar. Og so skuldi tað sjálvandi eisini verið ein, sum tú hevði tað gott saman við.

2 Í Bíbliuni lesa vit, at Jehova Gud var vinur við fleiri menniskju. Ábraham var ein av vinunum hjá Jehova. (Esaias 41:8; Jákupsbrævið 2:23) Jehova var eisini sera góður við Dávid. Hann segði um Dávid, at hann var ein maður eftir hansara hjarta. (Ápostlasøgan 13:22) Og Dániel var ein, sum Jehova 'elskaði stórliga'. – Dániel 9:23.

3 Hvussu blivu Ábraham, Dávid og Dániel vinir við Jehova? Nakað, sum Jehova segði við Ábraham, hjálpir okkum at svara spurninginum. Hann segði: „Tú lurtaði eftir Mær!“ (1. Mósebók 22:18) Jehova vil altso, at hansara vinir skulu vera eyðmjúkir og gera tað, sum hann biður teir. Jehova valdi enntá eina heila tjóð sum sínar vinir. Hann segði við tjóðina Ísrael: „Hoyrið rødd Mína! So skal Eg vera Gud tykkara, og tit skulu vera fólk Mítt.“ (Jeremias 7:23) Tú kanst eisini blíva vinur við Jehova, um tú lurtar eftir honum.

JEHOVA HJÁLPIR SÍNUM VINUM

4 Ein veldigur fíggindi roynir at forða okkum í at

1, 2. Hvørjir vóru millum vinirnar hjá Jehova?
3. Hvussu blivu Ábraham, Dávid og Dániel vinir við Jehova?
4, 5. Hvussu hjálpir Jehova sínum vinum?

blíva vinir við Jehova. Men Jehova er á okkara síðu og verjir okkum. **(Les Sálm 55:23.)** Bíblian sigur, at hann leitar eftir møguleikum „at hjálpa teimum, sum heilhjartað eru við Honum“. (2. Krønikubók 16:9) Og í Sálmi 32:8 lovar Jehova sínum vinum: „Eg skal læra teg, og vísa tær vegin, ið tú skalt ganga, Eg skal leggja tær ráð við at hyggja á teg.“

5 Vinirnir hjá Jehova tæna honum av heilum hjarta. Teir svíkja hann ikki, heldur ikki tá ið trupulleikar stinga seg upp. Teir føla seg líka tryggar sum Dávid, ið skrivaði: „HARRIN ... er við høgru lið Mína, Eg vikist ikki!“ (Sálmur 16:8; 63:9) Hvussu roynir Satan at forða okkum í at blíva vinir við Gud?

SATAN ÁKÆRIR MENNISKJU

6 Í 11. kapitli lærdu vit, at Satan ákærdi Jehova fyri at vera ein vánaligan stjórnara. Hann pástóð, at Jehova leyg, og at tað var órættvíst, at hann ikki læt Ádam og Evu sjálv sleppa at gera av, hvat var rætt, og hvat var skeivt. Jobs bók vísir, at Satan ákærir allar vinirnar hjá Jehova. Satan sigur, at teir ikki tæna Jehova, tí teir elska hann, men bara tí teir sjálvir kunnu fáa nakað burturúr. Hann pástendur enntá, at hann kann fáa *ein og hvønn* at venda Gudi bakið. Latið okkum vita, hvat vit kunnu læra av Job, og hvussu Jehova hjálpti honum.

7 Hvør var Job? Tað var ein maður, sum livdi fyri umleið 3.600 árum síðani, og hann var nakað heilt serligt í Guds eygum. Job hevði djúpa virðing fyri Jehova, og hann hataði tað, sum var ónt. (Job 1:8) Ja, Job var vinur við Jehova.

---

6. Hvat pástendur Satan um menniskjuni?
7, 8. (a) Hvat helt Jehova um Job? (b) Hvat segði Satan um Job?

8 Satan pástóð, at Job bara tænti Jehova fyri sjálvur at fáa nakað burturúr. Hann segði við Jehova: „Tú hevur jú laðað garð um hann og hús hansara og alt, ið hann eigur, heilt rundanum! Handaverk hansara hevur Tú signað, og fylgi hansara breiða seg um landið. Men rætt bert út hondina og nem við alt, ið hann eigur – vita, um hann bannar Tær ikki beint upp í eyguni!“ – Job 1:10, 11.

9 Satan segði, at Job bara tænti Jehova, tí hann fekk nakað afturfyri. Satan segði eisini, at hann kundi fáa Job at halda uppat at tæna Jehova. Jehova visti sjálvandi, at tað ikki passaði. Men hann gav Satani loyvi til at royna motivið hjá Job, so tað kundi prógvast, at Job tænti Jehova, tí hann elskaði hann.

SATAN LOYPUR Á JOB

10 Fyrst syrgdi Satan fyri, at øll djórini hjá Job blivu dripin ella stolin. Síðani drap hann næstan allar tænararnar hjá honum. Job misti alt, hann átti. Og at enda drap Satan tey tíggju børnini hjá Job í einum stormi. Men Job var framvegis trúfastur móti Jehova. Bíblian sigur: ’Í øllum hesum syndaði Job ikki, og hann lastaði ikki Gud fyri tað, ið hendi.’ – Job 1:12-19, 22.

11 Satan gavst ikki so. Hann bjóðaði Gudi av og segði: „Rætt út hondina og nem við bein og hold hansara – vita, um hann bannar Tær ikki beint upp í eyguni!“ Síðani syrgdi Satan fyri, at Job fekk eina ræðuliga sjúku. (Job 2:5, 7) Men Job varð verandi trúfastur móti Je-

---

9. Hvat gav Jehova Satani loyvi til at gera?
10. Hvussu leyp Satan á Job, og hvussu ávirkaði tað Job?
11. (a) Hvat annað gjørdi Satan við Job? (b) Hvussu ávirkaði tað Job?

hova. Hann segði: „Inntil eg doyggi, lati eg ikki tað taka frá mær, at eg eri sakleysur [trúfastur, *NW*].“ – Job 27:5.

12 Job visti einki um ákærurnar hjá Satani, ella hví so nógv ræðuligt hendi í hansara lívi. Hann helt, at tað var Jehova, sum var orsøkin til tað. (Job 6:4; 16:11-14) Men hóast tað, var hann trúfastur móti Jehova. Nú var eingin ivi longur. Job tænti ikki Jehova, tí hann fekk nakað afturfyri, men tí hann elskaði hann. Alt tað, sum Satan hevði pástaðið, var lygn!

13 Job hevði onga hóming av, hvat gekk fyri seg í himli, men kortini var hann trúfastur móti Jehova og prógvaði, at Satan var óndur. Jehova gleddist um, at Job var ein so góður og trúfastur vinur, og hann lønti honum fyri tað. – Job 42:12-17.

SATAN ÁKÆRIR TEG

14 Vit kunnu læra nógv av tí, sum hendi við Job. Satan sigur, at vit bara tæna Jehova, tí vit fáa nakað afturfyri. Í Job 2:4 pástendur Satan: „Alt, ið *maður* eigur, letur hann fyri lív sítt!“ Satan ákærir altso *allar* menn og kvinnur fyri at vera sjálvsøkin, ikki bara Job. Fleiri hundrað ár eftir at Job var deyður, helt Satan fram at háða Jehova og ákæra hansara tænarar. Tað sæst millum annað av tí, sum Jehova sigur í Orðtøkunum 27:11 (Dahl/Viderø): „Ver tú vísur, sonur mín, og gleð hjarta mítt, so at eg kann svara honum, sum háðar meg.“

15 Tú kanst velja at tæna Jehova og blíva hansara vinur. Soleiðis ert tú við til at prógva, at Satan er ein lygnari. Tað er ein álvarslig avgerð at velja at tæna Jehova,

---

12. Hvussu prógvaði Job, at Satan var ein lygnari?
13. Hvat førdi tað til, at Job var trúfastur?
14, 15. Hvat ákærir Satan øll menniskju fyri?

Jehova lønti Job, tí Job var
ein góður og trúfastur vinur

og kanska noyðist tú at gera stórar broytingar fyri at blíva hansara vinur, men tað er tann besta avgerðin, tú kanst taka! Satan pástendur, at vit fara at venda Gudi bakið, so skjótt sum trupulleikar stinga seg upp í okkara lívi. Hann roynir alt, hann er mentur, at fáa okkum at svíkja Gud. Hvussu ger hann tað?

16 Satan roynir upp á allar møguligar mátar at forða okkum í at blíva vinir við Gud. Hann loypur á sum ein „brølandi leyva og leitar eftir, hvørjum hann fær gloypt“. (1. Pætursbræv 5:8) Eitt, sum kann følast sum eitt álop, er, um familja, vinir ella onnur royna at fáa teg at halda uppat at kanna Bíbliuna og fylgja tí, sum tú lærir.* (Jóhannes 15:19, 20) Satan kann eisini finna upp á at lata sum um, at hann er ein „eingil ljóssins“. Tað merkir, at hann roynir at lumpa okkum og fáa okkum at vera ólýðin ímóti Jehova. (2. Korintbræv 11:14) Satan roynir eisini at taka mótið frá okkum við at fáa okkum at føla, at Jehova ikki kann brúka okkum. – Orðtøkini 24:10.

FYLG BOÐUNUM FRÁ JEHOVA

17 Tá ið vit fylgja boðunum frá Jehova, prógva vit, at Satan er ein lygnari. Hvat kann hjálpa okkum at akta Jehova? Bíblian sigur: „Tú skalt elska HARRAN Gud tín av øllum hjarta tínum, av allari sál tíni og av allari

* Hetta merkir ikki, at Satan stýrir teimum fólkunum, sum royna at fáa teg at halda uppat at kanna Bíbliuna. Men Satan er „gudurin hjá hesum heimi“, og „allur heimurin er í valdinum hjá [honum]“. Tí er tað ikki so løgið, at nøkur fólk royna at fáa okkum at halda uppat at tæna Jehova. – 2. Korintbræv 4:4; 1. Jóhannesarbræv 5:19, *NS*.

16. Hvussu roynir Satan at fáa okkum at halda uppat at tæna Jehova?
17. Hví akta vit Jehova?

styrki tíni.“ (5. Mósebók 6:5) Vit akta Jehova, tí vit elska hann. So hvørt sum okkara kærleiki til Jehova veksur, fáa vit enn størri hug at gera tað, sum hann biður okkum. Jóhannes ápostul skrivaði: „Tað er kærleikin til Gud, at vit halda boð Hansara; og boð Hansara eru ikki tung.“ – 1. Jóhannesarbræv 5:3.

18 Hvat er nakað av tí, sum Jehova sigur er skeivt? Vit síggja nøkur dømi í rammuni „Hata tað, sum Jehova hatar“. Fyrst hugsar tú kanska, at okkurt av tí ikki hevur so nógv upp á seg. Men tá ið tú lesur bíbliuørindini og hugsar gjølla um tey, sært tú helst, hví tað er so gott at fylgja boðunum frá Jehova. Tú uppdagar kanska eisini, at tú noyðist at gera nakrar broytingar í tínum lívi.

18, 19. (a) Hvat er nakað av tí, sum Jehova sigur er skeivt? (b) Hvussu vita vit, at Jehova ikki biður okkum gera nakað, sum vit ikki klára?

HATA TAÐ, SUM JEHOVA HATAR

- **Morð**
  2. Mósebók 20:13; 21:22, 23, *NW*
- **Seksuellur ómoralur**
  3. Mósebók 20:10, 13, 15, 16; Rómbrævið 1:24, 26, 27, 32; 1. Korintbræv 6:9, 10
- **Okkultisma**
  5. Mósebók 18:9-13; 1. Korintbræv 10:21, 22; Galatiabrævið 5:20, 21
- **Avgudadyrkan**
  1. Korintbræv 10:14
- **Drykkjuskapur**
  1. Korintbræv 5:11
- **At stjala**
  3. Mósebók 5:21, 23; Efesusbrævið 4:28
- **At lúgva**
  Orðtøkini 6:16, 19; Kolossebrævið 3:9; Opinberingin 22:15

Tað kann vera ringt, men um tú gert tað, fert tú at uppliva tann friðin og ta gleðina, tað gevur at vera vinur við Gud. (Esaias 48:17, 18) Hvussu vita vit, at tað ber til at gera sovorðnar broytingar?

19 Jehova biður okkum ongantíð gera nakað, sum vit ikki klára. (5. Mósebók 30:11-14) Hann er ein sannur vinur, og hann kennir okkum betur, enn vit sjálv gera. Hann kennir okkara sterku og veiku síður. (Sálmur 103:14) Paulus uggar okkum við hesum orðunum: „Gud er trúfastur, Hann skal ikki lata tykkum verða freistað út um tað, ið tit eru ment; nei, Hann skal saman við freistingini gera eisini útgongdina úr henni, so tit fáa tolt hana.“ (1. Korintbræv 10:13) Eingin ivi er um, at Jehova altíð fer at geva okkum styrki til at gera tað, sum er rætt. Hann fer at geva okkum eina ’ómetaliga kraft’, sum hjálpir okkum at klára torførar støður.

- **Havisjúka**
  1. Korintbræv 5:11
- **Harðskapur**
  Orðtøkini 3:31; 22:24, 25; Galatiabrævið 5:20, 21
- **At tosa ljótt og slatra**
  3. Mósebók 19:16; Efesusbrævið 5:4; Kolossebrævið 3:8
- **Misnýtsla av blóði**
  1. Mósebók 9:4; Ápostlasøgan 15:20, 28, 29
- **At nokta at syrgja fyri familjuni**
  1. Timoteusarbræv 5:8
- **At blanda seg upp í kríggj og politikk**
  Esaias 2:4; Jóhannes 6:15; 17:16
- **At roykja og taka rúsevni**
  Markus 15:23; 2. Korintbræv 7:1

(2. Korintbrævið 4:7) Hetta upplivdi Paulus fleiri ferðir, og hann segði: „Alt eri eg mentur í Honum, sum ger meg sterkan.“ – Filippibrævið 4:13.

ELSKA TAÐ, SUM JEHOVA ELSKAR

20 Fyrsta stigið, vit mugu taka, fyri at blíva vinir við Jehova, er at halda uppat við at gera tað, sum er skeivt. Men vit mugu gera meira enn tað. (Rómbrævið 12:9) Vit mugu elska tað, sum Gud elskar, og fylgja tí, sum stendur í **Sálmi 15:1-5. (Les.)** Vinirnir hjá Jehova royna at líkjast honum og vísa eginleikar sum ’kærleika, gleði, frið, tolni, mildni, góðvild, trúskap, spakføri og sjálvstamarhald’. – Galatiabrævið 5:22, 23, *NS.*

21 Hvussu verður tú raskari at vísa hesar góðu eginleikarnar? Við at lesa og kanna Bíbliuna regluliga og finna út av, hvat Jehova elskar. (Job 36:22) Tá ið tú gert tað, fert tú at elska Jehova enn meira, og so fært tú eisini hug at gera tað, sum hann biður teg.

22 Tær broytingarnar, sum tú kanska noyðist at gera, kunnu samanberast við tað at skifta klæðir. Bíblian sigur, at vit mugu ’lata okkum úr hinum gamla menniskjanum’, ella persónleikanum, og ’lata okkum í tann nýggja’ persónleikan. (Kolossebrævið 3:9, 10) Tað er ikki lætt at broyta persónleika, men Jehova lovar at geva okkum „stóra løn“ afturfyri. (Sálmur 19:12) So vel at tæna Jehova og ver við til at prógva, at Satan er ein lygnari. Tæn Jehova, tí tú elskar hann, ikki tí tú vilt hava nakað afturfyri. Tá verður tú ein sannur vinur hjá Gudi!

---

20. Hvørjar eginleikar skulu vit royna at vísa, og hví?
21. Hvussu kanst tú læra at vísa teir eginleikarnar, sum Jehova elskar?
22. Hvat verður úrslitið, um tú velur at tæna Jehova?

1 VINIRNIR HJÁ JEHOVA AKTA HANN

„Hoyrið rødd Mína! So skal Eg vera Gud tykkara, og tit skulu vera fólk Mítt.“– Jeremias 7:23

Ber tað til at blíva vinur við Gud?

1. Mósebók 22:18; Jákupsbrævið 2:23
Ábraham bleiv vinur við Jehova, tí hann lurtaði eftir Gudi og trúði á hann.

2. Krønikubók 16:9
Jehova hjálpir teimum, sum akta hann.

Sálmur 25:14; 32:8
Jehova gevur sínum vinum góð ráð.

Sálmur 55:23
Jehova verjir sínar vinir.

2 JOB VAR EIN TRÚFASTUR VINUR HJÁ GUDI

’Í øllum hesum syndaði Job ikki, og hann lastaði ikki Gud fyri tað, ið hendi.’– Job 1:22

Hvussu leyp Satan á Job, og hvussu ávirkaði tað Job?

Job 1:10, 11
Satan pástóð, at Job var sjálvsøkin, og at hann ikki elskaði Gud.

Job 1:12-19; 2:7
Jehova læt Satan sleppa at taka alt frá Job, og Satan syrgdi enntá fyri, at Job fekk eina ræðuliga sjúku.

Job 27:5
Job visti ikki, hví so nógv ræðuligt hendi í hansara lívi, men hann varð verandi trúfastur.

3 SATAN ROYNIR AT FÁA TEG AT VENDA JEHOVA BAKIÐ

„Alt, ið maður eigur, letur hann fyri lív sítt!“– Job 2:4

Hvussu roynir Satan at oyðileggja okkara vinalag við Jehova?

2. Korintbræv 11:14
Satan roynir at lumpa okkum og fáa okkum at vera ólýðin ímóti Jehova.

Orðtøkini 24:10
Hann roynir at fáa okkum at føla, at Jehova ikki kann brúka okkum.

1. Pætursbræv 5:8
Satan forfylgir okkum.

Orðtøkini 27:11, Dahl/Viderø
Vel at tæna Jehova og at blíva hansara vinur. Tað fer at prógva, at Satan er ein lygnari.

4 VIT AKTA JEHOVA, TÍ VIT ELSKA HANN

„Tað er kærleikin til Gud, at vit halda boð Hansara.“– 1. Jóhannesarbræv 5:3

Hvussu kanst tú blíva vinur við Jehova?

5. Mósebók 6:5
Elska Jehova, tí so verður tað lættari at akta hann.

Esaias 48:17, 18
Akta Jehova, tí so fer tað at gangast tær væl.

5. Mósebók 30:11-14
Lít á, at Jehova ongantíð biður teg gera nakað, tú ikki klárar.

Filippibrævið 4:13
Ger tað, sum er rætt. So fer Jehova at geva tær ta neyðugu styrkina.

KAPITTUL 13

LÍVIÐ ER EIN GÁVA

JEHOVA er hin „livandi Gud“, og hann hevur givið okkum lívið. (Jeremias 10:10) Bíblian sigur um hann: „Tú hevur skapt alt, og tí Tú vildi tað, varð tað til, og varð tað skapt!“ (Opinberingin 4:11) Ja, Jehova vildi, at vit skuldu liva. Lívið er ein fantastisk gáva frá honum. – **Les Sálm 36:10.**

2 Jehova gevur okkum alt, sum er neyðugt, fyri at vit kunnu liva, til dømis mat og vatn. Men hann vil eisini, at vit skulu njóta lívið og hava tað gott. (Ápostlasøgan 14:15-17; 17:28) Fyri at fáa eitt gott lív mugu vit fylgja Guds lógum. – Esaias 48:17, 18.

HVUSSU METIR GUD LÍVIÐ?

3 Bíblian vísir, at Jehova metir lívið hjá okkum menniskjum sum nakað sera dýrabart. Hugsa til dømis um, hvat Jehova gjørdi, tá ið Káin, sonur Ádam og Evu, bleiv ógvuliga illur inn á beiggja sín, Ábel. Jehova segði við hann, at hann skuldi stýra sínari vreiði. Men Káin lurtaði ikki, og tað endaði við, at hann ’leyp á Ábel og drap hann’. Jehova straffaði Káin, tí hann drap beiggja sín. (1. Mósebók 4:3-11) Tað er als ikki gott at ganga og vera illur og hata nakran, tí tað kann gera okkum harðlig og óndskapsfull. Ein, sum er soleiðis, fær ikki ævigt lív. **(Les 1. Jóhannesarbræv 3:15.)** Jehova vil, at vit skulu læra okkum at elska øll menniskju. – 1. Jóhannesarbræv 3:11, 12.

---

1. Hvør hevur givið okkum lívið?
2. Hvussu kunnu vit fáa eitt gott lív?
3. Hvat gjørdi Jehova, tá ið Káin drap Ábel?

LÍVIÐ ER DÝRABART

- Vit drepa ikki eitt óføtt barn

- Vit roykja ikki og taka ikki rúsevni

- Vit hata ikki onnur

4 Tá ið Jehova meira enn 2.000 ár seinni gav Mósesi tey tíggju boðini, var tað týðiligt, at lívið framvegis var dýrabart í hansara eygum. Eitt av boðunum var: „Tú mást ikki drepa.“ (5. Mósebók 5:17) Um onkur drap ein annan við vilja, skuldi hann ella hon lata lív.

5 Hvussu metir Gud lívið hjá einum óføddum barni? Tað kemur týðiliga fram í lógini, sum Jehova gav ísraelsmonnum. Lógin segði, at um onkur kom til at skaða eina barnakonu, soleiðis at hon misti barnið, so skuldi viðkomandi straffast við deyðanum. **(Les 2. Mósebók 21:22, 23*;** Sálmur 127:3.) So lívið hjá einum óføddum barni er altso dýrabart í Guds eygum, og tað vísir, at hann ikki góðtekur fosturtøku. – Les endagrein 28.

6 Hvussu kunnu vit vísa Jehova, at vit meta okkara egna lív og lívið hjá øðrum sum nakað dýrabart? Vit mugu lata vera við at seta okkara egna lív ella lívið hjá øðrum í váða. Tað vil til dømis siga, at vit ikki vilja roykja ella taka rúsevni, tí tað er skaðiligt, og mann kann doyggja av tí.

7 Lívið er ein gáva frá Jehova, og tí vilja vit liva, sum hann vil hava okkum at liva. Vit mugu ansa eftir okkum sjálvum og okkara heilsu, tí annars kann Jehova ikki góðkenna okkum. (Rómbrævið 6:19; 12:1;

---

* 2. Mósebók 21:22, 23 (*NW*): „Fara menn at berjast og fíra undir eina barnakonu, so hon eigur ov tíðliga, men eingin deyðsvanlukka hendir, so skal tann seki lata tað skaðaendurgjaldið, sum maðurin hjá konuni krevur; og hann skal lata gjaldið framman fyri dómarunum. Men hendir ein deyðsvanlukka, so skal lív latast fyri lív.“

---

4. Hvat vísir eitt av teimum tíggju boðunum um Guds áskoðan á lívið?
5. Hvussu metir Gud fosturtøku?
6, 7. Hvussu vísa vit Jehova, at vit meta lívið sum nakað dýrabart?

2. Korintbræv 7:1) Tað ber ikki til at hava eitt tætt samband við Jehova, um vit ikki hava somu áskoðan á lívið sum hann. So um vit hava nakrar ringar vanar, mugu vit altso sleppa okkum av við teir. Tað er kanska lættari sagt enn gjørt, men tá ið vit hava rætta motivið, hjálpir Jehova okkum.

8 Av tí at lívið er dýrabart, væntar Jehova, at vit gera alt, vit eru ment, fyri ikki at seta okkara egna lív ella lívið hjá øðrum í váða. Tí mugu vit altíð koyra forsvarliga, antin vit koyra bil, motorsúkklu ella okkurt annað. Og vit halda okkum frá vandamiklum og harðligum ítróttagreinum. (Sálmur 11:5, *NW*) Vit mugu eisini syrgja fyri, at heimið hjá okkum er trygt. Vit skilja, at hetta hevur stóran týdning fyri Jehova, tí hann segði soleiðis við ísraelsmenn: „Táið tú byggir tær nýtt hús, skalt tú gera bróstvernd [ella rimaverk] rundanum á takinum, so tú dregur ikki blóðskyld oman yvir hús títt, av tí at onkur dettur niður haðani.“ – 5. Mósebók 22:8.

9 Tað hevur eisini týdning fyri Jehova, at vit fara væl við djórunum. Hann hevur givið okkum loyvi til at drepa djór fyri at fáa mat og klæðir ella fyri at verja okkum, tá ið vit eru í vanda. (1. Mósebók 3:21; 9:3; 2. Mósebók 21:28) Men vit mugu ikki vera órein við djórini ella drepa tey bara til stuttleika. – Orðtøkini 12:10.

LÍVIÐ ER HEILAGT

10 Blóðið er heilagt í Guds eygum, tí tað umboðar lívið. Tá ið Káin hevði dripið Ábel, segði Jehova við hann:

---

8. Hvat kunnu vit gera fyri ikki at seta okkara egna lív ella lívið hjá øðrum í váða?
9. Hvussu skulu vit fara við djórunum?
10. Hvussu vita vit, at blóðið umboðar lívið?

„Blóð bróður tíns rópar til Mín av jørðini.“ (1. Mósebók 4:10) Blóðið hjá Ábeli umboðaði hansara lív, og Jehova straffaði Káin, tí hann drap beiggja sín. Eftir vatnflóðina, tá ið Jehova gav Nóa og familjuni loyvi til at eta kjøt, vísti hann aftur, at blóðið umboðar lívið. Hann segði: „Alt tað, ið rørist og livir, skal vera tykkum til føði; sum Eg gav tykkum tær grønu urtirnar, so gevi Eg tykkum tað alt.“ Har var tó ein treyt: „Kjøt við sálini [lívinum], tað er blóðinum, í, tað skulu tit ikki eta.“ (1. Mósebók 1:29; 9:3, 4) Jehova gav teimum altso ikki loyvi til at eta kjøt við blóði í, tí blóðið umboðaði sálina, ella lívið.

11 Umleið 800 ár seinni segði Jehova við sítt fólk: „Táið onkur av Ísraelsmonnum ella av teimum fremmandu, ið hjá teimum búgva, veiðir vilt dýr ella fugl – av teimum, ið loyvi er at eta – so skal hann lata blóðið renna út og koyra mold út yvir tað.“ Síðani segði hann: „Tit mugu ikki eta blóðið.“ (3. Mósebók 17:13, 14) Jehova hevði ikki broytt seg, hansara fólk skuldi framvegis meta blóðið sum heilagt. Tað var í lagi, at tey ótu kjøt, men ikki blóð. Tá ið tey drupu eitt djór fyri at fáa mat, skuldu tey lata blóðið renna út á jørðina.

12 Nøkur ár eftir at Jesus doyði, var neyðugt at gera av, hvørjar partar av Móselógini tey kristnu skuldu halda. Tí savnaðust ápostlarnir og teir elstu í Jerusalem fyri at viðgera málið. **(Les Ápostlasøguna 15:28, 29;** 21:25.) Jehova hjálpti teimum at skilja, at blóðið framvegis var heilagt í hansara eygum, og at tey kristnu skuldu hava somu áskoðan á tað sum hann. Tey fyrstu kristnu máttu ikki eta ella drekka blóð, og tey máttu heldur ikki eta

---

11. Hvørji boð gav Jehova sínum fólki?
12. Hvørja áskoðan hava kristin á blóð?

kjøt, um blóðið ikki var runnið út. Gjørdu tey tað, var tað líka skeivt sum at tilbiðja avgudar ella at liva eitt seksuelt ómoralskt lív. Líka síðan tá hava sonn kristin noktað at eta og drekka blóð. Jehova vil eisini, at vit í dag skulu meta blóðið sum heilagt.

13 Vil tað so siga, at kristin ikki kunnu taka ímóti blóðflutningi? Hugsa tær til dømis, at læknin hjá tær segði, at tú ikki mátti drekka alkohol. Heldur tú so, at tað hevði verið í lagi at sprænt tað inn í æðrarnar í staðin? Sjálvandi ikki! So tá ið Jehova sigur, at vit ikki mugu eta ella drekka blóð, merkir tað eisini, at vit ikki mugu taka ímóti blóðflutningi. – Les endagrein 29.

14 Men hvat um ein lækni sigur, at tú doyrt, um tú ikki fært blóð? Tað er upp til hvønn einstakan av okkum, um vit vilja fylgja Guds lóg ella ikki. Jehova vitni hava djúpa virðing fyri lívinum, sum er ein gáva frá Gudi. Og tí royna vit altíð at fáa ta bestu viðgerðina, sum er. Men vit taka ikki ímóti blóði.

15 Vit gleðast um lívið og gera okkara besta fyri at hava eina góða heilsu. Men av tí at blóðið umboðar lívið og er heilagt í Guds eygum, taka vit ikki ímóti blóðflutningi. Tað hevur størri týdning fyri okkum at akta Jehova, enn at gera alt fyri at leingja um lívið. Jesus segði: „Tann, sum vil bjarga lívinum, skal missa tað; men tann, sum missir lív sítt fyri Mína skuld, skal finna tað.“ (Matteus 16:25) Vit akta Jehova, tí vit elska hann, og vit líta á, at hann veit, hvat er best fyri okkum. Vit meta lívið sum dýrabart og heilagt, akkurát sum hann ger. – Hebrearabrævið 11:6.

---

13. Hví taka kristin ikki ímóti blóðflutningi?
14, 15. Hvussu stóran týdning hevur tað hjá kristnum at virða lívið og akta Jehova?

16 Tey, sum vilja vera trúføst móti Jehova, hava sett sær fyri at fylgja hansara lóg um blóðið. Tey hvørki eta ella drekka blóð, og tey taka heldur ikki ímóti blóði í sambandi við læknaviðgerð.* Men tey vilja fegin taka ímóti aðrari viðgerð, sum kann bjarga lívinum. Tey ivast ikki í, at hann, sum hevur skapt alt lív, veit, hvat er best fyri tey.

EINASTA NÝTSLAN AV BLÓÐI, SUM JEHOVA LOYVDI

17 Í lógini, sum Jehova gav ísraelsmonnum, segði hann: „Sálin [lívið] í øllum holdi er í blóðinum, og Eg havi givið tykkum tað at nýta á altarinum at gera bót [ella biðja um fyrigeving] fyri sálir tykkara; tað er blóðið, ið ger bót.“ (3. Mósebók 17:11) Tá ið ísraelsmenn høvdu syndað, kundu teir biðja Jehova um fyrigeving við at ofra eitt djór og lata prestin smyrja nakað av blóðinum frá djórinum á altarið. Hetta var tað einasta, sum Jehova loyvdi ísraelsmonnum at brúka blóð til.

18 Lógin um djóraoffur bleiv sett úr gildi, tá ið Jesus ofraði sítt lív, ella blóð, fyri at vit kundu fáa fyrigeving fyri okkara syndir. (Matteus 20:28; Hebrearabrævið 10:1) Lívið hjá Jesusi var so dýrabart, at Jehova kundi brúka tað til at geva øllum menniskjum møguleika fyri at fáa ævigt lív. – Jóhannes 3:16; Hebrearabrævið 9:11, 12; 1. Pætursbræv 1:18, 19.

---

* Fleiri upplýsingar eru at finna á síðunum 77-79 í bókini *'Haldið tykkum í kærleika Guds',* sum Jehova vitni hava givið út.

---

16. Hví er tað skilagott at akta Gud?
17. Hvat var tað einasta, Jehova loyvdi ísraelsmonnum at brúka blóð til?
18. Hvat er møguligt hjá okkum, av tí at Jesus ofraði sítt lív?

Hvussu kunnu vit vísa virðing fyri lívinum og blóðinum?

19 Vit eru sera takksom fyri, at Jehova hevur givið okkum lívið! Og vit vilja gjarna fortelja øðrum, at tey kunnu fáa ævigt lív, um tey trúgva á Jesus. Vit elska øll menniskju, og tí gera vit okkara besta fyri at læra tey, hvussu tey kunnu fáa ævigt lív. (Ezekiel 3:17-21) Tá ið vit gera tað, kunnu vit siga eins og Paulus: „Eg eri reinur fyri blóð alra. Tí eg havi einki hildið aftur, men kunngjørt tykkum alt ráð Guds.“ (Ápostlasøgan 20:26, 27) Ja, vit vísa, at vit virða lívið og blóðið, tá ið vit fortelja øðrum um Jehova og hansara áskoðan á lívið.

---

19. Hvat mugu vit gera fyri at vera ’rein fyri blóð alra’?

1 VÍS VIRÐING FYRI LÍVINUM

„Hjá Tær er kelda lívsins.“– Sálmur 36:10

Hvussu vísa vit virðing fyri lívinum?

Ápostlasøgan 17:28; Opinberingin 4:11
Lívið er ein gáva frá Jehova, og tí mugu vit hava virðing fyri tí.

2. Mósebók 21:22, 23, *NW*; 5. Mósebók 5:17
Morð og fosturtøka er skeivt.

1. Jóhannesarbræv 3:11, 12, 15
Tað er skeivt at hata.

2. Korintbræv 7:1
Vit mugu halda okkum frá skaðiligum vanum, eitt nú at roykja og taka rúsevni.

Sálmur 11:5, *NW*
Vit mugu halda okkum frá harðligum undirhaldi og harðligum ítrótti.

2 LÍVIÐ OG BLÓÐIÐ

„Blóðið er sálin [lívið] í øllum kjøti – sálin er í tí.“– 3. Mósebók 17:14

Hvørja áskoðan hevur Gud á lívið og blóðið?

1. Mósebók 4:10; 5. Mósebók 12:23
Blóðið umboðar lívið.

1. Mósebók 9:3, 4
Vit kunnu eta kjøt, men ikki blóð.

Ápostlasøgan 15:28, 29; 21:25
Boðini frá Gudi um at halda seg frá blóði eru eisini galdandi í sambandi við læknaviðgerð.

Hebrearabrævið 11:6
Okkara samband við Jehova er tað dýrabarasta, vit eiga.

3 EINASTA NÝTSLAN AV BLÓÐI, SUM JEHOVA LOYVDI

„Blóð Jesusar ... reinsar okkum frá allari synd.“– 1. Jóhannesarbræv 1:7

Hvat er møguligt hjá okkum, av tí at Jesus ofraði sítt lív?

3. Mósebók 17:11
Tá ið ísraelsmenn høvdu syndað, kundu teir biðja Jehova um fyrigeving við at ofra eitt djór og lata prestin smyrja nakað av blóðinum frá djórinum á altarið.

Matteus 20:28; Hebrearabrævið 9:11-14
Lógin um djóraoffur bleiv sett úr gildi, tá ið Jesus ofraði sítt lív, ella blóð, fyri at vit kundu fáa fyrigeving fyri okkara syndir.

Jóhannes 3:16
Lívið hjá Jesusi var so dýrabart, at Jehova kundi brúka tað til at geva øllum menniskjum møguleika fyri at fáa ævigt lív.

KAPITTUL 14

EITT TRYGT OG GOTT FAMILJULÍV

JEHOVA GUD vígdi tey fyrstu hjúnini. Bíblian sigur okkum, at hann skapti fyrstu kvinnuna og „leiddi hana til Ádam“. Ádam bleiv so glaður og segði: „Hesa ferð er tað bein av mínum beinum og hold av mínum holdi!“ (1. Mósebók 2:22, 23) Jehova vil, at tey, sum eru gift, skulu hava tað gott.

2 Nógv menniskju hava tíverri ongantíð upplivað eitt trygt og gott familjulív. Men í Bíbliuni eru nógv góð ráð, sum kunnu hjálpa øllum í familjuni at gera sítt til, at tey kunnu hava tað gott saman. (Lukas 11:28) Bíblian hjálpir okkum eisini at læra Jehova og Jesus at kenna, og um øll í familjuni royna at taka eftir teimum, fáa tey eitt gott familjulív. – Efesusbrævið 5:1, 2.

GIFTIR MENN

3 Bíblian sigur, at ein maður skal elska konu sína og vísa henni virðing. **(Les Efesusbrævið 5:25-29.)** Ein maður skal altíð fara væl við konu síni. Hann tekur sær av henni, verjir hana og kundi ongantíð funnið upp á at gjørt nakað fyri at særa ella skaða hana.

4 Hvat skal ein maður gera, tá ið kona hansara ger okkurt galið? Giftir menn fáa at vita: „Elskið konur tykkara og verið ikki beiskir við tær!“ (Kolossebrævið 3:19) Gloym ikki, at tú eisini sjálvur gert okkurt galið av og á. Og um tú vilt, at Jehova skal fyrigeva tær, mást tú eisini

---

1, 2. Hvussu vil Jehova, at familjur skulu hava tað?
3, 4. (a) Hvussu skal ein maður fara við konu síni? (b) Hví er tað umráðandi at duga at fyrigeva?

fyrigeva konu tíni. (Matteus 6:12, 14, 15) Tá ið bæði tú og konan duga væl at fyrigeva, hjálpir tað tykkum at hava tað gott saman.

5 Jehova væntar, at ein maður vísir, at hann er góður við konu sína. Hann eigur at hugsa um hennara kenslur og tað, sum hon hevur brúk fyri. Hetta er nakað, hann má taka í álvara, tí um ein maður ikki fer væl við konu síni, kann tað føra til, at Jehova ikki vil lurta eftir hansara bønum. (1. Pætursbræv 3:7) Jehova heldur ikki, at ein maður er meira verdur enn ein kona. Tað, sum ger menniskju dýrabar í hansara eygum, er, at tey elska hann.

6 Jesus segði, at tá ið ein maður og ein kona verða gift, eru tey „ikki longur tvey, men *eitt*“. (Matteus 19:6) Tey skulu vera trúføst móti hvørjum øðrum og ongantíð vera ótrúgv. (Orðtøkini 5:15-21; Hebrearabrævið 13:4) Tá ið talan er um tað seksuella, eiga bæði at hugsa um, hvat er best fyri hin. (1. Korintbræv 7:3-5) Bíblian sigur, at menn skulu „elska konur sínar sum síni egnu likam“. Hon sigur eisini: „Aldri hevur jú nakar hatað sítt egna hold [ella kropp]; nei, hann føðir tað og hevur umsorgan fyri tí.“ (Efesusbrævið 5:28, 29) Ein maður skal altso elska konu sína og fara væl við henni. Tað, sum ein kona hevur mest brúk fyri, er, at maðurin vísir henni kærleika.

GIFTAR KONUR

7 Skulu øll í einari familju hava tað gott, má onkur vera, sum hevur høvuðsábyrgdina og leiðir familjuna. Bíblian sigur: „Kristus er høvur mansins, og maðurin er

---

5. Hví skal ein maður vísa, at hann er góður við konu sína?
6. Hvat vil tað siga, at maður og kona eru eitt?
7. Hví er tað umráðandi, at onkur hevur høvuðsábyrgdina í familjuni?

Hvussu er Sára ein góð fyrimynd hjá giftum konum?

høvur konunnar, og Gud er høvur Krists.“ – 1. Korintbræv 11:3, *NS*.

8 Allir menn gera okkurt galið av og á. Men tá ið konan stuðlar avgerðunum hjá manninum og samstarvar við hann, gagnar tað allari familjuni. (1. Pætursbræv 3:1-6) Bíblian sigur: „Konan skal vísa manninum *virðing.“* (Efesusbrævið 5:33) Er tað eisini galdandi, um tey ikki hava somu trúgv? Ja, tí Bíblian sigur: „Tit konur! Verið tykkara egnu monnum undirgivnar, fyri at enntá teir, ið ikki vilja akta orðið, kunnu verða vunnir uttan orð, við atferð kona sína – táið teir síggja reina atburð tykkara í ótta!“ (1. Pætursbræv 3:1, 2) Ein kona kann við sínum verumáta hjálpa manninum at fáa virðing fyri hennara trúgv.

9 Hvat um ein kona ikki hevur somu meining sum maðurin? So kann hon siga tað við hann upp á ein penan máta. Tað gjørdi Sára, einaferð hon hevði eina aðra

---

8. Hvussu kann ein kona vísa manninum virðing?
9. (a) Hvat eigur ein kona at gera, um hon ikki hevur somu meining sum maðurin? (b) Hvørji ráð fáa konur í Titusarbrævinum 2:4, 5?

meining enn Ábraham. Ábrahami dámdi ikki at hoyra tað, sum Sára segði, men Jehova segði við hann: „Ger í allar mátar, sum Sára sigur við teg!“ (1. Mósebók 21:9-12) Tá ið ein maður tekur eina avgerð, sum ikki er í stríð við Bíbliuna, skal konan stuðla honum. (Ápostlasøgan 5:29; Efesusbrævið 5:24) Ein góð kona tekur sær av manninum og børnunum. **(Les Titusarbrævið 2:4, 5.)** Tá ið tey síggja, hvussu nógv hon ger fyri tey, fara tey at elska og virða hana enn meira. – Orðtøkini 31:10, 28.

10 Hjá nøkrum skal ikki so nógv til, fyrr enn tey velja at fara frá hvørjum øðrum ella at lata seg skilja. Men Bíblian sigur, at ’ein kona ikki má fara frá manni sínum’, og at ’ein maður ikki má fara frá konu síni’. (1. Korintbræv 7:10, 11, *NW*) Har eru tó nøkur sera álvarslig viðurskifti, sum kunnu gera, at hjún velja at fara frá hvørjum øðrum. Men tað er ein stór avgerð at taka, og tí mugu tey hugsa seg væl um.* Hvussu við hjúnaskilnaði? Bíblian vísir, at einasta góðkenda orsøkin til hjúnaskilnað er, at annar hjúnafelagin hevur verið ótrúgvur. – Matteus 19:9.

FORELDUR

11 Tit, sum eru foreldur, mugu brúka so nógva tíð sum gjørligt saman við børnunum. Tey hava brúk fyri tykkum, og fremst av øllum hava tey brúk fyri, at tit læra tey um Jehova. – 5. Mósebók 6:4-9.

12 Heimurin verður bara verri og verri. Nøkur menn-

---

* Fleiri upplýsingar eru at finna á síðunum 219-221 í bókini *’Haldið tykkum í kærleika Guds’,* sum Jehova vitni hava givið út.

---

10. Hvat sigur Bíblian um tað at fara frá hvørjum øðrum og um hjúnaskilnað?
11. Hvørjum hava børn mest brúk fyri?
12. Hvat mugu foreldur gera fyri at verja síni børn?

iskju eru so ónd, at tey kunnu finna upp á at skaða børn, ja, enntá misnýta tey kynsliga. Summi foreldur halda tað vera ringt at tosa við børnini um sovorðið. Men tað er alneyðugt! Foreldur mugu ávara síni børn og læra tey, hvussu tey kunnu halda seg frá slíkum persónum. Gerið alt, tit kunnu, fyri at verja tykkara børn!* – 1. Pætursbræv 5:8.

13 Tað er ábyrgdin hjá foreldrunum at uppala børnini.

---

* Fleiri upplýsingar um, hvussu tit kunnu verja tykkara børn, eru at finna í 32. kapitli í bókini *Lurtið eftir stóra Læraranum,* sum Jehova vitni hava givið út.

---

13. Hvussu skulu foreldur uppala síni børn?

Jesus er ein góð fyrimynd
hjá øllum í familjuni



Hvussu kunnu tit gera tað? Børn hava brúk fyri at blíva rættleidd, men tað má ongantíð gerast upp á ein harðan ella ógvisligan máta. (Jeremias 30:11) Tí mugu tit ikki rættleiða børnini, tá ið tit eru ill. Tit vilja sjálvsagt ikki, at tykkara orð skulu „stinga sum svørð“ og særa tey. (Orðtøkini 12:18) Lærið børnini at skilja, hví tað er umráðandi at akta. – Efesusbrævið 6:4; Hebrearabrævið 12:9-11; les endagrein 30.

BØRN

14 Jesus aktaði altíð faðir sín, sjálvt tá ið tað ikki var lætt. (Lukas 22:42; Jóhannes 8:28, 29) Jehova væntar eisini, at børn akta síni foreldur. – Efesusbrævið 6:1-3.

15 Heldur tú, at tað av og á er ringt at akta tíni foreldur? So kanst tú hugsa um, at bæði Jehova og foreldrini hjá tær verða glað, tá ið tú gert tað.* – Orðtøkini 1:8; 6:20; 23:22-25.

16 Tínir vinir og onnur á tínum aldri royna kanska at fáa teg at gera nakað, sum er skeivt. Og tað er nakað, sum Satan útnyttar, tí hann veit, at tað kann vera øgiliga ringt at standa ímóti bólkatrýsti. Bíblian fortelur til dømis, at dóttir Jákup, Dina, hevði vinir, sum ikki elskaðu Jehova. Tað hevði nógvar trupulleikar við sær, bæði fyri hana og familjuna. (1. Mósebók 34:1, 2) Um tú hevur vinir, sum ikki elska Jehova, kunnu teir kanska fáa teg at gera nakað, sum Jehova hatar. Og tað kundi oyðilagt nógv fyri teg, tína familju og títt samband við Jehova.

---

* Eitt barn skal ikki akta síni foreldur, um tey vilja hava tað at gera nakað, sum er skeivt sambært Bíbliuni. – Ápostlasøgan 5:29.

14, 15. Hví skulu børn akta síni foreldur?

16. (a) Hvussu roynir Satan at fáa børn og ung at gera nakað skeivt? (b) Hví er tað umráðandi at fáa sær vinir, sum elska Jehova?

(Orðtøkini 17:21, 25) Tí er tað sera umráðandi, at tú fært tær vinir, sum elska Jehova. – 1. Korintbræv 15:33.

EITT TRYGT OG GOTT FAMILJULÍV

17 Tá ið øll í einari familju fylgja vegleiðingini frá Gudi, sleppa tey undan nógvum trupulleikum. Um tú ert ein giftur maður, mást tú elska konu tína og fara væl við henni. Um tú ert ein gift kona, mást tú vísa manni tínum virðing, samstarva við hann og royna at líkjast konuni, sum verður lýst í Orðtøkunum 31:10-31. Um tú eigur børn, mást tú læra tey at elska Jehova. (Orðtøkini 22:6) Ein pápi má leiða sína familju upp á ein góðan máta. (1. Timoteusarbræv 3:4, 5; 5:8) Og børn mugu akta síni foreldur. (Kolossebrævið 3:20) Minst til, at øll í familjuni gera okkurt galið av og á, so tí er tað umráðandi, at øll eru eyðmjúk og duga at biðja um fyrigeving. Ja, í Bíbliuni eru góð ráð frá Jehova til hvønn einstakan í familjuni.

17. Hvørja ábyrgd hevur hvør einstakur í familjuni?

Hvat kann hjálpa børnum og ungum at vera trúføst móti Gudi, tá ið tey verða freistað at gera nakað skeivt?

1 JEHOVA SKAPTI FAMILJUNA

„Eg boyggi knø míni fyri Gudi, Pápa okkara, sum hevur givið øllum familjum í himli og á jørð navn.“– Efesusbrævið 3:14, 15, *NS*

Hvussu kanst tú fáa eitt trygt og gott familjulív?

1. Mósebók 1:26-28
Jehova skapti ta fyrstu familjuna.

Efesusbrævið 5:1, 2
Fyri at fáa eitt gott familjulív mugu øll í familjuni royna at taka eftir Jehova og Jesusi.

2 GIFTIR MENN OG GIFTAR KONUR

„Ein og hvør tykkara [skal] elska konu sína ... Og konan skal vísa manninum virðing.“– Efesusbrævið 5:33

Hvussu eiga giftir menn og giftar konur at fara við hvørjum øðrum?

Efesusbrævið 5:22-29
Maðurin hevur ábyrgdina í familjuni. Hann skal elska konu sína, og hon skal stuðla avgerðunum, sum hann tekur.

Kolossebrævið 3:19;
1. Pætursbræv 3:4
Tey mugu vera fitt og umhugsin móti hvørjum øðrum.

1. Pætursbræv 3:1, 2, 7
Tey mugu vísa hvørjum øðrum virðing.

1. Timoteusarbræv 5:8;
Titusarbrævið 2:4, 5
Maðurin skal syrgja væl fyri familjuni, og konan skal eisini gera sítt til, at øll hava tað gott.

3 FORELDUR

„Eggið ikki børn tykkara til vreiði, nei, fostrið tey upp í tykt og áminning Harrans!“– Efesusbrævið 6:4

Hvørja ábyrgd hava foreldur?

5. Mósebók 6:4-9; Orðtøkini 22:6
Tit mugu brúka tíð upp á at læra børnini um Jehova. Byrjið longu, meðan tey eru heilt smá, og hjálpið teimum at blíva vinir við Jehova.

1. Pætursbræv 5:8
Tit mugu læra tykkara børn, hvussu tey kunnu verja seg ímóti kynsligum ágangi og øðrum vandum.

Jeremias 30:11; Hebrearabrævið 12:9-11
Tit mugu ongantíð rættleiða børnini upp á ein ógvisligan máta, ella tá ið tit eru ill.

4 BØRN

„Tit børn! Aktið foreldur tykkara!“– Efesusbrævið 6:1

Hví skulu børn akta síni foreldur?

Orðtøkini 23:22-25; Kolossebrævið 3:20
Bæði Jehova og tíni foreldur verða glað, tá ið tú aktar.

1. Korintbræv 15:33
Fá tær vinir, sum elska Jehova. So verður tað lættari hjá tær at gera tað, sum er rætt.

KAPITTUL 15

HVUSSU SKULU VIT TILBIÐJA GUD?

TEY flestu siga seg tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan. Men tað kann ikki passa, tí tað er sera ymiskt, hvat átrúnaðir læra um Gud og um, hvussu vit skulu tilbiðja hann. Men hvat kunnu vit gera fyri at finna út av, hvussu vit skulu tilbiðja Gud? Tað er bara Jehova Gud, sum kann siga okkum tað.

2 Jehova hevur givið okkum Bíbliuna fyri at læra okkum, hvussu vit skulu tilbiðja hann. So um tú kannar Bíbliuna, fer Jehova at hjálpa tær at skilja og brúka tað, sum tú lærir, tí hann vil tær tað besta. – Esaias 48:17.

3 Summi siga, at Gud góðtekur allan átrúnað, men Jesus segði nakað annað: „Ikki ein og hvør, sum sigur við Meg: 'Harri, Harri!' skal koma inn í ríki Himmiríkis – nei, tann, ið ger vilja Faðirs Míns.“ Vit mugu altso kanna, hvat Guds vilji er, og gera tað, sum hann vil hava okkum at gera. Hetta er nakað vit mugu taka í álvara, tí Jesus segði, at tey, sum ikki gera Guds vilja, 'gera órætt'. – Matteus 7:21-23.

4 Jesus ávaraði okkum um, at tað ikki altíð fór at vera lætt at gera Guds vilja. Hann segði: „Farið inn um hitt tronga portrið! Tí portrið er vítt, og vegurin

---

1. Hvør kann siga okkum, hvussu vit skulu tilbiðja Gud?
2. Hvat kanst tú gera fyri at finna út av, hvussu tú skalt tilbiðja Gud?
3. Hvat vil Gud hava okkum at gera?
4. Hvat segði Jesus um at gera Guds vilja?

er breiður, sum førir til undirgang, og tey eru mong, sum fara inn um tað; og portrið er trongt, og vegurin er smalur, sum førir til lívið, og tey eru fá, sum finna hann.“ (Matteus 7:13, 14) Smali vegurin, altso tann rætti mátin at tilbiðja Gud upp á, førir til ævigt lív. Breiði vegurin, tann skeivi mátin at tilbiðja Gud upp á, førir til deyða. Men Jehova vil ikki, at nakar skal doyggja. Hann gevur øllum møguleika fyri at læra hann at kenna. – 2. Pætursbræv 3:9.

HVAT EYÐKENNIR TEY, SUM TILBIÐJA GUD UPP Á TANN RÆTTA MÁTAN?

5 Jesus segði, at tað er møguligt at síggja, hvør tilbiður Gud upp á tann rætta mátan. Vit kunnu finna út av tí við at kanna, hvat tey trúgva upp á, og hvussu tey eru. Hann segði: „Av ávøkstum teirra skulu tit kenna teir.“ Og hann segði eisini: „Gott træ [ber] góðan ávøkst.“ (Matteus 7:16, 17) Tað merkir ikki, at tey, sum tilbiðja Gud, eru fullkomin. Men tey royna altíð at gera tað, sum er rætt. Latið okkum kanna, hvat eyðkennir tey, sum tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan.

6 Tey grunda sínar trúarlærur á Bíbliuna. Bíblian sigur: „Øll skriftin er innblást av Gudi og er nyttulig til lærdóm, til sannføring, til rættleiðing, til uppfostran í rættvísi, so gudsmenniskjað kann verða fullkomið, fört fyri at gera alt gott verk.“ (2. Timoteusarbræv 3:16, 17) Paulus skrivaði til tey kristnu: „Táið orð Guds, sum vit prædikaðu, kom til tykkara, tóku tit við tí, ikki

---

5. Hvussu kunnu vit finna út av, hvør tilbiður Gud upp á tann rætta mátan?

6, 7. Hví skal sanni átrúnaðurin vera grundaður á Bíbliuna? Hvat læra vit av Jesusi?

sum menniskjaorði, men sum orði Guds – sum tað sanniliga eisini er!“ (1. Tessalonikabrævi 2:13) Sanni átrúnaðurin er altso grundaður á Bíbliuna og ikki á filosofi, siðvenjur ella nakað annað.

7 Alt, sum Jesus lærdi onnur, var grundað á Guds orð. **(Les Jóhannes 17:17.)** Hann endurgav ofta Skriftirnar. (Matteus 4:4, 7, 10) Tey, sum hoyra til sanna átrúnaðin, gera sum Jesus og grunda allar sínar trúarlærur á Bíbliuna.

8 Tey tilbiðja bara Jehova. Í Sálmi 83:19 stendur: „Eingin uttan Tú eitur HARRIN [Jehova, *NW*], hin hægsti yvir allari jørðini!“ Jesus vildi, at øll skuldu vita, hvør Gud var, og hann brúkti Guds navn. **(Les Jóhannes 17:6.)** Jesus segði: „Harran Gud tín skalt tú tilbiðja, og Honum eina skalt tú tæna.“ (Matteus 4:10) Og tey, sum tæna Gudi, royna at gera sum Jesus. Tey tilbiðja Jehova og ongan annan. Haraftrat brúka tey hansara navn og fortelja eisini øðrum, hvussu hann eitur, og hvat hann fer at gera fyri okkum menniskju.

9 Tey elska menniskju. Jesus lærdi sínar lærisveinar, at teir skuldu elska hvønn annan. **(Les Jóhannes 13:35.)** Og tey, sum tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan í dag, elska eisini hvørt annað, uttan mun til hvar tey koma frá, hvørja mentan tey hava, um tey eru rík ella fátæk. Kærleikin sameinir tey, og tey eru sum brøður og systrar. (Kolossebrævið 3:14) Tey fara ikki í kríggj, tí tey vilja ikki drepa nakran. Bíblian sigur: „Av hesum kennast børn Guds og børn Djevulsins: Hvør

---

8. Hvat segði Jesus um tað at tilbiðja Jehova?

9, 10. Hvussu vísa tey, sum tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan, at tey elska hvørt annað?

tann,ið ger ikki rættvísi, er ikki av Gudi, og líka lítið tann,ið elskar ikki bróður sín.“ Og hon leggur aftrat: „Vit skulu elska hvør annan og ikki líkjast Káin,ið var av hinum illa og drap bróður sín.“ – 1. Jóhannesarbræv 3:10-12; 4:20, 21.

10 Tey brúka sína tíð, orku og pengar til at hjálpa og stuðla hvørjum øðrum. (Hebrearabrævið 10:24, 25) Og tey royna at „gera øllum gott“. – Galatiabrævið 6:10.

11 Tey trúgva, at Jesus er einasti vegurin til Gud. Bíblian sigur: „Frelsa er ikki í nøkrum øðrum; heldur ikki er nakað annað navn undir himli, givið millum menniskju, sum vit skulu verða frelst við.“ (Ápostlasøgan 4:12) Í 5. kapitli lærdu vit, at Jesus gav sítt lív fyri menniskjuni. (Matteus 20:28) Jehova hevur gjørt av, at Jesus skal vera kongur yvir jørðini, og tí sigur Bíblian, at vit mugu akta Jesus fyri at fáa ævigt lív. – **Les Jóhannes 3:36.**

12 Tey blanda seg ikki í politikk. Jesus tók ikki lut í politikki. Táið hann bleiv avhoyrdur, segði hann við rómverska landshøvdingan Pilatus: „Ríki Mítt er ikki av hesum heimi.“ **(Les Jóhannes 18:36.)** Jesus stuðlaði trúfastur Guds ríki, og tað gera tey, sum tæna Gudi í dag, eisini. Uttan mun til hvar tey búgva, blanda tey seg ikki í politikk. Men Bíblian sigur kortini, at tey skulu akta ’yvirvøldirnar’, altso myndugleikarnar. (Rómbrævið 13:1) Tí fylgja tey landsins lógum. Men um lógirnar stríða ímóti Guds lógum, gera tey sum ápostlarnir,ið søgdu: „Ein eigur at lýða Gud meir enn menniskju!“ – Ápostlasøgan 5:29; Markus 12:17.

---

11. Hví mugu vit akta Jesus?
12. Hví blanda tey, sum hoyra til sanna átrúnaðin, seg ikki í politikk?

13 Tey trúgva, at tað bara er Guds ríki, sum kann loysa heimsins trupulleikar. Jesus segði, at tey góðu tíðindini um Guds ríki skuldu verða boðað um allan heimin. **(Les Matteus 24:14.)** Tey, sum tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan, fortelja øðrum, at eingin ríkisstjórn á jørðini kann gera tað, sum Guds ríki fer at gera fyri okkum. (Sálmur 146:3) Í bønini faðirvár segði Jesus: „Komi ríki Títt! Verði vilji Tín, sum í Himli, so á jørðini við!“ (Matteus 6:10) Guds ríki fer at beina fyri øllum mannastjórnum og verður soleiðis tað einasta ríkið, sum ræður yvir jørðini, og tað fer tað at gera í allar ævir. – Dániel 2:44.

14 Spyr teg sjálvan: Hvørji grunda sínar trúarlærur á Bíbliuna? Hvørji fortelja øðrum, hvussu Gud eitur? Hvørji vísa hvørjum øðrum kærleika og trúgva, at Gud sendi Jesus at bjarga menniskjunum? Hvørji blanda seg ikki í politikk? Hvørji boða, at tað bara er Guds ríki, sum kann loysa okkara trupulleikar? Bara Jehova vitni liva upp til øll hesi eyðkennini. – Esaias 43:10-12.

HVAT FERT TÚ AT GERA?

15 Tað er ikki nóg mikið at trúgva, at Gud er til. Sjálvt teir illu andarnir trúgva, at Gud er til, men teir akta hann ikki. (Jákupsbrævið 2:19) Um vit vilja, at Gud skal góðkenna okkara tilbiðing, mugu vit ikki bara trúgva á Gud, men eisini gera tað, sum hann sigur.

16 Vit mugu eisini halda okkum frá følskum átrúnaði, um Gud skal góðkenna okkara tilbiðing. Esaias

---

13. Hvat boða tey, sum tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan, um Guds ríki?
14. Hvørji tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan?
15. Hvat mugu vit gera, um Gud skal góðkenna okkara tilbiðing?
16. Hví skulu vit halda okkum frá følskum átrúnaði?

TEY, SUM TILBIÐJA GUD

- grunda sínar trúarlærur á Bíbliuna
- tilbiðja bara Jehova og fortelja øðrum um hansara navn
- vísa hvørjum øðrum kærleika
- trúgva, at Gud sendi Jesus at bjarga okkum
- blanda seg ikki í politikk
- boða, at tað bara er Guds ríki, sum kann loysa heimsins trupulleikar



profetur skrivaði: „Nemið einki óreint! Farið út haðani, reinsið tykkum!“ (Esaias 52:11; 2. Korintbræv 6:17) Falskur átrúnaður er nakað, sum er óreint í Guds eygum. Og tí mugu vit halda okkum langt burtur frá øllum, sum hevur við falskan átrúnað at gera.

17 Hvat er falskur átrúnaður? Tað er ein og hvør átrúnaður, ið lærir nakað, sum ikki samsvarar við Guds orð. Bíblian rópar allan falskan átrúnað „Bábylon hin stóra“. (Opinberingin 17:5) Hví? Eftir vatnflóðina á Nóa døgum tóku nógvar falskar trúarlærur seg upp í býnum Bábylon. Hesar lærurnar spjaddust um allan heimin. Eitt dømi um hetta er tríeindarlæran. Nógv í Bábylon tilbóðu tríeindargudar, og tað gera fólk í nógvum átrúnaðum eisini í dag. Men Bíblian vísir týðiliga, at tað bara er ein sannur Gud, og at Jesus er sonur hansara. (Jóhannes 17:3) Tey, sum búðu í Bábylon, trúðu eisini, at fólk livdu víðari eftir deyðan, og at tey kundu enda í einum brennandi helviti. Men tað passar ikki! – Les endagreinarnar 14, 17 og 18.

18 Gud hevur fyri langari tíð síðani boðað frá, at allur falskur átrúnaður skal fyribeinast. (Opinberingin 18:8) Tí er tað umráðandi at kvetta alt samband við falskan átrúnað. Jehova ávarar okkum um, at vit mugu gera tað, áðrenn tað er ov seint. – Opinberingin 18:4.

19 Um tú velur at kvetta sambandið við falskan átrúnað, tí tú vilt tilbiðja Jehova, kann tað vera, at familja ella vinfólk hava ringt við at skilja tað. Kanska royna

---

17, 18. Hvat er „Bábylon hin stóra“, og hví er tað umráðandi at lurta eftir ávaringini frá Jehova?
19. Hvussu fer Jehova at taka sær av tær, um tú velur at tæna honum?

tey enntá at gera lívið hjá tær trupult. Men Jehova fer ikki at svíkja teg. Tú verður ein partur av eini heimsumfatandi familju, sum telur fleiri milliónir. Hesi fólkini vísa hvørjum øðrum sannan kærleika. Haraftrat fært tú vón um at liva um allar ævir í nýggja heiminum. (Markus 10:28-30) Nøkur av teimum, sum ikki dáma, at tú tænir Jehova, broyta seg kanska við tíðini. Hvør veit, kanska fara tey sjálv at kanna Bíbliuna!

20 Gud fer heilt skjótt at beina fyri øllum óndskapi, og so fer hansara ríki at ráða yvir jørðini. (2. Pætursbræv 3:9, 13) Sum tað verður gott! Tá fara øll at tilbiðja Jehova, soleiðis sum hann vil hava okkum at tilbiðja seg. Er nakað, sum tú noyðist at broyta fyri at kunna tilbiðja Jehova upp á tann rætta mátan? Um so er, mást tú gera tær neyðugu broytingarnar skjótast gjørligt.

20. Hví er tað umráðandi at tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan?

Tá ið tú velur at tæna Jehova saman við hansara fólki, verður tú ein partur av eini heimsumfatandi familju

1 HVAT EYÐKENNIR TEY, SUM TILBIÐJA GUD UPP Á TANN RÆTTA MÁTAN?

„Portrið er trongt, og vegurin er smalur, sum førir til lívið, og tey eru fá, sum finna hann.“– Matteus 7:14

Hvussu vita vit, at Gud ikki góðtekur alla tilbiðing?

Matteus 7:21-23
Tað eru ikki allir átrúnaðir, sum gera Guds vilja.

Matteus 7:13, 14
Sanni átrúnaðurin førir til ævigt lív. Falskur átrúnaður førir til ævigan deyða.

Matteus 7:16, 17
Tað, sum fólk trúgva og gera, vísir, um tey tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan. Tað er ikki neyðugt at kanna allar átrúnaðir, men bara hvat Bíblian lærir.

2 HVAT GERA TEY, SUM TILBIÐJA GUD UPP Á TANN RÆTTA MÁTAN?

1. Tessalonikabræv 2:13; 2. Timoteusarbræv 3:16, 17
Tey trúgva og læra onnur tað, sum stendur í Bíbliuni.

Matteus 4:10; Jóhannes 17:6
Tey tilbiðja Jehova og brúka hansara navn.

Jóhannes 13:35
Tey vísa hvørjum øðrum sannan kærleika.

Jóhannes 3:36; Ápostlasøgan 4:12
Tey akta Jesus og trúgva, at Gud sendi hann at bjarga okkum.

Jóhannes 18:36; Ápostlasøgan 5:29
Tey blanda seg ikki í politikk.

Matteus 24:14; 6:10
Tey læra onnur, at tað bara er Guds ríki, sum kann loysa heimsins trupulleikar.

3 TÚ MÁST LIVA EFTIR TÍ, SUM TÚ TRÝRT

Hvat mást tú gera, um tú vilt, at Gud skal góðkenna tína tilbiðing?

Jákupsbrævið 2:19
Tað er ikki nóg mikið at trúgva á Gud. Tú mást eisini liva eftir tí, sum stendur í Bíbliuni.

Esaias 52:11; Opinberingin 17:5
Falskur átrúnaður, ella „Bábylon hin stóra“, lærir fólk at tilbiðja Gud upp á ein máta, sum hann ikki góðkennir. Nakrar falskar trúarlærur eru tríeindarlæran, at sálin er ódeyðilig, og at eitt brennandi helviti er til.

Opinberingin 18:4, 8
Jehova fer skjótt at beina fyri følskum átrúnaði. Tí er tað umráðandi at halda seg frá øllum, sum hevur við falskan átrúnað at gera.

Markus 10:28-30
Tú fært kanska mótstøðu, men Jehova fer ongantíð at svíkja teg.

KAPITTUL 16

VEL AT TILBIÐJA GUD UPP Á TANN RÆTTA MÁTAN

NÚ MEÐAN tú hevur kannað Bíbliuna, hevur tú helst uppdagað, at nógv trúgvandi faktiskt gera ymiskt, sum Gudi ikki dámar. (2. Korintbrævi 6:17) Tí sigur Jehova, at vit skulu fara út úr 'Bábylon hini stóru', tað vil siga øllum følskum átrúnaði. (Opinberingin 18:2, 4) Vit mugu altso øll velja, um vit vilja tilbiðja Gud, soleiðis sum vit altíð hava gjørt, ella soleiðis sum hann vil hava okkum at tilbiðja seg.

2 Kanska hevur tú longu kvett sambandið við falskan átrúnað, og um so er, er tað gott. Men innast inni heldur tú kanska enn, at nakað av tí, sum hevur við falskan átrúnað at gera, er ringt at sleppa. Latið okkum kanna nakrar siðir og vita, hví tað hevur so stóran týdning, at vit hava somu áskoðan á teir, sum Jehova hevur.

HALGIMYNDIR OG AT BIÐJA TIL TEY DEYÐU

3 Nøkur hava í nógv ár verið von við at brúka halgimyndir ella aðrar lutir í síni tilbiðing av Gudi. Um tú ert ein av teimum, følist tað kanska løgið ella enntá skeivt at tilbiðja Gud uttan nakrar lutir. Men minst til, at Jehova hevur fortalt okkum, hvussu vit skulu til-

---

1, 2. Hvørja avgerð mást tú taka, og hví er tað umráðandi?

3. (a) Hví halda summi kanska, at tað er ringt at halda uppat at brúka halgimyndir? (b) Hvat sigur Bíblian um at brúka halgimyndir, tá ið vit tilbiðja Gud?

biðja hann. Og Bíblian vísir týðiliga, at hann ikki vil hava okkum at brúka halgimyndir í okkara tilbiðing. – **Les 2. Mósebók 20:4, 5;** Sálmur 115:4-8; Esaias 42:8; 1. Jóhannesarbræv 5:21.

4 Nøkur brúka nógva tíð og orku upp á at royna at gleða síni deyðu skyldfólk. Tey tosa kanska við tey og biðja til teirra. Men sum vit hava lært, liva tey deyðu ikki víðari nakrastaðni, og tí kunnu tey hvørki hjálpa ella skaða okkum. Tað er faktiskt vandamikið at royna at fáa samband við tey. Ein boðskapur, sum sær út til at koma frá einum deyðum skyldfólki, kemur í veruleikanum frá illum andum. Tí segði Jehova við ísraelsmenn, at teir ikki skuldu royna at fáa samband við tey deyðu ella fáast við nakað slag av okkultismu. – 5. Mósebók 18:10-12; les endagreinarnar 26 og 31.

5 Hvat kann hjálpa tær at halda uppat at brúka halgimyndir ella at fylgja siðum, sum hava við okkultismu at gera? Les í Bíbliuni, og hugsa um, hvat Jehova heldur um sovorðið. Tað er týðiligt, at hann heldur tað vera eina „andstygd“, tað vil siga, at honum als ikki dámar tað. (5. Mósebók 27:15) Bið til Jehova hvønn dag. Bið hann hjálpa tær at hava somu áskoðan sum hann og at tilbiðja hann, soleiðis sum hann vil. (Esaias 55:9) Tú kanst vera vísur í, at Jehova fer at geva tær ta neyðugu styrkina til at sleppa øllum, sum hevur við falskan átrúnað at gera.

---

4. (a) Hví skulu vit ikki biðja til deyð skyldfólk? (b) Hví segði Jehova við ísraelsmenn, at teir ikki skuldu royna at fáa samband við tey deyðu?
5. Hvat kann hjálpa tær at halda uppat at brúka halgimyndir ella at fylgja siðum, sum hava við okkultismu at gera?

HVAT SIGUR BÍBLIAN UM JÓLINI?

6 Jólini eru ein tann best umtókta høgtíðin í heiminum, og tey flestu halda, at jólini verða hildin fyri at hátíðarhalda, at Jesus bleiv føddur. Men jólini hava faktiskt røtur í falskari tilbiðing. Eitt leksikon greiðir frá, at rómverjar hátíðarhildu føðingardagin hjá sólini tann 25. desember. Av tí at kirkjan vildi hava fleiri heidningar at blíva kristnar, gjørdi mann av at halda føðingardagin hjá Jesusi henda sama dagin, sjálvt um hann ikki bleiv føddur tá. (Lukas 2:8-12) Lærisveinarnir hjá Jesusi hildu ikki jól. Ein bók sigur, at tey fyrstu 200 árini eftir Jesu føðing, „visti eingin, akkurát nær hann varð føddur, og tey flestu vóru líkaglað“. (*Sacred Origins of Profound Things*) Tað var ikki fyrr enn, umleið 300 ár eftir at Jesus var á jørðini, at fólk fóru at halda jól.

7 Nógv vita, at jólini og jólasiðirnir hava heidnan uppruna. Fyri umleið 350 árum síðani var tað bannað at halda jól í Onglandi og summastaðni í Amerika, av tí at tað var ein heiðin veitsla. Tað var enntá revsivert at halda jól. Men við tíðini fóru fólk aftur at halda jól. Sonn kristin royna altíð at gera tað, sum Gudi dámar, og tí halda tey ikki jól.

HVAT SIGUR BÍBLIAN UM FØÐINGARDAGAR?

8 Eitt annað, sum hevur stóran týdning fyri nógv, er at halda sín egna føðingardag. Er tað í lagi, at kristin gera tað? Bíblian nevnir bara tveir føðingardagar, og

---

6. Hví valdi mann tann 25. desember til at hátíðarhalda, at Jesus bleiv føddur?
7. Hví halda sonn kristin ikki jól?
8, 9. Hví hildu tey fyrstu kristnu ikki føðingardag?

teir, sum hildu hesar føðingardagarnar, tilbóðu ikki Jehova. (1. Mósebók 40:20; Markus 6:21) Føðingardagar blivu eisini hildnir fyri at æra falskar gudar. Eitt leksikon sigur: „Fornkirkjan metti siðin at vera heidnan.“ (*Den Store Danske Encyklopædi*) Tey fyrstu kristnu hildu altso ikki føðingardag.

9 Teir gomlu rómverjarnir og grikkarnir trúðu, at ein andi var hjástaddur, hvørja ferð eitt menniskja bleiv føtt, og at andin skuldi verja persónin alt lívið. „Hesin andin hevði eitt gátuført samband við tann gudin, ið hevði føðingardag sama dag sum nýfødda barnið,“ sigur ein bók um føðingardagar. – *The Lore of Birthdays.*

10 Jehova dámar ikki veitslur, sum hava samband við falskan átrúnað. (Esaias 65:11, 12) Og tí halda sonn kristin hvørki føðingardag ella nakað annað, sum hevur við falskan átrúnað at gera.

HEVUR TAÐ SO NÓGV AT SIGA?

11 Nógv vita, at jól og aðrar høgtíðir hava heidnan uppruna, men tey halda tær kortini. Tey halda, at høgtíðir eru eitt gott høvi at hugna sær saman við familjuni. Er tað soleiðis, tú hevur tað? Tað er sjálvandi ikki skeivt, at tú gjarna vilt vera saman við familjuni, tí soleiðis hevur Jehova skapt okkum. Hann vil, at vit skulu hava tað gott saman í familjuni. Men tað eigur at hava størri týdning at hava eitt gott samband við Jehova enn at gleða skyldfólk við at halda høgtíðir saman við teimum. Tí segði Paulus: „Rannsakið, hvat Harranum toknast!“ – Efesusbrævið 5:10.

---

10. Hví eiga kristin ikki at halda føðingardag?
11. Hví velja nógv at halda ymiskar høgtíðir? Hvat eigur at hava størstan týdning?

12 Nógv halda ikki, at tað hevur so nógv at siga, hvar ein høgtíð stavar frá. Men tað heldur Jehova. Hann góðkennir ikki høgtíðir, sum hava við falskan átrúnað at gera, ella sum heiðra eitt menniskja ella eitt land. Egyptar hildu til dømis nógvar høgtíðir fyri sínum følsku gudum. Eftir at ísraelsmenn vóru farnir út úr Egyptalandi, tóku teir eina av hesum høgtíðunum til sín og róptu hana eina „høgtíð fyri HARRANUM“. Men Jehova straffaði teir fyri tað. (2. Mósebók 32:2-10) Sum Esaias profetur segði, mugu vit ikki ’nema nakað óreint’. – **Les Esaias 52:11.**

VER BLÍÐUR OG VÍS VIRÐING

13 Fleiri spurningar kunnu stinga seg upp, um tú velur at halda uppat at halda ávísar høgtíðir. Til dømis: ’Hvat skal eg siga, um ein arbeiðsfelagi spyr, hví eg ikki haldi jól? Hvat skal eg gera, um onkur gevur mær eina jólagávu? Hvat skal eg gera, um hjúnafelagin væntar, at eg haldi eina høgtíð? Hvussu kann eg hjálpa børnunum, so tey ikki verða kedd, tí vit ikki halda jól ella føðingardag?’

14 Tú mást brúka vit og skil. Um onkur til dømis sigur gleðilig jól við teg, kanst tú kanska bara siga takk fyri, heldur enn at lata sum einki. Men um onkur gjarna vil vita meira, kanst tú forklára, hví tú ikki heldur eina ávísa høgtíð. Tó mást tú altíð vera blíður, fólkaligur og vísa virðing. Bíblian sigur: „Tala tykkara veri altíð dámlig, kryddað við salti, so tit vita, hvussu tit

---

12. Hvat ger, at Jehova ikki kann góðkenna eina høgtíð?
13. Hvørjir spurningar stinga seg kanska upp, um tú velur at halda uppat at halda ávísar høgtíðir?
14, 15. Hvat kanst tú gera, um onkur til dømis sigur gleðilig jól við teg ella gevur tær eina jólagávu?

skulu svara einum og hvørjum!“ (Kolossebrævið 4:6) Tú kundi kanska fortalt teimum, at tær dámar væl at vera saman við øðrum og eisini at geva gávur, men at tú hevur valt at lata vera við at gera tað í sambandi við ávísar høgtíðir.

15 Hvat skalt tú gera, um onkur til dømis gevur tær eina jólagávu? Tað sigur Bíblian einki um, men hon sigur, at vit altíð skulu hava góða samvitsku. (1. Timoteusarbræv 1:18, 19) Tann, sum vil geva tær eina gávu, veit kanska ikki, at tú ikki heldur jól. Tað kann eisini vera, at hann sigur: ’Eg veit væl, at tú ikki heldur jól, men eg vil gjarna geva tær hesa gávuna allíkavæl.’ Í báðum førum er tað upp til tín, um tú vilt taka ímóti gávuni ella ikki. Men uttan mun til, hvat tú velur at gera, er tað umráðandi at varðveita eina góða samvitsku. Vit vilja ikki gera nakað, sum kann skaða okkara samband við Jehova.

HUGSA UM FAMILJUNA

16 Hvat skalt tú gera, um tey í familjuni gjarna vilja halda jól ella føðingardag? Tú skalt sjálvandi ikki fara at skeldast við tey. Tey hava rætt til sjálv at velja, hvat tey vilja gera. Ver vinarligur og vís virðing fyri teirra avgerðum, tí tú vilt jú eisini gjarna, at tey skulu virða tínar avgerðir. **(Les Matteus 7:12.)** Men hvat kanst tú gera, um familjan gjarna vil, at tú skalt vera saman við teimum um jóltíðir ella í sambandi við aðrar høgtíðir? Bið Jehova hjálpa tær at taka ta røttu avgerðina, og kanna eitt sindur um høgtíðina. Hugsa teg væl um, og set tær fyri at gleða Jehova.

---

16. Hvat skalt tú gera, um tey í familjuni gjarna vilja halda jól ella føðingardag?

17 Hvussu kanst tú hjálpa børnunum, um tey halda tað vera keðiligt, at tit ikki halda jól ella føðingardagar? Tú kundi kanska gjørt okkurt serligt fyri tey av og á ella givið teimum gávur, tá ið tey ikki vænta tað. Eitt tað besta, tú kanst gera fyri tey, er at brúka tíð saman við teimum og vísa teimum, at tú elskar tey.

TILBIÐ GUD UPP Á TANN RÆTTA MÁTAN

18 Jehova væntar, at vit kvetta sambandið við falskan átrúnað og alt, sum hevur við sovorðið at gera. Men vit mugu eisini vísa í gerðum, at vit tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan. Hvussu gera vit tað? Millum annað við at ganga á møti hjá Jehova vitnum. **(Les Hebrearabrævið 10:24, 25.)** Hesi møtini eru ein sera týðandi partur av at tæna Jehova. (Sálmur 22:23; 122:1) Á møtunum kunnu vit gleða og styrkja hvørt annað. – Rómbrævið 1:12.

19 Tað er eisini umráðandi at fortelja øðrum um tað, sum tú hevur lært við at kanna Bíbliuna. Nógv eru sera kedd um alt tað ræðuliga, sum hendir í heiminum. Kanska kennir tú onkran, sum hevur tað so. So kanst tú fortelja honum ella henni, hvussu fantastiskt alt verður í framtíðini. Tá ið tú kemur á møtini, og tá ið tú fortelur øðrum um Bíbliuna, fert tú ikki longur at sakna nakað, sum hevur við falskan átrúnað at gera. Vel at tilbiðja Jehova upp á tann rætta mátan. Tá verður tú glaður og nøgdur, og Jehova fer at geva tær nógv meira, enn tú nakrantíð kundi droymt um! – Malakias 3:10.

---

17. Hvussu kanst tú hjálpa børnunum, um tey føla, at tey missa nakað?
18. Hví skulu vit ganga á møti?
19. Hví er tað umráðandi at fortelja øðrum um tað, sum tú hevur lært við at kanna Bíbliuna?

Tú verður glaður,
táið tú gert Guds vilja

1 HALT TEG FRÁ FALSKARI TILBIÐING

„Farið tí út frá teimum og skiljið tykkum frá teimum ... og nemið einki óreint!“– 2. Korintbræv 6:17

Hví er tað skeivt at brúka halgimyndir og at biðja til tey deyðu?

2. Mósebók 20:4, 5;
1. Jóhannesarbræv 5:21
Jehova vil ikki, at vit brúka halgimyndir.

5. Mósebók 18:10-12
Tey, sum royna at fáa samband við tey deyðu, fáa í veruleikanum samband við illar andar.

2 GUD GÓÐKENNIR IKKI ALLAR HØGTÍÐIR OG SIÐIR

„Rannsakið, hvat Harranum toknast!“– Efesusbrævið 5:10

Hvussu kanst tú finna út av, um tú skalt taka lut í eini høgtíð ella fylgja einum siði?

Ezekiel 44:23;
2. Korintbræv 6:14, 15
Kanna, um høgtíðin ella siðurin hevur heidnan uppruna.

2. Mósebók 32:2-10
Sjálvt um tey, sum halda eina høgtíð, meina tað væl, er tað ikki vist, at Gud góðkennir tað.

Dániel 3:1-27
Halt teg frá høgtíðum og siðum, sum heiðra menniskju, eina samskipan ella eitt land.

1. Timoteusarbræv 1:18, 19
Brúka vit og skil, men hav altíð góða samvitsku fyri Jehova Gudi.

3 VER BLÍÐUR OG VÍS VIRÐING, TÁ IÐ TÚ FORTELUR ØÐRUM UM TÍNA TRÚGV

„Tala tykkara veri altíð dámlig, kryddað við salti, so tit vita, hvussu tit skulu svara einum og hvørjum!“– Kolossebrævið 4:6

Hvat er gott at hugsa um, tá ið tú fortelur øðrum um tína trúgv?

Matteus 7:12
Vís virðing fyri tí, sum onnur velja at gera, tí tú vilt eisini gjarna, at tey virða tínar avgerðir.

2. Timoteusarbræv 2:24
Ver altíð blíður, og skeldast ikki við onnur um tína trúgv.

1. Pætursbræv 3:15
Ver mildur og vís virðing, tá ið tú forklárar, hvat tú trýrt upp á.

Hebrearabrævið 10:24, 25
Møtini hjá Jehova vitnum geva gleði, og har fært tú hjálp til at finna út av, hvat tú skalt siga, tá ið onkur setur spurnartekn við tína trúgv.

HVUSSU SKULU VIT BIÐJA?

Í MUN til alheimin er jørðin ógvuliga lítil. Tá ið Jehova hyggur niður á jørðina, eru øll menniskju bara sum ein evarska lítil dropi í einari spann. (Sálmur 115:15; Esaias 40:15) Sjálvt um vit eru so smá í mun til alheimin, lesa vit hetta í Bíbliuni: 'Harrin er nær hjá øllum, ið kalla á hann, hjá øllum, ið kalla á hann av sonnum. Hann uppfyllir ynski teirra, ið óttast hann, hann hoyrir róp teirra og hjálpir teimum.' (Sálmur 145:18, 19, Dahl/Viderø) Hugsa tær, hvussu stórt tað er! Okkara stóri skapari, Jehova, vil gjarna vera nær hjá okkum og lurta eftir okkara bønum. Bønin er ein fantastisk gáva, sum vit øll hava fingið frá Jehova.

2 Men Jehova lurtar bara eftir okkum, um vit biðja til hansara upp á tann mátan, sum hann góðkennir. Hvussu kunnu vit gera tað? Latið okkum vita, hvat Bíblian sigur.

HVÍ SKULU VIT BIÐJA TIL GUD?

3 Jehova vil, at vit skulu biðja til hansara. Tað síggja vit millum annað í **Filippibrævinum 4:6, 7. (Les.)** Jehova er sera góður við teg, og hann vil, at tú skalt fortelja honum, hvussu tú hevur tað, og hvat tú gongur og hugsar um.

4 Vinir, sum ofta tosa saman um, hvussu teir hava

1, 2. Hví er bønin ein gáva, og hví mugu vit vita, hvat Bíblian sigur um bøn?
3. Hví skulu vit biðja til Jehova?
4. Hvussu kann bøn styrkja títt vinalag við Jehova?

Hann, „sum hevur skapt Himmal og jørð“, vil fegin lurta eftir okkara bønum. – Sálmur 115:15

tað, og hvat teir stríðast við, verða tættari knýttir. Og soleiðis er tað eisini við okkara sambandi við Jehova. Tá ið vit tosa við hann í bøn, verða vit tættari knýtt at honum. Í Bíbliuni fortelur hann okkum um sínar tankar og kenslur, og hann sigur okkum, hvat hann fer at gera í framtíðini. Tá ið tú ofta biður til Jehova og sigur honum, hvussu tú hevur tað innast inni, verður títt vinalag við hann enn sterkari. – Jákupsbrævið 4:8.

HVAT MUGU VIT GERA, UM GUD SKAL LURTA EFTIR OKKARA BØNUM?

5 Lurtar Jehova eftir øllum bønum? Nei. Tá ið Esaias profetur livdi, segði Jehova við ísraelsmenn: „Hvussu nógv tit so biðja, hoyri Eg ikki – tí hendur tykkara eru fullar av blóði!“ (Esaias 1:15) Jehova lurtar altso ikki eftir teimum, sum gera tað, hann hatar. Við øðrum orðum kunnu vit sjálv hava ávirkan á, um hann lurtar eftir okkara bønum ella ikki.

---

5. Hvussu vita vit, at Jehova ikki lurtar eftir øllum bønum?

6 Vit mugu trúgva á Jehova, um vit vilja, at hann skal lurta eftir okkara bønum. (Markus 11:24) Paulus greiðir frá: „Uttan trúgv er tað ómøguligt at toknast Honum. Tí tann, sum stígur fram fyri Gud, má trúgva, at Hann er, og at Hann lønir teimum, ið søkja Hann.“ (Hebrearabrævið 11:6) Men tað er ikki nokk bara at siga, at vit trúgva. Vit mugu vísa okkara trúgv í verki og fylgja Guds boðum hvønn dag. – **Les Jákupsbrævið 2:26.**

7 Tað er umráðandi, at vit vísa virðing og eru eyðmjúk, tá ið vit biðja til Jehova. Hví? Um vit fingu møguleika at tosa við ein kong ella forseta, høvdu vit sjálvsagt víst honum virðing. Skuldu vit so ikki víst Jehova, sum er tann størsti í alheiminum, uppaftur størri virðing? (1. Mósebók 17:1; Sálmur 138:6, *NW*) Tá ið vit biðja til Jehova, skulu vit ikki bara siga tað sama umaftur og umaftur, men lata tað, vit siga, koma frá hjartanum. – Matteus 6:7, 8.

8 Tá ið vit biðja til Jehova um hjálp, skulu vit ikki bara sita hendur í favn og vænta, at hann orðnar alt. Biðja vit til dømis um at fáa tað, sum vit hava brúk fyri til dagin og vegin, mugu vit eisini gera okkara part og vera villig at taka tað arbeiðið, sum vit kunnu fáa. (Matteus 6:11; 2. Tessalonikabræv 3:10) Og biðja vit Jehova hjálpa okkum at halda uppat við at gera nakað, sum er skeivt, mugu vit ansa væl eftir, at vit ikki koma í eina støðu, sum kundi freistað okkum. (Kolossebrævið 3:5) Tað er

---

6. Hví hevur tað so stóran týdning at trúgva? Hvussu vísa vit, at vit trúgva?

7. (a) Hví skulu vit vera eyðmjúk og vísa virðing, tá ið vit biðja til Jehova? (b) Hvussu kunnu vit vísa, at vit meina tað, sum vit siga í okkara bønum?

8. Hvat mugu vit gera, tá ið vit hava biðið um okkurt?

altso umráðandi, at vit gera okkara til, at tað, sum vit biðja um, verður veruleiki. Nú fara vit at kanna nakrar vanligar spurningar um bøn.

VANLIGIR SPURNINGAR UM BØN

9 Hvønn skulu vit biðja til? Jesus segði, at vit skuldu biðja til 'faðir okkara, sum er í himli'. (Matteus 6:9) Hann segði eisini: „Eg eri vegurin, sannleikin og lívið; eingin kemur til Faðirin uttan við Mær." (Jóhannes 14:6) So tað er bara Jehova, vit skulu biðja til, og vit skulu gera tað í Jesu navni. Men hví skulu vit biðja í Jesu navni? Jú, um Jehova skal lurta eftir okkara bønum, mugu vit vísa virðing fyri tí stóru og týdningarmiklu uppgávuni, sum hann hevur givið Jesusi. Sum vit hava lært, kom Jesus niður á jørðina fyri at bjarga okkum undan synd og deyða. (Jóhannes 3:16; Rómbrævið 5:12) Jehova hevur eisini útnevnt Jesus til høvuðsprest og dómara. – Jóhannes 5:22; Hebrearabrævið 6:20.

10 Er tað neyðugt at sita ella standa upp á ein ávísan máta, tá ið vit biðja? Nei, tað týdningarmesta er, at vit biðja upp á ein virðiligan máta. (Nehemias 8:6; Dániel 6:11; Markus 11:25) Tað, sum hevur mest at siga fyri Jehova, er ikki, at vit sita ella standa upp á ein ávísan máta, men at vit meina tað, vit siga. Vit kunnu biðja hart ella innantanna, nær sum helst og hvar sum helst. Vit kunnu vera vís í, at Jehova hoyrir okkum, sjálvt um eingin annar ger. – Nehemias 2:1-6.

---

9. Hvønn skulu vit biðja til? Hvat lærir Jóhannes 14:6 okkum um bøn?

10. Er tað neyðugt at sita ella standa upp á ein ávísan máta, tá ið vit biðja? Greið frá.

11 Hvat kunnu vit biðja um? Vit kunnu biðja um alt, sum ikki er í stríð við Guds vilja. Bíblian sigur: „Biðja vit um okkurt eftir vilja Hansara, so hoyrir Hann okkum.“ (1. Jóhannesarbræv 5:14) Kunnu vit biðja um nakað persónligt? Ja, avgjørt. Tá ið vit biðja til Jehova, eigur tað at vera sum at tosa við ein góðan vin. Vit kunnu siga alt við Jehova. (Sálmur 62:9) Vit kunnu biðja hann geva okkum av sínum heilaga anda, so vit fáa styrki til at gera tað, sum er rætt. (Lukas 11:13) Vit kunnu eisini biðja Jehova um vísdóm til at taka góðar avgerðir og um hjálp til at klára trupulleikar. (Jákupsbrævið 1:5) Eitt annað, sum er umráðandi, er at biðja Jehova um fyrigeving fyri okkara syndir. (Efesusbrævið 1:3, 7) Vit mugu eisini biðja fyri øðrum, millum annað fyri okkara familju og vinum í samkomuni. – Ápostlasøgan 12:5; Kolossebrævið 4:12.

12 Hvat hevur størstan týdning at biðja um? Tað, sum hevur við Jehova og hansara vilja at gera. Vit mugu eisini takka honum fyri alt, sum hann ger fyri okkum. (1. Krønikubók 29:10-13) Tá ið Jesus var á jørðini, lærdi hann lærisveinarnar at biðja, og hann vísti, hvat vit mugu minnast til at biðja um. **(Les Matteus 6:9-13.)** Hann segði, at vit skulu biðja um, at Guds navn skal verða halgað, at Guds ríki skal koma, og at hansara vilji skal henda á jørðini. Ikki fyrr enn vit hava biðið um hesi týðandi tingini, lærdi Jesus okkum at biðja um tað, sum vit sjálv hava brúk fyri. Tá ið Jehova og hansara vilji hava størstan týdning fyri okkum, hoyrist tað aftur í okkara bønum.

---

11. Hvat kunnu vit millum annað biðja um?
12. Hvat hevur størstan týdning at biðja um?

13 Hvussu langar skulu okkara bønir vera? Tað sigur Bíblian ikki nakað um. Okkara bønir kunnu vera stuttar ella langar, alt eftir støðuni. Vit biðja kanska eina stutta bøn, áðrenn vit fáa okkum at eta, men eina longri bøn, tá ið vit takka Jehova og siga honum, hvat vit ganga og hugsa um. (1. Sámuelsbók 1:12, 15) Vit biðja ikki langar bønir bara fyri, at onnur skulu síggja upp til

13. Hvussu langar skulu okkara bønir vera?


Tú kanst biðja
nær sum helst

Jehova kann brúka vinirnar í samkomuni
til at svara okkara bønum

okkum, eins og nakrir menn gjørdu á døgum Jesusar. (Lukas 20:46, 47) Jehova dámar ikki sovorðnar bønir. Tað, sum hevur týdning hjá honum, er, at okkara bønir koma frá hjartanum.

[14] **Hvussu ofta skulu vit biðja?** Jehova vil, at vit tosa við hann ofta. Bíblian sigur: 'Verið áhaldandi í bønini', 'biðið eina og hvørja tíð', og „biðið uttan íhald". (Rómbrævið 12:12; Efesusbrævið 6:18; 1. Tessalonikabræv 5:17) Jehova er altíð til reiðar at lurta eftir okkum. Vit kunnu hvønn dag takka honum fyri, at hann er so góður við okkum og gevur okkum so nógv. Vit kunnu eisini biðja um vegleiðing, styrki og troyst. Tað er veruliga ein gáva at sleppa at biðja til Jehova, og vit vísa, at

14. Hvussu ofta skulu vit biðja, og hvat lærir tað okkum um Jehova?

vit virðismeta hesa gávuna, um vit tosa við hann so ofta sum gjørligt.

15 **Hví skulu vit siga „amen“ eftir eina bøn?** Orðið „amen“ merkir „tað er vist“ ella „lat tað verða so“. Tá ið vit siga „amen“ eftir eina bøn, vísa vit, at vit veruliga meina tað, sum vit siga við Jehova. (Sálmur 41:14) Bíblian vísir eisini, at tað er gott at siga „amen“, antin hart ella innantanna, eftir eina bøn, sum ein annar biður. Tá ið vit gera tað, vísa vit, at vit eru samd í tí, sum bleiv sagt í bønini. – 1. Krønikubók 16:36; 1. Korintbræv 14:16.

HVUSSU SVARAR GUD OKKARA BØNUM?

16 Svarar Jehova veruliga okkara bønum? Ja, tað ger hann. Bíblian sigur, at ’hann hoyrir bønir’, og at ’hann svarar’, tá ið vit biðja. (Sálmur 65:3; Esaias 30:19) Jehova hoyrir og svarar bønum frá milliónum av menniskjum, og hann ger tað upp á nógvar ymiskar mátar.

17 Jehova brúkar millum annað einglar og menniskju, tá ið hann svarar okkara bønum. (Hebrearabrævið 1:13, 14) Nógv dømi eru um, at fólk hava biðið til Gud um hjálp til at skilja Bíbliuna og stutt aftaná hava fingið vitjan av Jehova vitnum. Tað vísir, at einglarnir hava ein týðandi leiklut í arbeiðinum við at boða gleðiboðskapin. **(Les Opinberingina 14:6.)** Og nógv av okkum hava kanska upplivað, at onkur í samkomuni hevur hjálpt okkum við einum trupulleika, eftir at vit hava biðið til Jehova um hjálp. – Orðtøkini 12:25; Jákupsbrævið 2:16.

---

15. Hví skulu vit siga „amen“ eftir eina bøn?
16. Hví kunnu vit siga, at Jehova svarar okkara bønum?
17. Hvussu brúkar Jehova einglar og menniskju til at svara okkara bønum?

18 Jehova brúkar eisini sín heilaga anda til at svara okkara bønum. Tá ið vit biðja um hjálp til at klára ein trupulleika, kann hann brúka sín heilaga anda til at geva okkum vegleiðing og styrki. (2. Korintbræv 4:7) Aftrat tí brúkar hann Bíbliuna til at svara okkara bønum og til at hjálpa okkum at taka góðar avgerðir. Tá ið vit lesa í Bíbliuni, finna vit kanska nøkur ørindi, sum kunnu hjálpa okkum í tí støðuni, vit eru í. Jehova kann eisini fáa ein, sum svarar á einum møti, at siga akkurát tað, sum vit hava brúk fyri at hoyra, ella hann kann fáa ein elsta í samkomuni at vísa okkum á ein tanka úr Bíbliuni. – Galatiabrævið 6:1.

19 Viðhvørt kunnu vit kanska føla tað sum, at Jehova ikki svarar okkara bønum. Men hann veit, akkurát nær og hvussu tað er best at svara teimum. Hann veit, hvat vit hava brúk fyri. Kanska mugu vit blíva við at biðja um nakað ávíst í eina tíð, fyri at vísa at vit veruliga meina tað, vit siga, og at vit líta á hann. (Lukas 11:5-10) Av og á svarar Jehova okkara bønum upp á ein máta, sum vit ikki høvdu roknað við. Um vit til dømis biðja um hjálp í einari torførari støðu, kann tað vera, at hann í staðin fyri at beina fyri trupulleikanum gevur okkum styrki til at klára støðuna. – **Les Filippibrævið 4:13.**

20 Tað er ein stórur framíhjárættur, at vit kunnu biðja til Jehova! Vit kunnu vera vís í, at hann lurtar eftir okkum. (Sálmur 145:18) Og biðja vit ofta til Jehova, verður okkara vinalag við hann enn sterkari.

---

18. Hvussu brúkar Jehova sín heilaga anda og Bíbliuna til at svara okkara bønum?
19. Hví kann tað virka sum, at Jehova ikki svarar okkara bønum?
20. Hví skulu vit biðja til Jehova ofta?

1 JEHOVA LURTAR EFTIR OKKARA BØNUM

’Harrin er nær hjá øllum, ið kalla á hann, hjá øllum, ið kalla á hann av sonnum.’– Sálmur 145:18, Dahl/Viderø

Hvat skulu vit gera, um vit vilja, at Jehova skal lurta eftir okkara bønum?

Hebrearabrævið 11:6
Vit mugu hava trúgv.

Sálmur 138:6, *NW*
Vit mugu vera eyðmjúk og vísa virðing.

Jákupsbrævið 2:26
Vit mugu vísa í gerðum, at vit meina tað, vit hava biðið um.

Matteus 6:7, 8
Tá ið vit biðja, má tað koma frá hjartanum. Vit skulu ikki bara siga tað sama umaftur og umaftur.

Esaias 1:15
Vit mugu liva, soleiðis sum Gud vil, at vit skulu liva.

2 VANLIGIR SPURNINGAR UM BØN

Hvønn skulu vit biðja til?

Matteus 6:9; Jóhannes 14:6

Er tað neyðugt at sita ella standa upp á ein ávísan máta, tá ið vit biðja?

Nehemias 8:5, 6; Dániel 6:11; Markus 11:25

Hoyrir Jehova okkum, tá ið vit biðja innantanna?

Nehemias 2:1-6

Hvussu langar skulu okkara bønir vera?

1. Sámuelsbók 1:12, 15; Lukas 20:46, 47

Hvussu ofta skulu vit biðja?

Rómbrævið 12:12; 1. Tessalonikabræv 5:17

Hví siga vit „amen“ eftir eina bøn?

1. Krønikubók 16:36; 1. Korintbræv 14:16

3 HVAT KUNNU VIT BIÐJA UM?

„Biðja vit um okkurt eftir vilja Hansara, so hoyrir Hann okkum.“– 1. Jóhannesarbræv 5:14

Hvat kunnu vit millum annað biðja um?

Matteus 6:9, 10
Vit kunnu biðja um, at Guds vilji skal henda.

1. Krønikubók 29:10-13
Vit kunnu nevna tað, sum vit eru takksom fyri.

Matteus 6:11-13
Vit kunnu biðja um nakað, vit hava brúk fyri ella stúra fyri.

Lukas 11:13
Vit kunnu biðja um heilagan anda.

Jákupsbrævið 1:5
Vit kunnu biðja um vísdóm til at taka góðar avgerðir.

Filippibrævið 4:13
Vit kunnu biðja um styrki til at halda út.

Efesusbrævið 1:3, 7
Vit kunnu biðja um fyrigeving fyri tað, sum vit hava gjørt skeivt.

Ápostlasøgan 12:5
Vit kunnu biðja fyri øðrum.

4 JEHOVA SVARAR OKKARA BØNUM

„Tú, sum hoyrir bønir, til Tín kemur alt hold.“– Sálmur 65:3

Hvussu svarar Jehova okkara bønum?

Orðtøkini 12:25; Opinberingin 14:6
Jehova brúkar einglar og menniskju til at hjálpa okkum.

2. Korintbræv 4:7
Hann hjálpir okkum við sínum heilaga anda.

Filippibrævið 4:6, 7, 13
Hann gevur okkum frið í sinnið og styrki til at halda út.

Galatiabrævið 6:1; 2. Timoteusarbræv 3:16, 17
Hann gevur okkum vísdóm gjøgnum Bíbliuna og samkomuna.

KAPITTUL 18

SKAL EG LATA MEG DOYPA?

MEÐAN tú hevur kannað hesa bókina, hevur tú lært nógv úr Bíbliuni, til dømis at Gud hevur lovað, at vit kunnu fáa ævigt lív, og eisini hvat hendir, táið vit doyggja, og at tey deyðu fáa lívið aftur. (Prædikarin 9:5; Jóhannes 5:28, 29; Opinberingin 21:3, 4) Kanska ert tú farin at ganga á møti hjá Jehova vitnum og ert komin fram til, at tey tilbiðja Gud upp á tann rætta mátan. (Jóhannes 13:35) Følir tú, at tú kennir Jehova betur nú? Og hevur tú hug at tæna honum? So hugsar tú kanska: 'Hvat er tað næsta stigið, eg skal taka?'

1. Hvat hugsar tú kanska, nú táið tú hevur kannað hesa bókina?

2 Ein etiopiskur maður, sum livdi í fyrstu øld, hugsaði nakað líknandi. Hann møtti Filipi, einum av lærisveinunum hjá Jesusi, eina tíð eftir at Jesus var reistur upp til lív í himli. Filip hjálpti honum at skilja, at Jesus var Messias. Tað, sum etiopiski maðurin lærdi, hugtók hann so nógv, at hann segði: „Hygg, her er vatn – hvat forðar fyri, at eg verði doyptur?“ – Ápostlasøgan 8:26-36.

3 Bíblian lærir, at tey, sum vilja tæna Jehova, mugu lata seg doypa. Jesus segði: „Gerið øll fólkasløg til lærisveinar, [og] *doypið teir.“* (Matteus 28:19) Jesus bleiv eisini sjálvur doyptur. Hann varð koyrdur heilt undir vatn og fekk ikki bara eitt sindur av vatni á høvdið. (Matteus 3:16) Soleiðis er tað eisini í dag. Um onkur vil doypast, má hann ella hon heilt undir vatn.

4 Tá ið tú verður doyptur, vísir tú øðrum, at tú gjarna vilt vera vinur við Gud og tæna honum. (Sálmur 40:8, 9) Men kanska hugsar tú um, hvat tú skalt gera fyri at kunna blíva doyptur.

KUNNSKAPUR OG TRÚGV

5 Áðrenn tú kanst blíva doyptur, mást tú *læra Jehova og Jesus at kenna.* Og tað ert tú longu í holt við, nú tá ið tú kannar Bíbliuna. **(Les Jóhannes 17:3.)** Men tað er ikki nokk. Bíblian sigur, at tú skalt „fyllast

---

2. Hví vildi ein etiopiskur maður fegin doypast?
3. (a) Hvørji boð gav Jesus? (b) Hvussu skal tað ganga fyri seg, tá ið onkur verður doyptur?
4. Hvat vísir tú øðrum, tá ið tú verður doyptur?
5. (a) Hvat mást tú gera, áðrenn tú kanst blíva doyptur? (b) Hví hevur tað týdning at ganga á møti?

við kunnskapi“ um Guds vilja. (Kolossebrævið 1:9) Møtini hjá Jehova vitnum kunnu hjálpa tær at læra meira um Jehova, og tað er ein góð grund til at fara á tey. – Hebrearabrævið 10:24, 25.

6 Jehova væntar sjálvandi ikki, at tú veitst alt um Bíbliuna, áðrenn tú verður doyptur. Tað væntaði hann heldur ikki av tí etiopiska manninum, áðrenn hann bleiv doyptur. (Ápostlasøgan 8:30, 31) Vit kunnu faktiskt halda fram at læra um Jehova í allar ævir. (Prædikarin 3:11) Men fyri at blíva doyptur mást tú skilja og trúgva upp á tær grundleggjandi lærurnar í Bíbliuni. – Hebrearabrævið 5:12.

7 Bíblian sigur: „Uttan trúgv er tað ómøguligt at toknast [Gudi].“ (Hebrearabrævið 11:6) Tú mást altso hava trúgv, áðrenn tú kanst blíva doyptur. Bíblian sigur okkum, at lærisveinarnir hjá Jesusi undirvístu nøkrum fólkum í Korint, og tað hevði við sær, at nógv „komu til trúgv og lótu seg doypa“. (Ápostlasøgan 18:8) Tað, at tú kannar Bíbliuna, kann eisini hjálpa tær at fáa *trúgv* á Guds lyfti og á Jesu offur, sum kann bjarga okkum undan synd og deyða. – Josva 23:14; Ápostlasøgan 4:12; 2. Timoteusarbrævið 3:16, 17.

FORTEL ØÐRUM UM BÍBLIUNA

8 So hvørt sum tú lærir meira um Bíbliuna og skilur, hvussu hon hjálpir tær at fáa eitt betri lív, verður

---

6. Hvussu nógv skalt tú vita um Bíbliuna, áðrenn tú kanst blíva doyptur?
7. Hvat kann tað hava við sær at kanna Bíbliuna?
8. Hvat kann geva tær hug at fortelja øðrum um tað, sum tú hevur lært?

trúgvin hjá tær sterkari. Og so fært tú hug til at *fortelja øðrum um tað, sum tú hevur lært.* (Jeremias 20:9; 2. Korintbræv 4:13) Men hvørjum skalt tú fortelja tað?

9 Tú kanst kanska byrja við at tosa við familjuna, vinfólk, grannar ella starvsfelagar um tað, sum tú hevur lært. Men royn altíð at vera blíður og at vísa virðing. Við tíðini fert tú at kunna boða saman við samkomuni. Tá ið tú følir, at tú ert til reiðar at gera tað, kanst tú tosa við tann, sum kannar Bíbliuna saman við tær. Um hann ella hon eisini heldur, at tú ert til reiðar, og tú livir eftir Bíbliuni, fara tit at møtast við tveimum elstum í samkomuni.

10 Teir fara at tosa við teg fyri at vita, um tú skilur tær grundleggjandi lærurnar í Bíbliuni, um tú livir eftir teimum, og um tú gjarna vilt vera eitt Jehova vitni. Teir elstu taka sær av og hjálpa øllum í samkomuni, eisini tær, so tú skalt ikki vera bangin fyri at tosa við teir. (Ápostlasøgan 20:28; 1. Pætursbræv 5:2, 3) Eftir møtið fært tú at vita, um tú sleppur at boða saman við samkomuni.

11 Teir elstu siga kanska, at tú mást gera nakrar broytingar, áðrenn tú kanst boða saman við samkomuni. Hví hevur tað so stóran týdning at gera tær broytingarnar? Tí tá ið vit tosa við onnur um Gud, umboða vit Jehova og mugu liva upp á ein máta,

---

9, 10. (a) Hvørjum kanst tú byrja við at fortelja um Bíbliuna? (b) Hvat skalt tú gera, um tú gjarna vilt boða saman við samkomuni?

11. Hví hevur tað so stóran týdning at gera broytingar, áðrenn tú kanst boða saman við samkomuni?

sum ærir hann. – 1. Korintbræv 6:9, 10; Galatiabrævið 5:19-21.

ANGRA OG VEND VIÐ

12 Har er eisini nakað annað, sum tú mást gera, áðrenn tú kanst blíva doyptur. Pætur ápostul segði: *„Fáið tí annað sinni* og vendið við, so syndir tykkara kunnu verða útstrikaðar.“ (Ápostlasøgan 3:19) Hvat vil tað siga at ’fáa annað sinni’? Tað vil siga, at vit veruliga eru kedd um tað skeiva, vit hava gjørt, og angra tað. Um tú til dømis hevur livað eitt seksuelt ómoralskt lív, er tað neyðugt at angra tað. Og sjálvt um tú alt lívið hevur gjørt títt besta fyri at gera tað, sum er rætt, er tað framvegis neyðugt at angra, tí vit synda øll og hava brúk fyri, at Gud fyrigevur okkum. – Rómbrævið 3:23; 5:12.

13 Er tað nokk, at vit bara eru kedd um tað, sum vit hava gjørt? Nei, tí Pætur segði eisini, at vit skuldu *’venda við’*. Tað merkir, at vit mugu halda uppat at gera tað, sum er skeivt, og fara at gera tað, sum er rætt. Ímynda tær, at tú koyrir bil og ert á veg til eitt ávíst stað fyri fyrstu ferð. Tá ið tú hevur koyrt eina løtu, uppdagar tú, at tú koyrir skeivan veg. Hvat gert tú? Tú setur uttan iva ferðina niður, steðgar bilinum, vendir við og koyrir so rætta vegin. Nakað líknandi kann henda, tá ið tú kannar Bíbliuna. Tú uppdagar kanska, at tú mást broyta nakrar vanar ella okkurt annað í tínum lívi. Tá er umráðandi, at tú ert villigur

---

12. Hví mugu øll angra?
13. Hvat merkir tað at ’venda við’?

at 'venda við', altso gera tær neyðugu broytingarnar og byrja at gera tað, sum er rætt.

EIN TÝÐANDI AVGERÐ

14 Eitt annað týðandi stig, tú mást taka, áðrenn tú kanst blíva doyptur, er at *víga títt lív til Jehova.* Tað gert tú við at biðja eina bøn til Jehova og lova honum, at tú bara vilt tilbiðja hann, og at hansara vilji skal hava størstan týdning í tínum lívi. – Lukas 4:8.

15 At lova Jehova, at tú bara vilt tæna honum, er sum at lova at liva restina av lívinum saman við einum, tú elskar. Hugsa tær ein mann og eina kvinnu, sum ganga saman. So hvørt sum maðurin lærir kvinnuna betur at kenna, fer hann at elska hana og fær hug at giftast við henni. Sjálvt um tað er ein stór avgerð at taka, so ger hann tað fegin, tí hann elskar hana.

16 So hvørt sum tú lærir Jehova at kenna, fert tú at elska hann, og tú fært hug at gera hansara vilja. Kærleikin fær teg at víga títt lív til hansara. Bíblian sigur, at øll, sum vilja fylgja Jesusi, mugu 'avnokta seg sjálv'. (Markus 8:34) Hvat merkir tað? Tað merkir, at tað týdningarmesta í tínum lívi verður at gleða Jehova og at seta hansara vilja fram um tíni egnu ynski og mál. – **Les 1. Pætursbræv 4:2.**

VER IKKI BANGIN FYRI AT MISEYDNAST

17 Nøkur vilja ikki víga sítt lív til Jehova, tí tey eru bangin fyri, at tey ikki klára at halda sítt lyfti um at

---

14. Hvat ber tað í sær at víga sítt lív til Jehova?
15, 16. Hvat eigur at fáa teg at víga títt lív til Jehova?
17. Hví vilja nøkur ikki víga sítt lív til Jehova?

tæna honum. Tey vilja ikki gera Jehova keddan. Og kanska hugsa tey, at tey ikki skulu standa Jehova til svars fyri tað, sum tey gera, um tey ikki hava vígt seg til hansara.

18 Kærleikin til Jehova hjálpir tær at vinna á óttanum fyri at gera hann keddan. Tú elskar Jehova, og tí fert tú at gera títt besta fyri at halda tað lyftið, sum tú hevur givið honum. (Prædikarin 5:3; Kolossebrævið 1:10) Tú fert ikki at halda, at tað er ov ringt at gera tað, sum Jehova vil. Jóhannes ápostul skrivaði: „Tað er kærleikin til Gud, at vit halda boð Hansara; og boð Hansara eru ikki tung.“ – 1. Jóhannesarbræv 5:3.

19 Tú skalt ikki vera fullkomin fyri at kunna víga títt lív til Jehova. Hann væntar ikki meira av okkum, enn vit klára. (Sálmur 103:14) Hann fer at hjálpa tær at gera tað rætta. (Esaias 41:10) Um tú lítur fult og fast á Jehova, „so skal Hann gera gøtur tínar rættar“. – Orðtøkini 3:5, 6.

VÍS TÍNA AVGERÐ ALMENT

20 Følir tú, at tú ert til reiðar at víga títt lív til Jehova? Tá ið tú hevur vígt títt lív til hansara, er tað næsta stigið at *blíva doyptur.*

21 Sig við samskiparan í elstaráðnum í tínari samkomu, at tú hevur vígt títt lív til Jehova, og at tú gjarna vilt doypast. Hann syrgir so fyri, at nakrir

---

18. Hvat kann hjálpa tær at vinna á óttanum fyri at gera Jehova keddan?
19. Hví skalt tú ikki vera bangin fyri at víga títt lív til Jehova?
20. Hvat er tað næsta, tú skalt gera, eftir at tú hevur vígt títt lív til Jehova?
21, 22. Hvussu vísir tú tína avgerð alment?

Tú mást kanna Bíbliuna, áðrenn tú kanst blíva doyptur

Ein sterk trúgv gevur tær hug til at fortelja øðrum um tað, sum tú hevur lært

elstar tosa við teg um tær grundleggjandi lærurnar í Bíbliuni. Um teir halda, at tú ert til reiðar at blíva doyptur, kanst tú blíva tað, næstu ferð Jehova vitni hava stevnu. Á stevnuni verður ein fyrilestur, sum greiðir frá, hvat dópurin merkir. Eftir tað fer talarin at seta teimum, sum skulu doypast, tveir einfaldar spurningar. Tá ið tú svarar spurningun-

um, vísir tú alment, hvat tú trýrt upp á. – Rómbrævið 10:10.

22 Og síðani verður tú doyptur, tað vil siga koyrdur heilt undir vatn, og soleiðis vísir tú, at tú hevur vígt títt lív til Jehova. Frá tí degnum ert tú eitt Jehova vitni.

Hevur tú lovað Jehova, at tú vilt tæna honum?

Tá ið tú verður doyptur, vísir tú, at tú gjarna vilt gera Guds vilja

HVAT MERKIR DÓPURIN?

23 Jesus segði, at hansara lærisveinar skuldu doypast „til navn Faðirsins, Sonarins og Heilaga Andans“. **(Les Matteus 28:19.)** Hvat merkir tað? Tað merkir, at vit viðurkenna myndugleikan hjá Jehova, leiklutin hjá Jesusi í Guds ætlan, og at Jehova brúkar sín heilaga anda til at fullføra sín vilja. – Sálmur 83:19; Matteus 28:18; Galatiabrævið 5:22, 23; 2. Pætursbræv 1:21.

24 Dópurin hevur sera stóran týdning. Táið tú verður koyrdur heilt undir vatn, er tað ein mynd upp á, at tú hevur lagt títt gamla lív aftur um teg, at tú ímyndarliga sæð doyrt í mun til tín fyrrverandi máta at liva upp á. Táið tú kemur upp úr vatninum, byrjar eitt heilt nýtt lív hjá tær. Frá tá av er Jehova og hansara vilji tað týdningarmesta í tínum lívi. Tú hevur ikki vígt títt lív til eitt menniskja, eina samskipan ella eitt arbeiði. Tú hevur vígt títt lív til Jehova.

25 Táið tú hevur vígt títt lív til Jehova, kanst tú fáa eitt tætt vinalag við hann. (Sálmur 25:14) Men mann verður ikki frelstur, bara tí mann er doyptur. Paulus skrivaði: „Arbeiðið ... við ótta og bivan uppá frelsu tykkara!“ (Filippibrævið 2:12) Dópurin er altso bara byrjanin. Men hvat kanst tú gera fyri at varðveita títt vinalag við Jehova? Tann spurningurin verður svaraður í tí síðsta kapitlinum.

---

23. Hvat merkir tað at blíva doyptur „til navn Faðirsins, Sonarins og Heilaga Andans“?
24, 25. (a) Hvat er dópurin ein mynd upp á? (b) Hvør spurningur verður svaraður í tí síðsta kapitlinum?

1 SKAL EG LATA MEG DOYPA?

„Hygg, her er vatn – hvat forðar fyri, at eg verði doyptur?“– Ápostlasøgan 8:36

Hví skalt tú lata teg doypa, og hvussu skal tað ganga fyri seg?
Dópurin vísir, at tú hevur lagt tín fyrrverandi máta at liva upp á aftur um teg og nú livir fyri at gera Guds vilja.

Matteus 28:19, 20
Tú mást lata teg doypa, um tú vilt tæna Jehova.

Sálmur 40:9
Tá ið tú letur teg doypa, vísir tú øðrum, at tú vilt tæna Jehova.

Matteus 3:16
Tú mást heilt undir vatn akkurát sum Jesus, tá ið hann bleiv doyptur.

2 JEHOVA VÆNTAR ONGANTÍÐ MEIRA, ENN TÚ KLÁRAR

„Tað er kærleikin til Gud, at vit halda boð Hansara; og boð Hansara eru ikki tung.“– 1. Jóhannesarbræv 5:3

Hví skalt tú ikki vera bangin fyri at víga títt lív til Jehova?

Sálmur 103:14; Esaias 41:10
Tú skalt ikki vera fullkomin fyri at víga títt lív til Jehova. Hann hjálpir tær at gera tað, sum er rætt.

Kolossebrævið 1:10
Kærleikin til Jehova hjálpir tær at vinna á óttanum fyri at gera hann keddan.

3 HVAT SKALT TÚ GERA, ÁÐRENN TÚ KANST BLÍVA DOYPTUR?

„At gera vilja Tín, Gud Mín, er gleði Mín, lóg Tín er Mær í hjarta!“– Sálmur 40:9

Hvat eigur tú at gera, áðrenn tú vígir títt lív til Jehova?

Jóhannes 17:3
KANNA GUDS ORÐ
Lær Jehova og Jesus at kenna. Meira tú lærir um teir, meira fert tú at elska teir.

Hebrearabrævið 11:6
STYRK TÍNA TRÚGV
Tú mást líta fult og fast á lyftini frá Jehova og á, at Jesu offur kann bjarga okkum undan synd og deyða.

Ápostlasøgan 3:19
ANGRA
Tað vil siga, at tú veruliga ert keddur um tað skeiva, tú hevur gjørt.

VEND VIÐ
Tað vil siga, at tú heldur uppat at gera tað, sum er skeivt, og fert at gera tað, sum er rætt.

1. Pætursbræv 4:2
VÍGA TÍTT LÍV TIL JEHOVA
Tað vil siga, at tú biður eina bøn til Jehova og lovar honum, at tú bara vilt tilbiðja hann, og at hansara vilji skal hava størstan týdning í tínum lívi.

KAPITTUL 19

VARÐVEIT TÍTT VINALAG VIÐ JEHOVA

ÍMYNDA tær, at tú ert uttandura, tá ið illveður brestir á. Tað dregur á luftina, snarljósini skyggja og toran gongur. Og so fer at oysa niður. Tú roynir at finna eitt stað at kroka. Tá ið tú endiliga kemur inn onkustaðni, kennist tað sum ein lætti.

2 Vit eru í einari líknandi støðu í dag. Viðurskiftini í heiminum versna. Kanska hugsar tú um, hvar tú kanst kenna teg tryggan. Eitt sálmaskald skrivaði: „Skjól mítt, borg mín, Gud mín, sum eg líti á!“ (Sálmur 91:2) Ja, Jehova kann vera okkara skjól og geva okkum tryggleika longu nú, og hann gevur okkum eina fantastiska framtíðarvón.

3 Hvussu kann Jehova verja okkum? Hann kann hjálpa okkum at klára okkara trupulleikar, og hann er nógv sterkari enn tey, sum eru ímóti okkum. Sjálvt um vit skuldu upplivað okkurt keðiligt nú, kunnu vit vera vís í, at Jehova fer at gera alt gott aftur í framtíðini. Bíblian eggjar okkum til at ’halda okkum í kærleika Guds’. (Judasarbrævið 21) Vit mugu varðveita okkara vinalag við Jehova, tí so hjálpir hann okkum, uttan mun til hvat hendir. Men hvussu gera vit tað?

VÍS, AT TÚ ERT TAKKSAMUR FYRI GUDS KÆRLEIKA

4 Tá ið vit skilja, hvussu góður Jehova er við okkum,

1, 2. Hvør kann geva okkum tryggleika í dag?
3. Hvat mugu vit gera, um vit vilja hava Jehova at verja okkum?
4, 5. Hvussu hevur Jehova víst, at hann elskar okkum?

fáa vit hug at varðveita okkara vinalag við hann. Hugsa um alt tað, sum Jehova hevur gjørt fyri okkum. Hann hevur givið okkum eina vakra jørð við eini rúgvu av hugtakandi plantum og djórum. Hann skapti jørðina soleiðis, at vit kunnu fáa reint vatn og nógvan góðan mat. Hann hevur eisini givið okkum Bíbliuna, sum sigur okkum, hvussu hann eitur, og hvussu hann er. Fram um alt vísti hann sín stóra kærleika til okkara, táið hann sendi sín elskaða son, Jesus, niður á jørðina at geva sítt lív fyri okkum. (Jóhannes 3:16) Og av tí at hann gjørdi tað, hava vit eina frálíka framtíðarvón.

5 Jehova hevur sett eina stjórn á stovn í himli, messianska ríkið, sum skjótt fer at gera enda á allari neyð, sorg og pínu. Hetta ríkið fer at syrgja fyri, at jørðin verður eitt paradís, og at øll menniskju verða lukkulig og liva friðarliga saman í allar ævir. (Sálmur 37:29; Matteus 5:5) Eitt annað, sum vísir, hvussu góður Jehova er við okkum, er, at hann lærir okkum, hvussu vit kunnu fáa eitt gott lív longu nú. Hann vil eisini, at vit skulu biðja til hansara, og hann er altíð til reiðar at lurta eftir okkum. Tað er týðiligt, at Jehova elskar hvønn einstakan av okkum.

6 Táið vit hugsa um alt tað, sum Jehova hevur gjørt fyri okkum, er tað natúrligt, at vit verða takksom. Men tíverri eru nógv í dag ótakksom, og tað vóru fólk eisini, táið Jesus var á jørðini. Einaferð grøddi Jesus tíggju spitalskar menn, men *bara ein* takkaði honum fyri tað. (Lukas 17:12-17) Vit hava so nógv at takka Jehova fyri, og tað er umráðandi, at vit gera tað.

---

6. Hvussu eigur alt tað, sum Jehova hevur gjørt fyri okkum, at ávirka okkum?

7 Vit mugu eisini vísa, at vit elska Jehova. Jesus segði við lærisveinarnar, at teir skuldu elska Jehova av øllum hjarta, av allari sál og av øllum huga. **(Les Matteus 22:37.)** Hvat meinti hann við?

8 Hvat ber tað í sær at elska Jehova av øllum hjarta, allari sál og øllum huga? Tað er ikki nokk bara at siga, at vit elska hann, vit mugu eisini vísa tað. (Matteus 7:16-20) Bíblian sigur, at tann, sum elskar Gud, heldur hansara boð. Og tað er ikki strævið, tí „boð Hansara eru ikki tung“. – **Les 1. Jóhannesarbræv 5:3.**

9 Tá ið vit akta Jehova, fáa vit eitt gott lív. (Esaias 48:17, 18) Men hvat kann hjálpa okkum at varðveita okkara vinalag við Jehova? Latið okkum vita.

HALT FRAM AT STYRKJA TÍTT VINALAG VIÐ JEHOVA

10 Hvussu bleivst tú vinur við Jehova? So hvørt sum tú kannaði Bíbliuna, lærdi tú Jehova at kenna og bleivst hansara vinur. Tykkara vinalag kann samanberast við eitt bál, sum tú vilt halda lív í. Eins og tú mást leggja meira brenni á bálið, um tað skal blíva við at brenna, mást tú halda fram at læra um Jehova fyri at varðveita vinalagið við hann. – Orðtøkini 2:1-5.

11 Meira tú kannar Bíbliuna, meira fer tað at ávirka teg. Legg merki til, hvussu tað ávirkaði tveir lærisveinar, tá ið Jesus forklaraði nakrar profetiir fyri teimum. Teir søgdu við hvønn annan: „Brann ikki hjartað í okkum, táið Hann talaði við okkum á vegnum og læt okkum upp skriftirnar!“ – Lukas 24:32.

---

7. Hvat segði Jesus um at elska Jehova?
8, 9. Hvussu kunnu vit vísa Jehova, at vit elska hann?
10. Hví skalt tú halda fram at læra meira um Jehova?
11. Hvussu kann tað, sum Bíblian lærir, ávirka teg?

12 Tá ið lærisveinarnir hjá Jesusi skiltu Skriftirnar, ávirkaði tað teirra kenslur. Og tá ið tú byrjaði at skilja Bíbliuna, ávirkaði tað kanska teg á líknandi hátt. Tú lærdi Jehova at kenna og fórt at elska hann. Men um tú ikki ansar eftir, kann hesin kærleikin kólna. – Matteus 24:12.

13 Tað er altso neyðugt at leggja orku í, um tú vilt varðveita títt vinalag við Jehova. Tú mást halda fram at læra um hann og Jesus og hugsa um, hvussu tú kanst brúka tað, sum tú lærir. (Jóhannes 17:3) Tá ið tú lesur og kannar Bíbliuna, kanst tú spyrja teg sjálvan: ’Hvat lærir hetta meg um Jehova? Hvussu fær hetta meg at elska Jehova enn meira?’ – 1. Timoteusarbræv 4:15.

12, 13. (a) Hvat kundi hent við okkara kærleika til Jehova? (b) Hvussu kunnu vit varðveita okkara vinalag við Jehova?



Tú mást gera nakað fyri at halda lív í tínum kærleika til Jehova

14 Fyri at varðveita vinalagið við ein góðan vin mugu vit tosa ofta við hann. Á líknandi hátt varðveita vit okkara vinalag við Jehova, um vit ofta tosa við hann í bøn. **(Les 1. Tessalonikabræv 5:17.)** Bønin er ein gáva frá Jehova, og hann vil, at vit skulu siga honum, akkurát hvussu vit hava tað. (Sálmur 62:9) Okkara bønir skulu ikki bara blíva sum ein ramsa, nei, tað, vit siga, skal koma frá hjartanum. Og halda vit fram at kanna Bíbliuna og biðja inniligar bønir, varðveita vit eitt gott vinalag við Jehova.

TOSA VIÐ ONNUR UM JEHOVA

15 Eitt annað, vit kunnu gera fyri at varðveita okkara vinalag við Jehova, er at tosa við onnur um okkara trúgv. Tað er ein stórur framíhjárættur at sleppa at fortelja øðrum um Jehova. (Lukas 1:74, 75) Haraftrat segði Jesus, at øll kristin hava skyldu at boða um Guds ríki. Kanska hevur tú longu prøvað tað. – Matteus 24:14; 28:19, 20.

16 Paulus virðismetti boðanararbeiðið, hann rópti tað enntá ein skatt. (2. Korintbræv 4:7) Tað hevur stóran týdning at tosa við onnur um Jehova og hansara vilja. Tað er ein partur av okkara tilbiðing, og Jehova gleðist um tað, vit gera fyri hann. (Hebrearabrævið 6:10) Vit fara ikki bara í boðanina fyri okkara egnu skyld, nei, vit gera tað eisini fyri onnur. Hugsa tær, hvussu fantastiskt tað er at kunna hjálpa øðrum at gerast vinir við Jehova og fáa møguleika at liva um ævir! **(Les 1. Korintbræv 15:58.)** Tað er tað besta, vit kunnu gera!

---

14. Hvussu hjálpir bøn okkum at varðveita vinalagið við Jehova?
15, 16. Hví heldur tú, at tað hevur stóran týdning at tosa við onnur um sína trúgv?

17 Boðanararbeiðið hevur størri týdning nú enn nakrantíð. Vit mugu 'prædika orðið og vera íðin'. (2. Timoteusarbræv 4:2) Fólk hava brúk fyri at hoyra um Guds ríki, tí Bíblian sigur: „Nær er dagur HARRANS, hin stóri; hann er nær og kemur brádliga." Ja, hann verður ikki seinkaður. (Zefanias 1:14; Habakkuk 2:3) Jehova fer heilt skjótt at beina fyri ónda heiminum hjá Satani. Og tí mugu vit ávara fólk, áðrenn tað er ov seint, so tey kunnu velja at tæna Jehova.

18 Jehova vil, at vit skulu tilbiðja hann saman við øðrum. Bíblian sigur: „Latið okkum geva gætur hvør eftir øðrum, so vit fáa hvør annan at brenna í kærleika og góðum verkum – og ikki geva uppat at koma saman hvør við annan – soleiðis sum siður er hjá summum – men áminna hvør annan, og tað so mikið meiri, sum tit síggja, at dagurin nærkast!" (Hebrearabrævið 10:24, 25) Á møtunum hava vit altso møguleika at gleða og styrkja hvørt annað, og tí mugu vit gera okkara besta fyri at koma á øll møtini.

19 Á møtunum kanst tú fáa góðar vinir, sum hjálpa tær at tæna Jehova. Fólk í samkomuni hava ymiska bakgrund og persónleika, og tey gera sítt besta fyri at gera tað, sum er rætt. Men eins og øll onnur eru tey ófullkomin og gera mistøk. So tá ið tað hendir, mást tú vera til reiðar at fyrigeva teimum. **(Les Efesusbrævið 4:32.)** Royn altíð at hugsa um teirra góðu síður, tí so fert tú at elska tey, og títt vinalag við Jehova verður enn betri.

---

17. Hví hevur boðanararbeiðið størri týdning nú enn nakrantíð?
18. Hví hava møtini so stóran týdning?
19. Hvat kann hjálpa okkum at elska okkara vinir í samkomuni?

TAÐ SANNA LÍVIÐ

20 Jehova vil, at hansara vinir skulu hava tað besta lívið yvirhøvur. Bíblian vísir, at lívið í framtíðini fer at vera heilt øðrvísi, enn tað er í dag.

21 Í dag liva vit kanska í eini 70-80 ár, men í framtíðini fara vit at liva í allar ævir og hava góða heilsu. Tá fara øll menniskju at vera lukkulig og liva friðarliga saman í einum vøkrum paradísi. Í Bíbliuni verður tað umrøtt sum 'hitt sanna lívið'. Jehova vil, at vit skulu sleppa at uppliva tað, men vit mugu sjálv gera nakað fyri at 'grípa hitt sanna lívið'. – 1. Timoteusarbræv 6:12, 19.

22 Hvussu kunnu vit 'grípa hitt sanna lívið'? Vit mugu „gera gott" og „vera rík í góðum verkum". (1. Timoteusarbræv 6:18) Tað merkir, at vit mugu fylgja tí, sum Bíblian lærir. Men líkamikið hvussu nógv gott vit gera, hava vit ikki uppiborið at fáa ævigt lív. Ævigt lív er ein gáva frá Jehova, ein heilt serlig góðvild, sum hann vísir sínum trúføstu tænarum. (Rómbrævið 5:15) Okkara himmalski faðir vil so fegin geva okkum hesa gávuna.

23 Spyr teg sjálvan: 'Tilbiði eg Gud upp á tann rætta mátan?' Um tú uppdagar, at tú hevur brúk fyri at broyta okkurt, mást tú gera tað beinanvegin. Tá ið vit líta á Jehova og gera okkara besta fyri at akta hann, verður hann okkara skjól. So hóast tann síðsta tíðin í ónda heiminum hjá Satani er sera baldrut, kunnu vit

---

20, 21. Hvat er 'hitt sanna lívið'?
22. (a) Hvussu kunnu vit 'grípa hitt sanna lívið'? (b) Hví hava vit ikki uppiborið ævigt lív?
23. Hví mást tú taka tær røttu avgerðirnar nú?

kenna okkum trygg. Skjótt fer Jehova at uppfylla sítt lyfti um, at vit skulu sleppa at liva um ævir í einum paradísi. Ja, tú kanst fáa tað sanna lívið, um tú tekur tær røttu avgerðirnar nú!

Jehova vil, at tú skalt fáa tað 'sanna lívið'

1 JEHOVA ELSKAR TEG

„So elskaði Gud heimin, at Hann gav Son Sín, hin einborna, fyri at hvør tann, ið trýr á Hann, skal ikki fortapast, men hava ævigt lív.“– Jóhannes 3:16

Hvussu vísir Jehova, at hann elskar teg?

Sálmur 91:2
Jehova er okkara skjól. Hann kann troysta okkum og hjálpa okkum, tá ið vit hava trupulleikar.

Sálmur 37:29; Matteus 5:5
Hann hevur givið okkum eina frálíka framtíðarvón.

1. Timoteusarbræv 6:12, 19
Hann fer at geva okkum ævigt lív í einum paradísi. Tá fara øll at kenna seg trygg, vera lukkulig og hava góða heilsu.

2 JEHOVA VIL, AT TÚ SKALT ELSKA HANN

„Tú skalt elska Harran Gud tín av øllum hjarta tínum, av allari sál tíni og av øllum huga tínum.“– Matteus 22:37

Hvat gevur Guds kærleiki tær hug at gera?

Lukas 17:12-17
Ver takksamur fyri alt tað, sum Gud hevur gjørt fyri teg.

Matteus 7:16-20
Vís, at tú elskar Gud við at gera hansara vilja hvønn dag.

1. Jóhannesarbræv 5:3
Fylg Guds boðum.

1. Timoteusarbræv 6:18
Ger títt besta fyri at gera nakað gott fyri onnur.

3 LAT IKKI KÆRLEIKAN KÓLNA

’Haldið tykkum í kærleika Guds.’– Judasarbrævið 21

Hvat kann hjálpa tær at varðveita títt vinalag við Jehova?

1. Tessalonikabræv 5:17
Bið ofta.

Matteus 28:19, 20;
2. Timoteusarbræv 4:2
Tosa við onnur um Guds ríki.

Orðtøkini 2:1-5
Halt fram at læra um Jehova.

Hebrearabrævið 10:24, 25
Kom á øll møtini. Tey í samkomuni kunnu hjálpa tær at fáa eitt enn betri vinalag við Jehova.

1 JEHOVA

Gud eitur Jehova, og navnið merkir sambært fleiri bíbliugranskarum „Hann fær at verða“. Jehova er hin alvaldi Gud, og hann hevur skapt alt. Hann hevur vald at gera alt, sum hann setur sær fyri.

Á hebraiskum bleiv Guds navn skrivað við fýra bókstavum. Á føroyskum verða teir endurgivnir JHVH. Tá ið Gamla testamenti bleiv skrivað á hebraiskum, stóð Guds navn at lesa næstan 7.000 ferðir. Kring heimin brúka fólk ymiskar formar av navninum Jehova og úttala tað soleiðis, sum tað er vanligt á teirra máli.

Upplýsingar um, hví Guds navn ikki stendur í nógvum bíbliuumsetingum, eru at finna í 1. parti í heftinum *Bíbliuhandbók.*

▸ Kap. 1, stk. 15, undirgr.

2 BÍBLIAN ER „INNBLÁST AV GUDI“

Bíblian er frá Gudi, hóast tað eru menn, sum hava skrivað hana. Tað er sum, tá ið ein stjóri biður skrivaran hjá sær skriva eitt bræv. Sjálvt um tað er skrivarin, sum skrivar brævið, er tað frá stjóranum. Við sínum heilaga anda syrgdi Gud fyri, at menn skrivaðu hansara tankar niður. Guds heilagi andi ávirkaði teir upp á ymiskar mátar. Viðhvørt fingu teir sjónir ella dreymar, sum teir síðani skrivaðu niður.

▸ Kap. 2, stk. 5

3 MEGINREGLUR

Ein meginregla er ein grundleggjandi sannleiki. Til dømis kann meginreglan „ringur felagsskapur spillir góðar siðir“ læra okkum, at vit verða ávirkað av teimum, sum vit eru saman við. (1. Korintbræv 15:33) Og meginreglan „tað, sum menniskjað sáar, skal tað eisini heysta“ lærir okkum, at alt, sum vit gera, hevur avleiðingar. – Galatiabrævið 6:7.

▸ Kap. 2, stk. 12

4 PROFETI

Ein profeti er ein boðskapur frá Gudi, sum fortelur, hvat hansara vilji er, ella sum inniheldur eina moralska vegleiðing, eini boð ella ein dóm. Tað kann eisini vera ein boðskapur um okkurt, sum fer at henda í framtíðini. Nógvar profetiir í Bíbliuni eru longu gingnar út.

▸ Kap. 2, stk. 13

5 PROFETIIR UM MESSIAS

Jesus uppfylti allar profetiirnar í Bíbliuni um Messias. Sí rammuna „Profetiir um Messias“.

▸ Kap. 2, stk. 17, undirgr.

6 GUDS ÆTLAN VIÐ JØRÐINI

Jehova skapti jørðina til at vera eitt paradís. Hon skuldi vera eitt heim hjá menniskjum, sum elska Gud. Hansara ætlan er ikki broytt. Skjótt fer Gud at beina fyri óndskapi og geva menniskjum ævigt lív.

▸ Kap. 3, stk. 1

7 SATAN DJEVULIN

Satan er tann eingilin, sum byrjaði uppreisturin ímóti Gudi. Hann verður róptur Satan, sum merkir „mótstøðumaður“, tí hann stríðist ímóti Jehova. Hann verður eisini róptur Djevulin, sum merkir „baktalari“, tí hann lýgur um Gud og lumpar fólk.

▸ Kap. 3, stk. 4

PROFETIIR UM MESSIAS

HENDING	PROFETI	UPPFYLLING
Føddur í ætt Juda	1. Mósebók 49:10	Lukas 3:23-33
Føddur av eini jomfrú	Esaias 7:14	Matteus 1:18-25
Eftirkomari hjá Dávidi kongi	Esaias 9:7	Matteus 1:1, 6-17
Jehova váttaði, at Jesus var sonur hansara	Sálmur 2:7	Matteus 3:17
Nógv trúðu ikki upp á, at Jesus var Messias	Esaias 53:1	Jóhannes 12:37, 38
Reið inn í Jerusalem á einum esli	Zakarias 9:9	Matteus 21:1-9
Svikin av einum vini	Sálmur 41:10	Jóhannes 13:18, 21-30
Svikin fyri 30 silvurpengar	Zakarias 11:12	Matteus 26:14-16
Tagdi, táið hann bleiv ákærdur	Esaias 53:7	Matteus 27:11-14
Lutakast um klæðini hjá honum	Sálmur 22:19	Lukas 23:34
Spottaður á steyranum	Sálmur 22:8, 9	Lukas 23:35-39
Eingi bein í kroppinum brotin	Sálmur 34:21	Jóhannes 19:33, 36
Jarðaður millum tey ríku	Esaias 53:9	Matteus 27:57-60
Reistur upp frá deyðum	Sálmur 16:10	Ápostlasøgan 2:31, 32
Reistur upp til himmals at sita við høgru hond Guds	Sálmur 110:1	Ápostlasøgan 7:55, 56

8 EINGLAR

Jehova skapti einglarnar, langt áðrenn hann skapti jørðina. Teir blivu skaptir til at vera í himli. Fleiri enn hundrað milliónir einglar eru til. (Dániel 7:10) Hvør eingil hevur eitt navn og ein persónleika. Einglar eru eyðmjúkir og vilja ikki, at menniskju skulu tilbiðja teir. Teir hava ymiska støðu og nógvar ymiskar uppgávur at røkja. Nakrar av hesum uppgávunum fevna um at tæna við hásæti Jehova, at geva menniskjum boðskapir frá Gudi, at verja og vegleiða hansara tænarar á jørðini, at útinna hansara dómar og at stuðla boðanararbeiðinum. (Sálmur 34:8; Opinberingin 14:6; 22:8, 9) Í framtíðini fara teir at stríðast saman við Jesusi í Harmageddonkrígnum. – Opinberingin 16:14, 16; 19:14, 15.

▸ Kap. 3, stk. 5; kap. 10, stk. 1

9 SYND

Alt, sum vit føla, hugsa ella gera, sum er í stríð við Guds vilja, er synd. Tað skaðar okkara samband við Jehova, tá ið vit synda, og tí hevur hann givið okkum lógir og meginreglur, sum hjálpa okkum at lata vera við at synda við vilja. Alt, sum Jehova skapti, var fullkomið, men tá ið Ádam og Eva valdu at vera ólýðin, syndaðu tey og vóru tí ikki longur fullkomin. Tey blivu gomul og doyðu, og av tí at vit hava arvað syndina frá Ádami, verða vit eisini gomul og doyggja.

▸ Kap. 3, stk. 7; kap. 5, stk. 3

10 HARMAGEDDON

Harmageddon er Guds kríggj, sum fer at beina fyri heiminum hjá Satani og øllum óndskapi.

▸ Kap. 3, stk. 13; kap. 8, stk. 18

11 GUDS RÍKI

Guds ríki er ein stjórn, sum Jehova hevur stovnað í himli. Jesus er kongur í ríkinum. Jehova fer at brúka hetta ríkið til at beina fyri øllum óndskapi. Guds ríki fer síðani at ráða yvir jørðini.

▸ Kap. 3, stk. 14

12 JESUS KRISTUS

Jehova skapti Jesus, áðrenn hann skapti nakað annað. Hann sendi Jesus niður á jørðina at doyggja fyri okkum. Eftir at Jesus var blivin dripin, reisti Jehova hann upp aftur, og nú er hann kongur í Guds ríki í himli.

▸ Kap. 4, stk. 2

13 PROFETIIN UM TÆR 70 VIKURNAR

Bíblian profeteraði, ella boðaði frá, nær Messias skuldi koma. Tað skuldi hann eftir eitt tíðarskeið upp á 69 vikur. Hetta tíðarskeiðið byrjaði í ár 455 f.o.t. og endaði í ár 29 e.o.t.

Hvussu vita vit, at tíðarskeiðið endaði í ár 29 e.o.t.? Tær 69 vikurnar byrjaðu í ár 455 f.o.t., tá ið Nehemias kom til Jerusalem og fór undir at byggja býin upp aftur. (Dániel 9:25; Nehemias 2:1, 5-8) Tá ið vit hoyra orðið „vika“, hugsa vit vanliga um 7 dagar. Men í hesi profetiini varir hvør vika ikki 7 dagar, men 7 ár, og tað samsvarar við bíbilsku meginregluna „eitt ár fyri hvønn dag“. (4. Mósebók 14:34; Ezekiel 4:6) Tí svara tær 69 vikurnar til 483 ár (69 x 7). Telja vit 483 ár frá ár 455 f.o.t., koma vit fram til ár 29 e.o.t. (Einki ár 0 er.) Tað var akkurát tað árið, at Jesus bleiv doyptur og bleiv Messias. – Lukas 3:1, 2, 21, 22.

Tann sama profetiin boðaði frá enn eini viku, tað vil siga 7 árum aftrat. Mitt í hesi vikuni, í ár 33 e.o.t., skuldi Messias blíva dripin, og tá ið vikan var av, fyrst í ár 36 e.o.t., skuldu tey góðu tíðindini um Guds ríki boðast fyri øllum fólkasløgum, ikki bara fyri jødum. – Dániel 9:24-27.

▸ Kap. 4, stk. 7



14 TRÍEINDARLÆRAN

Bíblian lærir, at Jehova Gud er skaparin, og at hann skapti Jesus, áðrenn hann skapti alt annað. (Kolossebrævið 1:15, 16, *NW*) Jesus er ikki hin alvaldi Gud. Hann hevur ongantíð sagt seg vera javnlíkan Gudi. Nei, hann segði tvørturímóti: „Faðirin er størri enn Eg.“ (Jóhannes 14:28; 1. Korintbræv 15:28) Men fleiri átrúnaðir læra, at Gud er tríggir persónar í einum: faðirin, sonurin og heilagi andin, altso ein tríeind. Men orðið tríeind stendur ikki í Bíbliuni. Tað er ein følsk læra.

Heilagi andin er Guds ósjónliga og virksama kraft, sum hann brúkar til at fullføra sín vilja. Heilagi andin er ikki ein persónur. Tey fyrstu kristnu vórðu til dømis „*fylt* av Heilaga Andanum“, og Jehova segði: „Eg skal *úthella* av Anda Mínum yvir alt hold.“ – Ápostlasøgan 2:1-4, 17.

▸ Kap. 4, stk. 12; kap. 15, stk. 17

15 KROSSURIN

Hví brúka Jehova vitni ikki krossin?

1. Krossurin hevur í langa tíð verið brúktur í følskum átrúnaði. Fyrr í tíðini varð hann brúktur í náttúrutrúgv og í heidnum sexritualum. Tey fyrstu 300 árini eftir at Jesus var deyður, brúktu tey kristnu ikki krossin í síni tilbiðing. Tað var rómverski keisarin Konstantin, sum gjørdi krossin til eina ímynd fyri kristindómin. Krossurin bleiv brúktur í eini roynd at gera kristindómin betur umtóktan. Men krossurin hevði einki við Jesus at gera. Eitt leksikon sigur: „Krossurin er funnin bæði í undankristnum og ikki-kristnum mentanum.“ – *New Catholic Encyclopedia.*

2. Jesus doyði ikki á einum krossi. Griksku orðini, sum verða umsett „krossur“, merkja í grundini „ein upprættur steyri“, „ein stólpi“ ella „eitt træ“. *The Companion Bible* greiðir frá: „Í grikska tekstinum í NT [Nýggja testamenti]

er als einki, sum bendir á, at talan kann vera um tveir træbjálkar.“ Jesus doyði á einum upprættum steyra.

3. Jehova vil ikki hava, at vit brúka halgimyndir ella ímyndir, tá ið vit tilbiðja hann. – 2. Mósebók 20:4, 5; 1. Korintbræv 10:14.

▸ Kap. 5, stk. 12

16 MINNINGARHØGTÍÐIN

Jesus bað sínar lærisveinar minnast hansara deyða. Tey, sum fylgja Jesusi, minnast hansara deyða á hvørjum ári tann 14. nisan, sum eftir jødiska kalendaranum er tann dagurin, ísraelsmenn hildu páskir. Á minningarhøgtíðini verður breyð og vín, sum umboðar likamið og blóðið hjá Jesusi, bjóðað øllum. Tey, sum skulu ráða saman við Jesusi í himli, fáa sær av breyðinum og víninum. Tey, sum hava vón um at liva um ævir á jørðini, eru við á minningarhøgtíðini, men tey eta ikki av breyðinum og drekka ikki av víninum.

▸ Kap. 5, stk. 21

17 SÁL

Tað hebraiska og tað grikska orðið fyri „sál“, sum stendur í upprunatekstinum til Bíbliuna, hevur ymiskar týdningar. Tað verður brúkt til at lýsa (1) menniskju, (2) djór og (3) lívið hjá menniskjum ella djórum. Hetta sæst millum annað við at samanbera ymiskar bíbliutýðingar.

Menniskju. „Á døgum Nóa ... vórðu nakrar fáar – átta – sálir frelstar við vatni.“ (1. Pætursbræv 3:20) Her verður orðið „sálir“ brúkt um menniskju – Nóa og konuna, teir tríggjar synirnar hjá teimum og konurnar hjá synunum.

Djór. Í Opinberingini 16:3 (Victor Danielsen) stendur: „Hvør livandi sál í havinum doyði.“ Sama bíbliuørindi í *Nýggja Sáttmálanum* ljóðar: „Alt livandi í havinum doyði.“

Lívið hjá menniskjum ella djórum. Jesus segði í einum líknilsi: „Hesa nátt verður tú kravdur eftir sál tíni.“ (Lukas 12:20, Victor Danielsen) Sama bíbliuørindi í *Nýggja Sáttmálanum* ljóðar: „Tú skalt doyggja í nátt.“ Eitt annað dømi er at finna í Matteus 16:26 (Victor Danielsen): „Hvat batar tað menniskjanum, um tað vinnur allan heimin, men má lata sál sína afturfyri!“ Og *Nýggi Sáttmálin* sigur: „Hvat gagnar tað, um tú vinnur allan heimin, men mást bøta við lívinum.“

Og tá ið onkur ger nakað av „allari sál“ síni, merkir tað, at hann ger tað villiga og eftir besta førimuni. (Matteus 22:37; 5. Mósebók 6:5) Guds orð vísir týðiliga, at sálin kann doyggja. – Ezekiel 18:4, Dahl/Viderø; Jákupsbrævið 5:20.

▸ Kap. 6, stk. 5, undirgr.; kap. 15, stk. 17

18 ANDI

Hebraisku og griksku orðini fyri „anda“ í Bíbliuni kunnu hava ymiskan týdning. Men tey vísa altíð til okkurt, sum menniskju ikki síggja, til dømis vindin ella andadráttin hjá menniskjum og djórum. Orðini kunnu eisini vísa til andaverur og til heilaga andan, sum er Guds virksama kraft. Bíblian lærir ikki, at ein partur av menniskjanum livir víðari eftir deyðan. – 2. Mósebók 35:21; Sálmur 104:29; Matteus 12:43; Lukas 11:13.

▸ Kap. 6, stk. 5, undirgr.; kap. 15, stk. 17

19 GEHENNA

Í nógvum bíbliutýðingum verður grikska orðið Gehenna umsett „helviti“. Men Gehenna er navnið á einum dali nærindis Jerusalem, har tey brendu rusk. Einki prógv er um, at djór ella menniskju blivu pínd ella brend livandi í hesum dalinum. Gehenna ímyndar altso ikki eitt ósjónligt stað, har deyð menniskju skulu pínast og brenna í

allar ævir. Tá ið Jesus tosaði um, at onkur skuldi blakast í Gehenna, meinti hann, at persónurin skuldi fyribeinast fullkomiliga. – Matteus 5:22; 10:28.

▸ Kap. 7, stk. 20

20 FAÐIRVÁR

Við hesi bønini lærdi Jesus sínar lærisveinar, hvussu teir skuldu biðja. Jesus nevndi ymiskt, sum hevur týdning at biðja um. Til dømis:

„Heilagt verði navn Títt“

Vit biðja um, at Jehova skal reinsa sítt navn fyri allar ákærur og lygnir. Tá ið hann hevur gjørt tað, fara øll í himli og á jørð at virða og tosa væl um hann og hansara navn.

„Komi ríki Títt“

Vit biðja um, at Guds ríki skal beina fyri ónda heiminum hjá Satani, ráða yvir jørðini og gera hana til eitt paradís.

„Verði vilji Tín ... á jørðini“

Vit biðja um, at Guds vilji við jørðini skal blíva veruleiki, so lýðin menniskju kunnu liva um ævir í einum paradísi, akkurát sum Jehova ætlaði, tá ið hann skapti menniskjuni.

▸ Kap. 8, stk. 2

21 LOYSIGJALDIÐ

Jehova syrgdi fyri, at eitt loysigjald bleiv goldið, sum kundi keypa menniskju leys frá synd og deyða. Loysigjaldið svaraði til tað, sum Ádam misti, altso eitt fullkomið mannalív. Hetta loysigjaldið kundi gera sambandið millum menniskjuni og Jehova gott aftur. Gud sendi Jesus niður á jørðina at doyggja fyri okkum menniskju, sum øll eru syndarar. Av tí at Jesus doyði, hava øll menniskju møguleika fyri at fáa ævigt lív og at blíva fullkomin.

▸ Kap. 8, stk. 21; kap. 9, stk. 13

22 HVÍ HEVUR ÁRIÐ 1914 SO STÓRAN TÝDNING?

Profetiin í 4. kapitli í Dániels bók lærir okkum, at Gud skuldi seta sítt ríki á stovn í 1914.

Profetiin. Jehova læt Nebukadnezar kong fáa ein profetiskan dreym um eitt stórt træ, sum bleiv felt. Leinkjur av jarni og kopari vórðu lagdar rundan um træstubban fyri at forða trænum í at vaksa í „sjey tíðir". Eftir tað skuldi træið vaksa upp aftur. – Dániel 4:1, 10-16.

Hvat merkir profetiin? Træið umboðar Guds harradømi. Í umleið 500 ár læt Jehova kongar í Jerusalem ráða yvir tjóðini Ísrael. (1. Krønikubók 29:23) Men nógvir av hesum kongunum vendu Jehova bakið. Og úrslitið varð, at kongarøðin bleiv kvett í ár 607 f.o.t., tá ið Jerusalem bleiv lagt í oyði. Tá byrjaðu tær 'sjey tíðirnar'. (2. Kongabók 25:1, 8-10; Ezekiel 21:25-27) Jesus tosaði um tær 'sjey tíðirnar', tá ið hann segði: „Jerúsalem skal liggja niðurtraðkað av heidningum, inntil tíð heidninganna er at enda." (Lukas 21:24) Tær 'sjey tíðirnar' endaðu altso ikki, meðan Jesus var á jørðini. Jehova lovaði at seta ein kong, tá ið tær 'sjey tíðirnar' endaðu. Hesin kongurin var Jesus, og hansara harradømi skuldi syrgja fyri, at Guds fólk fór at hava tað gott á jørðini í allar ævir. – Lukas 1:30-33.

Hvussu leingi vardu tær 'sjey tíðirnar'? Tær 'sjey tíðirnar' vardu í 2.520 ár. Hvussu kunnu vit siga tað? Bíblian sigur, at tríggjar og ein hálv tíð svara til 1.260 dagar. (Opinberingin 12:6, 14) „Sjey tíðir" mugu tí vera dupult so nógv, altso 2.520 dagar. Teir 2.520 dagarnir svara til 2.520 ár eftir bíbilsku meginregluni „eitt ár fyri hvønn dag". – 4. Mósebók 14:34; Ezekiel 4:6.

DREYMURIN HJÁ NEBUKADNEZARI

HVAT LÆRIR HANN OKKUM UM GUDS RÍKI?

PROFETIIN

Eitt stórt træ
(Dániel 4:10, 11)

„Fellið træið“
(Dániel 4:14)

Eitt harradømi

Harradømið endar

HVAT MERKIR PROFETIIN?

Ísraelitiskir kongar, sum ráddu yvir Guds fólki

Jerusalem bleiv lagt í oyði, og ísraelitisku kongarnir ráddu ikki longur

Oktober
607 f.o.t.


„Sjey tíðir skulu ganga“ (Dániel 4:16)
„Tú skalt fáa ríki títt aftur“ (Dániel 4:26)
„Sjey tíðir“
Harradømið verður reist aftur
2.520 ár
Jesus byrjar at ráða sum kongur í Guds ríki í himli
f.o.t.
e.o.t.
606 1/4 ár
1.913 3/4 ár
Oktober 1914 e.o.t.
„Jerúsalem skal liggja niðurtraðkað ... inntil *tíð heidninganna* er at enda“ (Lukas 21:24)

Telja vit 2.520 ár frá árinum 607 f.o.t., koma vit fram til ár 1914 e.o.t. (Einki ár 0 er.) Tað var altso í ár 1914, at Jehova setti Jesus Kristus til kong í Guds ríki í himli.

▸ Kap. 8, stk. 23

23 YVIREINGILIN MIKAEL

Bíblian nevnir bara ein yvireingil, og hann eitur Mikael. (Dániel 12:1; Judasarbrævið 9) Mikael leiðir einglaherin hjá Gudi. Í Opinberingini 12:7 stendur: „Mikael og einglar hansara tóku at berjast við drekan ... og einglar hansara.“ Eitt annað stað í Opinberingini síggja vit, at Jesus leiðir herin hjá Gudi, so Mikael er eitt annað navn fyri Jesus. – Opinberingin 19:14-16.

▸ Kap. 8, stk. 12, undirgr.; kap. 9, stk. 5

24 TEIR SÍÐSTU DAGARNIR

Henda orðingin vísir til eitt sera ófriðarligt tíðarskeið, sum skuldi vera, beint áðrenn Guds ríki fer at beina fyri ónda heiminum hjá Satani. Bíblian brúkar eisini aðrar orðingar um sama tíðarskeið, sum til dømis ’endi tíðarinnar’ og „nærvera menniskjasonarins“. (Matteus 24:3, 27, 37, *NW*; 28:20) Teir ’síðstu dagarnir’ byrjaðu, tá ið Guds ríki fór at ráða í himli í 1914, og teir enda, tá ið óndi heimurin hjá Satani verður fyribeindur í Harmageddon. – 2. Timoteusarbræv 3:1; 2. Pætursbræv 3:3.

▸ Kap. 9, stk. 5

25 UPPREISN

Tá ið Gud gevur einum persóni, sum er deyður, lívið aftur, verður tað rópt uppreisn. Níggju dømi um uppreisnir eru nevnd í Bíbliuni. Elias, Elisa, Jesus, Pætur og Paulus vaktu menniskju upp frá deyðum. Teir høvdu ikki kunnað gjørt slík undur uttan kraft frá Gudi. Jehova lovar, at 'bæði rættvís og órættvís' fáa eina uppreisn og sleppa at liva á jørðini. (Ápostlasøgan 24:15) Bíblian nevnir eisini eina uppreisn til lív í himli. Hon fer fram, tá ið tey, sum Gud hevur útvalt, ella salvað, verða reist upp frá deyðum og skulu ráða sum kongar saman við Jesusi í himli. – Jóhannes 5:28, 29; 11:25; Opinberingin 20:5, 6.

▸ Kap. 9, stk. 13

26 OKKULTISMA

Okkultisma fevnir um at royna at fáa samband við andar, antin beinleiðis ella gjøgnum onkran annan, sum til dømis eina spákonu ella ein andamanara. Nógv, sum fáast við okkultismu, trúgva upp á lygnina um, at menniskju liva víðari sum andar eftir deyðan. Teir illu andarnir royna at fáa menniskju at venda Gudi bakið. Okkultisma fevnir eisini um astrologi, spádóm, gand, pátrúgv og tað yvirnatúrliga. Nógvar bøkur, bløð, horoskop, filmar, spøl, plakatir og sangir fáa illar andar, gand og tað yvirnatúrliga at virka óskyldigt og spennandi. Nakrir siðir í sambandi við jarðarferðir føra eisini til, at fólk fáa samband við illar andar. Nøkur taka rúsevni, tá ið tey royna at fáa samband við teir illu andarnar. – Galatiabrævið 5:20, 21; Opinberingin 21:8.

▸ Kap. 10, stk. 10; kap. 16, stk. 4

27 RÆTTURIN HJÁ JEHOVA AT RÁÐA

Jehova er hin alvaldi Gud, og hann hevur skapt alt. (Opinberingin 15:3) Við øðrum orðum eigur hann alt, og tað er bara hann, sum hevur rætt til at ráða yvir sínum skapanarverki. (Sálmur 24:1; Esaias 40:21-23; Opinberingin 4:11) Hann hevur gjørt lógir til alt, sum hann hevur skapt. Jehova hevur eisini rætt til at geva øðrum vald. Tá ið vit elska Jehova og akta hann, vísa vit, at vit virða hansara rætt til at ráða. – 1. Krønikubók 29:11.

▸ Kap. 11, stk. 10

28 FOSTURTØKA

Fosturtøka verður framd við vilja fyri at beina fyri einum óføddum barni. Talan er ikki um, at ein kvinna óviljað missir sítt óføddа barn. Frá tí at eitt barn er gitið, er tað ein persónur fyri seg og ikki bara ein partur av kroppinum hjá mammuni.

▸ Kap. 13, stk. 5

29 BLÓÐFLUTNINGUR

Ein læknaviðgerð, sum ber í sær, at eitt menniskja fær fullblóð ella ein av teimum fýra høvuðslutunum í blóðinum inn í kroppin hjá sær. Tað kann vera eins egna blóð, sum hevur verið goymt, ella blóð frá onkrum øðrum. Teir fýra høvuðslutirnir í blóðinum eru blóðvæta, reyðir blóðkroppar, hvítir blóðkroppar og blóðplátur.

▸ Kap. 13, stk. 13

30 RÆTTLEIÐING

Tá ið Bíblian nevnir rættleiðing, snýr tað seg fyrst og fremst um at uppala, undirvísa og vegleiða. Tá ið Jehova rættleiðir onkran, ger hann tað ongantíð upp á ein harðan ella óreinan máta. (Orðtøkini 4:1, 2) Jehova er ein góð fyrimynd hjá foreldrum. Hann rættleiðir upp á ein máta, sum ger, at mann faktiskt kann fáa hug at fáa rættleiðing frá honum. (Orðtøkini 12:1) Jehova elskar okkum og lærir okkum alt gott. Hann hjálpir okkum at rætta skeivar tankar, so vit verða før fyri at hugsa rætt og gera tað, sum er rætt. Tá ið foreldur rættleiða síni børn, mugu tey hjálpa teimum at skilja, hví tey skulu akta. Rættleiðing fevnir eisini um, at foreldur skulu læra børnini at elska Jehova, elska Bíbliuna og skilja meginreglurnar í henni.

▸ Kap. 14, stk. 13

31 ILLIR ANDAR

Teir eru ósjónligir og óndir andaskapningar, sum hava yvirmenniskjaliga megi. Hesir einglarnir blivu óndir, tá ið teir valdu at vera ólýdnir ímóti Gudi og gjørdu seg til hansara fíggindar. (1. Mósebók 6:2; Judasarbrævið 6) Teir tóku undir við Satani, tá ið hann gjørdi uppreistur ímóti Jehova. – 5. Mósebók 32:17; Lukas 8:30; Ápostlasøgan 16:16; Jákupsbrævið 2:19.

▸ Kap. 16, stk. 4

Vilt tú vita meira? Vitja **www.jw.org**
ella set teg í samband við Jehova vitni.